| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13384 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 27. oktober 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU EISINI:**
Mikael Viderø
Sigurð Ó Vang
Jóan Petur Hentze
Ingunn Eiriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen
Sigrún Mohr

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 242/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 13388 |
| 243/16 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 13389 |
| 244/16 | 14/02822-1 | Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu | 13396 |
| 245/16 | 14/01046-4 | Nýggj spæliplass til børn í Tórshavn | 13405 |
| 246/16 | 16/01585-1 | Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016 | 13411 |
| 247/16 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 13417 |
| 248/16 | 14/02485-33 | Arbeiðseftirlitið : Eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund um inniklima, møguliga er blámusoppur í bygninginum matr. nr. 727et, Tórshavn (2012-0493) | 13426 |
| 249/16 | 16/03475-1 | Serveringskøkur til Ítróttahøllina í Kollafirði | 13433 |
| 250/16 | 16/00407-3 | Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur" | 13434 |
| 251/16 | 14/05063-1 | Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni | 13441 |
| 252/16 | 15/01982-1 | Glastak á perlutorg | 13446 |
| 253/16 | 16/03490-1 | Navn til nýggja parkeringsøkið við Høllina á Hálsi | 13450 |
| 254/16 | 14/01358-154 | Ytri Ringvegur vegføring frá Hjalla til Krákugjógv - atkomuvegur - innkomuvegur (2001-0407) | 13452 |
| 255/16 | 16/03538-8 | Undir Kongavarða – víðkan av útstykking | 13469 |
| 256/16 | 14/05161-3 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir | 13470 |
| 257/16 | 16/03242-9 | Umsókn um bygging (íbúðarhús) á matr. nr. 138di við Karlamagnusarbreyt, Hoyvík | 13476 |
| 258/16 | 16/03587-4 | Útleigan av niðaru hædd av Tórsgøtu 16. | 13478 |
| 259/16 | 16/02163-2 | Eigarafelagið Oman Flat. Viðtøkubroytingar. | 13480 |
| 260/16 | 15/02670-5 | Áheitan vegna Eigarafelagið Jørundargøta / Torkilsgøta um góðkenning av viðtøkunum, sum blivu broyttar á síðsta aðalfundi | 13481 |
| 261/16 | 16/03847-2 | Endurnýggjan av leigusáttmála á matr. nr. 1160b, Tórshavn. Arktisk Kommando. | 13483 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 262/16 | 16/01730-1 | Átak parkeringspolitikkur - Stovnsetan av gjaldsparkering | 13484 |
| 263/16 | 16/01666-2 | Dagføring av vatnveiting og gøtuljósum í Syðradali | 13486 |
| 264/16 | 14/00832-8 | Moldplássið í Kollafirði. Avriggan. (2013-2362) | 13487 |
| 265/16 | 16/02610-3 | Eftirlitsfrágreiðing 09.06.2016 - Tyrvingarplássið í Húsahaga | 13489 |
| 266/16 | 16/02631-1 | Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1038bk, Tórshavn | 13491 |
| 267/16 | 16/03404-1 | Hitapottar o.a. til Svimjihøllina í Gundadali | 13492 |
| 268/16 | 16/03497-23 | Nevndarviðgerð : Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar (2008-1294) | 13494 |
| 269/16 | 16/03499-24 | Yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir - um at gera upp og loka (2010-2717) | 13498 |
| 270/16 | 16/03561-1 | Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki undir Kongavarða | 13500 |
| 271/16 | 14/00822-2 | Torgunn Kragesteen og Jan á Argjaboða : Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri partar av matr. nr. 1a, Velbastað frá H frílendi til B sethús | 13501 |
| 272/16 | 16/03623-1 | Uppskot til broyting av ásetingum í serstøku byggisamtykt nr. 3 | 13503 |
| 273/16 | 16/00390-3 | Umsókn um, at kommunan yvirtekur part av Áarrás, Argir | 13505 |
| 274/16 | 16/00820-5 | Umsókn um at tórshavnar kommuna yvirtekur Baraldsgøtu matr. 1363 Tórshavn | 13506 |
| 275/16 | 16/03729-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 8. november 2016 fyri Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadal, Norðradal og Koltur | 13507 |
| 276/16 | 16/03730-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Argir til býráðsvalið 8. november 2016 | 13508 |
| 277/16 | 16/03728-1 | Val av valnevnd til býráðsvalið 8. november 2016 | 13509 |
| 278/16 | 16/03731-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 8. november 2016 | 13510 |
| 279/16 | 16/03732-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kollafjørð til býráðsvalið 8. november 2016 | 13511 |
| 280/16 | 16/03733-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 8. november 2016 | 13512 |
| 281/16 | 16/03734-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Hest til býráðsvalið 8. november 2016 | 13513 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 282/16 | 16/03735-1 | Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Nólsoy til býráðsvalið 8. november 2016 | 13514 |
| 283/16 | 16/03393-1 | Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2016 | 13515 |
| 284/16 | 16/01873-1 | Fíggjarætlan 2017 | 13516 |
| 285/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 13524 |

## ***242/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 125/16 | 16/00042-1 |
| 6 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 159/16 | 16/00042-1 |
| 7 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 200/16 | 16/00042-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 242/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið til eftirtektar.

# 243/16 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.*<br><br>*Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |

| | | |
|---|---|---|
| | Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

[1] Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá "ad hoc"- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið $m^2$:**
4. hædd 170 $m^2$ - av hesum: 14 $m^2$ skrivstovur - 40 $m^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 $m^2$ - av hesum: 49 $m^2$ skrivstovur (38 $m^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 $m^2$ bókagoymsla
2. hædd 466 $m^2$ - av hesum: 43 $m^2$ skrivstovur - 14 $m^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 $m^2$ - av hesum: 100 $m^2$ lesistova

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

0. hædd uml. 20 m$^2$.
Tils. 1.161 m$^2$ - av hesum: 106 m$^2$ skrivstovur - 69 m$^2$ bókagoymsla - 100 m$^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**
Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.
- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 244/16 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 86/14 | 14/02822-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 211/14 | 14/02822-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 220/14 | 14/02822-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 229/14 | 14/02822-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 325/14 | 14/02822-1 |
| 6 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 246/14 | 14/02822-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 21/15 | 14/02822-1 |
| 8 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 7/15 | 14/02822-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 55/15 | 14/02822-1 |
| 10 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 75/15 | 14/02822-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 157/15 | 14/02822-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 06.10.2015 | 189/15 | 14/02822-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 66/16 | 14/02822-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 91/16 | 14/02822-1 |
| 15 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 128/16 | 14/02822-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 189/16 | 14/02822-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 253/16 | 14/02822-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 315/16 | 14/02822-1 |
| 19 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 244/16 | 14/02822-1 |

**Málslýsing:**
Tilfar kemur til fundin.

Mentamálanevndin 7. mai 2014: **Útsett.**

Mentamálanevndin 20. oktober 2014: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Eitt gott útiøki i skúlunum hevur stóran týdning fyri menning og trivnað hjá næmingunum. Í mai 2014 varð gjørd ein støðu- og tørvslýsing av útiøkjum hjá nøkrum av skúlunum í kommununi. Sambært henni er tørvar á umvælingum, útgerð og nýgerð í skúlagørðum í Tórshavnar kommunu.

Mentamálanevndin hevur samtykt ein yvirskipaðan skúlapolitikk (mál 2007-0504/4). Har stendur um útiøkið: “Uttanduraøkini og skúlagarðurin skulu verða kveikjandi og mennandi við tí í hyggju at stimbra samspælið við skúlans undirvísingarvirksemi.” Í yvirskipaða skúlapolitikkinum verður eisini nevnt, at umstøðurnar til sosiala samveru skulu vera góðar.

Útiøkini í skúlum eiga at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm. Tað er umráðandi, at útiøki er stimbrandi fyri næmingin, gevur honum avbjóðingar og stuðlar honum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsu hjá tí einstaka.

Við støði í støðu- og tørvslýsingini hevur umsitingin gjørt uppskot til arbeiðsætlan fyri komandi árini, og hvat hetta er mett at kosta.

| | 2015 | 2016 | 2017 | |
|---|---|---|---|---|
| Skúlin á Argjahamri | 1.100.000 | | 400.000 | |
| Venjingarskúlin | 300.000 | | | |
| Sankta Frans skúli | 100.000 | | | |
| Eysturskúlin | | 500.000 | 300.000 | |
| Velbastaðar skúli | | 500.000 | 50.000 | |
| Hoyvíkar skúli | | 250.000 | | |
| | | | | |
| Tilsamans | **1.500.000** | **1.250.000** | **750.000** | **3.500.000** |

**Skúlin á Argjahamri**
Parturin av útiøkinum hjá Skúlanum á Argjahamri, sum er gjørt, er gott, men ov lítið til so nógvar næmingar.

Eitt uppskot er gjørt at gera garðin garðsbúnan, og gera økið klárt til, at ymisk spæliamboð t.d. til at klintra í kunnu setast upp. Uppskotið, sum er frá Hjálpirót, er lagt fram á skúlastýrisfundi og fundi í námsfrøðiliga ráðnum.

Sambært uppskotinum skulu ymsu útiøkini bindast saman við gøtuskipan, soleiðis at sambandið millum skúlan og fríøkið verður betri. Tað skal eisini plantast í økið fyri at skapa lívd og fríðka um, men neyðugt er at velja harðbalnar plantur, tí økið liggur høgt og har er opið fyri.

Eyka moldlag skal leggjast á skráarnar, so plantast kann í teir. Ymsu økini verða gjørd til spælipláss.

Kostnaðarmetingin arbeiðið og útgerð er 1.440.000 kr. Henda kann spjaðast yvir tvey ár, t.d. 2015 og 2017.

**Venjingarskúlin**
Útiøkið hjá Venjingarskúlanum er bert og ikki nóg væl egnað til uttanduravirksemi.

Skúlastýrið í Venjingarskúlanum hevur i umsókn dagfest 2. desember 2013 biðið um játtan til útiøkið. Námsfrøðiliga ráðið í Venjingarskúlanum hevur eisini havt evnið á skrá og viðgjørt støðuna við útiøkinum nakrar ferðir. Skúlin er í ferð við at gera eina miðvísa ætlan, sum skal økja um trivnað og rørslu hjá næmingunum. Ikki minst í hesum sambandi er umráðandi, at umstøðurnar uttandura eru góðar og mennandi fyri næmingarnar.

Foreldraumboðini og starvsfólkaumboðið í skúlastýrinum meta ætlanina hjá leiðsluni og námsfrøðiliga ráðnum í Venjingarskúlanum vera eitt sera gott átak, og heita tí á Tórshavnar kommunu at veita Venjingarskúlanum eina eykajáttan á 300.000 kr., sum skal brúkast til at menna útiøkið.

**Sankta Frans skúli**
Í august 2011 varð nýggi smábarnaskúlin tikin í nýtslu. Skúlagarðurin var tá illa farin av maskinum, sum vórðu brúktar í sambandi við útgrevsturin. Sostatt eigur garðurin at verða asfalteraður. Asfaltið i niðara garðinum er farið í støðum, so hann treingir til ábøtur.

Kostnaðarmeting fyri at asfaltera ovara skúlagarð og gera ábøtur á garðin er 100.000 kr.

**Eysturskúlin**
Vestanfyri Eysturskúlan við a-lonina er sokallaða grøna økið. Einki er gjørt við hetta økið, tað er ikki drenað og eingin girðing er. Hurðar eru í øllum stovunum í a-lonini út í grøna økið. Ein gøta er fram við skúlanum millum Tórgarðsgøtu og Djóna í Geil gøtu.

Í 2006 var eitt uppskot gjørt fyri grøna økið, kostnaðrmetetingin er 1.000.000 kr. Verður uppskotið sett í verk, kann økið nýtast til skúlagarð og til undirvísing, tað ber til t.d. væl til at brúka í lærugreinum sum náttúru og tøkni, lívfrøði og heimstaðarlæru.

**Velbastaðar skúli**
Skúlagarðurin hjá Velbastaðar skúla verður mest brúktur til bóltspæl, og tá bóltspæl er í garðinum, ber illa til at annað virksemi er eisini. Skúlastýrið hevur saman við skúlanum víst á, at neyðugt er at býta skúlagarðin sundur fyri at skapa møguleika fyri fjølbroyttum virksemi í økinum.

Eitt uppskot frá skúlastýrinum og skúlanum er, at uml. helvtin av garðinum verður sparkivøllur við graslíki. Eingin sparkivøllur er á Velbastað, so ein sparkivøllur í skúlagarðinum verður óivað nógv brúktur – eisini eftir skúlatíð.

Kostnaðarmetingin er uml. 500.000 kr.

**Hoyvíkar skúli**
Útiøkini hjá Hoyvíkar skúla eru bygd upp soleiðis, at tey skapa umstøður fyri fjølbroytni, soleiðis at næmingar kunnu fáa hóskandi avbjóðingar í fríløtum, og tað ber eisini til at brúka partar av útiøkinum í undirvísing. Men har manglar útgerð.

Næmingar í Hoyvíkar skúla høvdu á vári 2014 evnisviku um trivnað, og í tí sambandinum hava næmingarnir fingið spurnarblað við heim um, hvussu teir trívast. Niðurstøðan er, at trivnaðurin er góður, men tey ynskja sær útgerð í skúlagarðin.

Mælt verður til at játta 250.000 kr. til útgerð til skúlagarðin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsipiella viðgerð.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at kanna møguleikar fyri fígging, at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fígging kr. 1,5 mió fyri árið 2015 sum fyrsta stig samsvarandi yvirltinum omanfyri. Mett verður skilabest at skipa játtanina sum rakstrarjáttan, sum mentamáladeildin umsitur samsvarandi teirri raðfesting, ið mentamálanevndin ger.

Uppskot til fígging: kr. 1 mió av íløgukontu 5775 L57016 Golfvøllur, og kr. 0,5 mió av stuðulskontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við uppskoti til fígging og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Málið um raðfesting av arbeiðum verður viðgjørt seinni.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við mentamalanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Marin Katrinu Frýdal, um heldur enn at játtað 1. mió av íløgukonto Golfvøllur, at játta arbeiði av íløgujáttan Fótbóltsvøllurin í Hoyvík.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Jákup Dam um, at allir skúlarnir í kommununi skulu takast við í raðfestingina, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

## Ískoyti:

Mentamálanevndin samtykti 8. januar 2014 at heita á umsitingina um at gera eina støðu- og tørvslýsing íroknað kostnaðarmeting av útiøkjum hjá í fyrsta umfari skúlanum á Argjahamri, Eysturskúlanum, Venjingarskúlanum og Hoyvíkar skúla. Umsitingin tók seinni Velbastaðar skúla uppí hesa lýsing eins og garðin hjá smábarnaskúlanum hjá Sankta Frans skúla.

Nólsoy, Kollafjarðar skúli, Sankta Frans skúli, Kaldbaks skúli og skúlin við Løgmannabreyt eru ikki fevndir av lýsingini. Ynskið er sett fram um, at tørvslýsingin fevnir um allar skúlar, og at raðfest verður við støði í tí.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at víðka gjørdu tørvslýsingina av útiøkjum til at fevna um allar skúlar at leggja aftur fyri nevndina á fundinum í mars 2015.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Annars verður víst til samtykt í mentamálanevndini frá 14. november 2007 (j.nr. 2007-0504) um útiøkir og skúlagarðar.

**Ískoyti:**
Tilfar við myndum av útiøkjum hjá skúlunum verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at gera grøna økið við Tórgarðsgøtu (a-lonin í Eysturskúlanum), serliga at drena og fríðka um økið og gera umstøður til spæl og undirvísing, kr. 750.000, og fyri hinar kr. 750.000 at fríðka um økini á øllum skúlunum at stimbra um spæl og onnur námsfrøðilig endamál.

**Ískoyti:**
Skúlaleiðararnir í Tórshavnar kommunu eru á fundinum við skúlastjórar í apríl kunnaðir um samtyktina í mentamálanevndini 4. mars 2015.

Umsitingin hevur viðgjørt samtyktina hjá mentamálanevndini og er komin til ta niðurstøðu, at arbeiðsbólkur eigur at verða settur. Hesin bólkur skal ráðgeva og raðfesta, hvussu upphæddin á 750.000 kr., sum eru eftir á játtanini til útiøkini, verður nýtt. Haraftrat skal bólkurin gera uppskot um neyvari ætlan fyri dagføring av útiøkjunum nú og nøkur ár fram. Bólkurin skal leggja dent á, at útiøkini í skúlunum umframt at elva til spæl og rørslu eru eitt gott námsfrøðiligt uttandura læringsrúm.

Mælt verður til, at bólkurin verður mannaður við einum umboði fyri býarskipanardeildina, einum umboði fyri mentamáladeildina og einum umboði fyri skúlarnar. Aftrat hesum eigur at verða heitt á skúlarnar at velja eitt umboð fyri hvønn skúla, sum bólkurin kann venda sær til við ítøkiligum málum viðvíkjandi einstøku skúlunum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at settur verður arbeiðsbólkur at raðfesta játtanina til útiøkini hjá skúlum og gera ætlan fyri dagføring av teimum.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla eisini til, at bólkurin verður mannaður við einum umboði fyri býarskipanardeildina, einum umboði fyri mentamáladeildina og einum umboði fyri skúlarnar.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Nevndin tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at bólkurin verður mannaður við einum umboði fyri mentamáladeildina, einum umboði fyri

býarskipanardeildina, og einum við viðkomandi námsfrøðiligum førleikum. Nevndin leggur harumframt áherðslu á, at samtyktin frá 4. mars 2015 verður útint.

## Ískoyti

3. flokkarnir í Venjingarskúlanum/Tórshavnar Kommunuskúla flyta í Heimara skúla skúlaárið 2015/2016.

Umstøðurnar inni í Heimara skúla eru góðar, men útiøkið er ein asfalteraður skúlagarður. Í garðinum eru nøkur borð og benkur. Tørvur er ábótum til spæl og trivnað, og skúlin hevur sett fram ynski um, at garðurin verður dagførdur. Tørvur er á útgerð, sum bjóðar til ymsa rørslu og til felagsspøl.

Játtanin á 1.500.000 kr. til útiøkini í skúlum er á kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum. Av henni eru 750.000 kr. játtaðar til grøna økið í Eysturskúlanum.

Kostnaðarmeting til útgerð til garðin í Heimara skúla er 80.000 kr.

## Tilmæli

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 80.000 kr. av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til skúlagarðin í Heimara skúla.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Ískoyti**

Arbeiðið at gera grøna økið við Eysturskúlan varð boðið út 1. september 2015, og tvær fyritøkur fingu í boði at geva undirhondsboð. Freistin at lata tilboð inn var mánadagin 14. september kl. 13.00.

Tilboðini:

| | |
|---|---|
| Sp/f Maskinkoyring | 835.050,00 kr.u.mvg. |
| Sp/f við Sjógv | 987.200,00 kr.u.mvg. |

Sp/f Maskinkoyring hevur sostatt tað lægra tilboðið.

Ætlanin er at taka av lægra tilboðnum, sum er 887.241,00 kr. v.mvg. Men aftrat hesum útreiðslum eru útreiðslur til eykaveitingar fakeftirlit og til byggiharraumsiting, og kostnaðarmetingin fyri tær er 108.976 kr. Samlaði kostnaðurin við mvg er sostatt 996.216 kr.

4. mars 2015 samtykti mentamálanevndin at játta 750.000 kr. til at gera grøna økið við Tórgarðsgøtu. Um økið verður gjørt eftir ætlanini vanta sostatt 246.216 kr. í.

**Tilmæli**

Mentamálaleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 246.216 kr. aftrat til at gera grøna økið við Eysturskúlan av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Grøna økið við Eysturskúlan verður gjørt nú. Har verður neyðugt at brekka, so møguliga verður arbeiðið nakað dýrari enn tær 996.216 kr., sum eru játtaðar til hetta arbeiðið.

80.000 kr. vórðu játtaðar til skúlagarðin í Heimara skúla, og tað arbeiðið er gjørt.

Í 2015 er 1.500.000 kr. og í 2016 er 1.000.000 kr. sett av til skúlagarðar. Sostatt eru 1.423.784 kr. eftir av hesi játtan.

*Uppskot um raðfesting av útiøkjunum er hendan:*
Í 2016 Skúlin á Fløtum ( eindin á Frælsinum) 75.000 kr. til útgerð til yngri næmingar.

Í 2016 Skúlin á Argjahamri 750.000, so farast kann undir at gera økið klárt til víðkan av skúlagarðinum, síðani játtan í tvey ár at gera arbeiðið liðugt og til útgerð.

Í 2016 Sankta Frans skúli 300.000kr., so farast kann undir nútímansgerð av skúlagarðinum.

Í 2016 Kollafjarðar skúli 300.000 kr., so farast kann undir nútímansgerð av skúlagarðinum. Haraftrat játtan í 2017 at gera arbeiðið liðugt.

Í 2017 Skúlin á Argjahamri til framhald av arbeiðinum.

Í 2017 Sankta Frans skúli til at gera arbeiðið liðugt

Í 2017 Kollafjarðar skúli til at gera arbeiðið liðugt

Í 2017 Hoyvíkar skúla til útgerð í skúlagarðin

Í 2017 Nólsoyar skúla til at asfaltera skúlagarðin og smávegis ábøtur.

Í 2018 Skúlin á Argjahamri at gera arbeiðið í skúlagarðinum liðugt.

Í 2018 Velbastaðar skúli til skráar og útgerð.

Í 2018 Kaldbaks skúli til plantur og útgerð.

Í 2018 Skúlin við Løgmannabreyt gera øki til næmingar í hádeild.

Ætlanin er at leggja uppskotið til raðfesting fyri skúlastórarnar á næsta fundi við teir, og síðani skriva tilmæli til mentamáladeildina.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin og trivnaðarstjórin mæla mentamálanevndini til at umrøða raðfestingina við atliti til, at umsitingin ger endaligt tilmæli.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum fyri 2016.**

**Ískoyti:**
Á fundi við skúlaleiðarar 10. mars 2016 varð raðfestingin løgd fram, og skúlaleiðarar høvdu ikki viðmerkingar.

Raðfestingin í 2016 er:

| | |
|---|---|
| Skúlin á Fløtum | 75.000 |
| Skúlin á Argjahamri | 750.000 |
| Sankta Frans skúli | 300.000 |
| Kollafjarðar skúli | 300.000 |
| | 1.425.000 |

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin og trivnaðarstjórin mæla mentamálanevndini til at játta 1.425.000 kr. av kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum til útiøkini hjá nevndu skúlum.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt verða játtaðar kr. 250.000,00 av løgujáttan konta 4175 til Hoyvíkar skúla at nýta til útiøkið, og beina henda partin av samtyktini í býráðið um fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Á fundinum í apríl varð samtykt at játta 250.000 kr. til útiøkið í Hoyvíkar skúla av íløgujáttan til Hoyvíkar skúla. Sostatt skal játtanin flytast av íløgu til rakstur, og tað krevur tvær býráðsviðgerðir.

Tað ber til at játta 200.000 kr. til útiøkið av minninýtslu á grein 4 í 2015 soleiðis:

| | |
|---|---|
| 4124 Frískúlin í Havn | 70.000 kr. |
| 4142 Aðrar útreiðslur | 40.000 kr. |
| 4144 skúlabarnaflutningur | 90.000 kr. |
| **Tilsamans** | **200.000 kr.** |

Flytingarnar kunnu gerast sum partur av framflytingum í sambandi við roknskapin 2015.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at broyta samtyktina soleiðis, at játtaðar verða kr. 200.000 av rakstri til kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum sum omanfyri lýst, til útiøkið hjá Hoyvíkar skúla.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Játtaðar eru 750.000 kr. til útiøkið hjá Skúlanum á Argjahamri. Í 2014 setti skúlin seg í samband við Sp/f Hjálpirót og bað um uppskot til skúlagarð. Ætlanin er at brúka hetta uppskot, nú játtan er tøk til at gera ein part av útiøkinum.

Sambært innkeyps- og útboðspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu skal verða biðið um tilboð frá í minsta lagi tveimum veitarum fyri arbeiði, har kostnaðurin er millum 50.000 kr. og 800.000 kr.

Sp/f Hjálpirót kennir uppskotið, og biðið verður í hesum føri um loyvi at víkja frá reglunum og taka upp samráðingar við Sp/f Hjálpirót og gera sáttmála, soleiðis at fyritøkan kann halda fram við ráðgeving og taka sær av arbeiðinum. Fyritøkan kennir uppskotið og kann væntandi fara í gongd við arbeiðið beinanveg.

Nú høllin í Skúlanum á Argjahamri verður útbygd er møguleiki at seta aðra verkætlan í gongd samstundis, og soleiðis órógva skúlagongdina sum minst.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loyva umsitingini at taka upp samráðingar við Sp/f Hjálpirót og gera sáttmála við fyritøkuna um gera ein part av útiøkinum hjá Skúlanum á Argjahamri.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Grøna økið við Eysturskúlan er liðugt. Játtanin til arbeiðið var 996.216,00 kr. umframt 56.780,00 kr. av fríðkan av kommununi.

| | |
|---|---|
| Játtað 996.216,00 + 56.780,00 av fríðkan av kommununi | 1.052.996,00 kr. |
| Útreiðslur | 1.042.439,90 kr. |
| Avlop | 10.556,10 kr. |

Girðingin millum skúlastovurnar er ikki málað. Metti kostnaðurin fyri tað er 10.000 kr. Talan er um imprægneraðan við, sostatt er best at bíða við at mála girðingina til næsta ár.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at loka verkætlanina og at avlopið verður á kontu 4140 Ætlanir á skúlaøkinum

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 245/16 Nýggj spælipláss til børn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 23/14 | 14/01046-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 197/14 | 14/01046-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 186/14 | 14/01046-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 10.09.2014 | 231/14 | 14/01046-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 55/14 | 14/01046-4 |
| 6 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 329/14 | 14/01046-4 |
| 7 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 2/15 | 14/01046-4 |
| 8 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 240/14 | 14/01046-4 |
| 9 Mentamálanevndin | 14.01.2015 | 5/15 | 14/01046-4 |
| 10 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 25/15 | 14/01046-4 |
| 11 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 100/15 | 14/01046-4 |
| 12 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 91/15 | 14/01046-4 |
| 13 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 73/15 | 14/01046-4 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.05.2015 | 123/15 | 14/01046-4 |
| 15 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 130/15 | 14/01046-4 |
| 16 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 100/15 | 14/01046-4 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 214/16 | 14/01046-4 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 313/16 | 14/01046-4 |
| 19 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 245/16 | 14/01046-4 |

**Málslýsing:**
**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at heita á teknisku nevnd um at fyrireika 4 nýggj spælipláss til børn í Tórshavn.

**Ískoyti:**
9. juli 2012 teldupostur frá Innspark við tilboð um at veita smá spælipláss at seta saman við útifimi-tólunum á Glaðsheyggi, í Viðarlundini í Grið og í Nólsoy.

Tilboðini fevna um fýra ymisk tól miðalprísur er 116.330 kr/stk. við mvg, tilrigging, útgraving og planering. Serligt fallundirlag er ikki við í prísinum.

Um hesi spælipláss skula raðfestast í verandi fíggjarári 2013, krevur tað umraðfesting av ætlaðum arbeiðum á rakstrarkonto 6210.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til eitt spælipláss í Grasagarði fyri kr. 300 – 400 túsund av konto 6210.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Mentamálanevndin heitir enn einaferð á teknisku nevnd um at fyrireika spælipláss til børn í Tórshavn og at miðjað verður eftir, at tey verða klár at taka í nýtslu í summar.

- Forkvinnan ynskir umrøtt, hvussu spælipláss í miðbýnum kunnu verða skipað í mun til námsfrøðiliga, tað estetiska og undirhaldsvirðið í spæliplásspolitikkinum og møguleikan, at spæliplássini eru mannaði á onkran hátt við fólki við førleikum.

**Ískoyti:**

Vísandi til fleiri áheitanir og til ítøkiliga umsókn frá 2008 um at skipa eitt spælipláss í miðbýnum, verður við hesum sent nevndum til viðgerðar, at skipa eitt størri spælipláss í miðbýnum.

Eitt spælipláss við dagligari fastari manning. Eitt pláss undir eftirliti, ið kann læsast um náttina.

Málið hevur verið frammi á býarskipanardeildini, og okkurt uppskot um skipan er komið uttanífrá, sum tó ikki verður mett egna í verandi líki.

Býarskipanardeildin er biðin um at fáa til vega uppskot at bjóða út og avsettar eru 850.000 kr. á íløgum FÆ2014, til Spælipláss í miðbýnum.

Grasagarður millum Steinatún og Kongagøtu verður mett áhugavert øki mitt í býnum. Uml. 2.200 m² til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335,337,338. Á matriklunum eru skúlatannlæknastovan og "Tilhaldið" . Savningarstaður hjá teimum eldru í býnum. Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar, við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum. Seinnu árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar, grótgarðar lækkaðir, og verður økið nú nýtt til uppihald, gjøgnumgongd og ymisk tiltøk, barnafagnað, brúðarvígslu, topp-popp konsertir Hátíðarhald fyri pisum á Føroya Handilsskúla, er vorðið ein fastur árligur táttur í juni. Umframt at økið verður brúkt til ótálmaðan drykkjuskap, graffiti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir.

Á økinum eru stór gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur, staudir og grasvøllir. Í miðbýnum er av bestu vakstarmøguleikum og hartil veðurgott.

Størstu amparnir eru larmur frá ferðsluni í Steinatúni, manglandi drening av grasvøllunum og ólevnaður.

Býarskipanardeildin mælir til at staðseta spæliplássið "GRASAGARÐUR" á nevndu matriklar, at byggja umsitingarhús við WC, skipa økið til spæl, ísbreyt um veturin, ítriv og uppihald. At økið er mannað við fakfólki, pedagogum og serfrøðingum innan motorikk hjá børnum. At økið verður girt inni og upplatingartíðirnar eru 07.00 - 22.00 á sumri og 10.00 – 20.00 á vetri. At játta kr. 850.000 kr. av FÆ2014 til projektering, drening, aðra fyrireiking og serkøna hjálp.

Harumframt verður mælt til at raðfesta fasta upphædd á fíggjarætlan komandi árini til rakstur og viðlíkahald kr. 400.000 av hesum nýggja rakstrarstaðnum, og 500.000 kr. árliga í nøkru ár til framhaldandi útbygging.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mælir nevndini til at samtykkja omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at staðseta spæliplássið "GRASAGARÐUR" á nevndu matriklar, at gera uppskot um bygging av umsitingarhúsi við WC, skipa økið til spæl, ítriv og uppihald at leggja fyri nevndina aftur, og at játta kr. 850.000 av FÆ2014 til projektering, drening og aðra fyrireiking. Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar nevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyri standandi samtyktir, so hava fundir verið innanhýsis um, at skipa økið til spæl og ítriv hjá børnum út frá teimum nýggjastu pedagokisku prinsippunum, ið stuðla undir menning og motorikk hjá børnum. Ì hesum hevur deildin leita sær ráð hjá serfrøðingum á deildini børn og ung. Ásannandi tað, at lata børnini spæla sjálvi í frið í tryggum og mennandi umhvørvi, og  at tey vaksnu blanda seg sum minst uppí. Á tann hátt lata sansirnar kveikjast og vekjast og motorikkin mennast.

Nakað av forarbeiði er gjørt, t.d. økið er býtt upp í partar hvørt við sínum eyðkennum, fyrimunum og vansum.

Fyri at skipa økini til spæl, sum omanfyri er ætlað, er neyðugt við umfatandi drenings- og lendisarbeiði.

Nú er vend at vera komin í, og ynski er um at gera eitt «klassiskt» spæliøki við spælitólum.

Eitt uppskot er komið inn frá veitaranum sp/f INNSPARK,  áljóðandi umleið 1 mill. kr. Mett verður at arbeiðið eigur at bjóðast út til fleiri veitarar, tá tað kemur hartil.

Víst verður til júst samtykta innkeyps- og útboðspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu, «Yvirskipaða endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum er, at peningur skattgjaldarans verður nýttur so effektivt sum gjørligt, og at innkeyp og útboð í Tórshavnar Kommunu fer fram eftir meginreglum, sum tryggja effektivitet, gjøgnumskygni og eins viðferð av veitarum.»

Fyri at kunna skipa nøkur øki er neyðugt at vita meira ítøkiliga hvør málsetningurin er,
Og undir hesum at vita um:

1. Skal økið fevna um allan tann gamla urtagarðin, ella bert ein part. Valt verður at fevna um tvey øki, báðar verandi grasplenurnar
2. Skal pavilliongin takast niðu? Nei, tí hon kann helst brúkast at festa klatrinet á.
3. Skal trappa gerast uppá Kongagøtu. Nei, tí ætlanin við kommunuskúlanum er ikki greið enn.
4. Skal økið samskipast við framtíðar virksemi í kommunuskúlanum. Nei, tað verður at bíða til seinni, sí omanfyri
5. Skula gøturnar festast.. asfalt ella flísar. Ja, asfalt er helst tað ódýrasta.

Bindingar eru:

- Serstaka byggisamtyktin nr. 12 um at økið B. Skal skipast sum almennur urtagarður. Spurningur um samstyktin skal broytast. Mett verður at garðurin framvegis kann metast sum ein «urtagarður».
- Miðbýarætlanin og tann ætlaða skipanin av ferðsluni í økinum. Kemur at ávirka ferðslumynstrið nakað. Verður lagað til tað, tá tað er greitt.
- Drening av øki, vatntrupulleikar at loysa, tí nógv vatn rennur oman gjøgnum garðin, tá tað regnar.
- Burturgrevstur av verandi tilfari, mold v.m. og tilkoyring av nýggjum stabilum tilfari.
- Stóru trøini skugga nógv um summari, har má skerast niður og tað skal vera við skili.
- Logistikkur tá arbeitt verður, Kongagøta ella Steinatún, kranar, lastbilar, sperring av ferðslu, skúlagarðurin í Kongagøtu, v.m.

- Játtanin er bert 850.000 kr.

Uppskot til leist:

- Valt er at grava moldina burtur av verandi grasplenum, uml. 400 $m^2$ byggja tær uppaftur við stabilum tilfari og sandi uml. 250.000 kr.
- Drening av økinum og legging av brunnum og rørum uml. 100 m og 5 brunnar 100.000 kr.
- At bjóða veiting av spælitólum út til tveir veitarar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka undir við uppskotinum og at beina málið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til býráðið, og at játta 850.000 kr. av fíggjarkarminum til spælipláss.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt við teiri viðmerking, at bjóða út til fleiri veitarar.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Nevndin ynskir at beina málið í mentamálanevndina, áðrenn arbeiðið verður boðið út.

**Mentamálanevndin 14. januar 2015:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd, vísandi til samtyktina í mentamálanevndini 10. apríl 2013.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**

- Samtykt er at skipa grasplenurnar í Grasagarði til spæliøki hjá børnum. Valt er at grava flag og mold av teimum stóru grasplenunum, drena og byggja tær uppaftur við stabilum tilfari. Skráar á grasplenu skulu skipast við timbursititrappu.
- At skipa hesi bæði økini við spæliútgerð og góðum fallundirlag. Verkætlanin fevnir um jørð- og timburarbeiði, dren- og vatnavveiting, útvegan og uppseting av ljósútgerð og útvegan og uppseting av spæliútgerð, klatrinet, trampolinir v.m. og fallundirlag.
- Økið liggur mitt í býnum og verður brúkt til gjøgnumgongd.
- Valt er at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøka/heildarútbjóðing.
- Samtykta ætlanin er broytt nakað. Fallundirlagið skal vera gummifallundirlag, av somu dygd sum er lagt í nógvum barnagørðum. Umframt at skráar og hæddarmunir skulu gerast sum timbursititrappur. Trin, h 30 x b 60 cm.

| | |
|---|---|
| • Kostnaður tilsamans | 1.420.000 |
| • 6,25% mvg | 88.750 |
| • Mett fíggjarlig binding tilsamans | 1.508.750 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku/totalentreprisu sum undirhondsboð. Fíggjað við 850.000 kr. av løgukarminum til spælipláss, og at søkt verður um írestandi kr. 658.750 av løgukarminum konto 6275, Fríðkan av býnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð boðið út í undirhondstilboð sum ein heildarveiting/totalentreprisa. Tvinni feløg vórðu boðin at luttaka. Fundur var í Grasagarði 10. apríl 2015. Lisitatión var hildin 17. apríl 2015 kl. 13:00, og komu tvey boð inn.

Sp/f við Sjógv og P/F Maskinkoyring vórðu boðin at bjóða. Tvey feløg av nøkur lunda somu stødd. Bæði sera vælgjørd og við nógvum royndum. Stóra takið í uppgávuni var at loysa grevsturuppgávuna, tí tað er sera trongligt í Grasagarði, og nógvir kaðalar at ansa eftir, umframt verandi vøkstur við stóru trøunum.

Heildarveiting varð vald, tí uppgávan hevur fleiri møguligar loysnir. Logistikkur, atkoma, drenarbeiði, træskering, útvegan, veiting og uppsetan av spæliútbúnaði eru nakrar av avbjóðingunum at loysa.

Innkomnu boðini uttan mvg.

| | |
|---|---|
| P/F Maskinkoyring | 1.870.750,00 |
| Sp/f við Sjógv | 1.794.060,00 |

Boðini eru tøtt, 76.690 kr. á muni, men tey eru bæði um 300.000 kr. størri enn játtanin áljóðandi kr. 1.508.750. Avgjørt varð at taka upp samráðingar við Sp/f við Sjógv.

Ymiskar smáar broytingar hava fingið lagað boðið hjá teimum niður til kr. 1.421.690. Broytingar eru í ætlaðu sititrappunum, aðrari loysn av spælilútgerð, ymiskum veitingum av tilfari v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av boðnum hjá Sp/f við Sjógv.

**Samtykt um teldupost 12. mai 2015:** Málið varð sent við telduposti 12. mai 2015, har heitt varð á býráðslimir um at taka støðu til málið, so arbeiðið kann byrja sum skjótast, so tað verður liðugt og økið ruddað til ólavsøku.

Málið varð um teldupost samtykt við 10 atkvøðum fyri: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Bjørghild Djurhuus, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Boði Andreassen, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein.

Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal mettu ikki, at rætt var at avgreiða málið um teldupost.

Jákup Dam svaraði ikki teldupostinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mai 2015:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein og Helena D. á Neystabø, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddi: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L62024 Spælipláss í Grasagarði er liðug og skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest ein meirnýtsla uppá kr. 2.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at meirnýtslan verður fíggjað av íløgukarminum til Fríðkan av býnum, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 246/16 Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 135/16 | 16/01585-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 13.04.2016 | 23/16 | 16/01585-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 183/16 | 16/01585-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 130/16 | 16/01585-1 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 161/16 | 16/01585-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 292/16 | 16/01585-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 311/16 | 16/01585-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 246/16 | 16/01585-1 |

**Málslýsing:**
Samlaða nettojáttanin til alla heilsu- og umsorganartænastuna – konta 2720 heilsuhúsið, konta 2721 røktartænastur, konta 2722 tilboð, konta 2730 fyrisiting, konta 2731 gjøld fyri røktartænastur, konta 2750 ansingarsamsýning, og konta 2761 leiga – er í 2016 kr. 140,5 mió.

Sama nettojáttan fyri 2015 var kr. 141,1 mió. Sambært roknskapinum fyri 2015 varð meirnýtslan á hesum kontum samlað kr. 9,4 mió, sí eisini niðanfyri.

Samlaða nettojáttanin til eldraøkið í Tórshavnar kommunu í 2014 var umleið kr. 136 mió, harav umleið kr. 5 mió frá kommununi. Tá 2014 varð gjørt endaliga upp, høvdu stovnar í Tórshavnar kommunu meirnýtslu uppá kr. 5-6 mió, sum landið tá endurrindaði meginpartin av.

Tað merkir, at játtanarstøðið til eldraøkið hesi trý árini er stórt sæð tað sama.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini bæði fyri 2015 og 2016 samtykt at taka støði í teirri játtan til eldraøkið, sum landið letur kommununi samsvarandi serliga fíggingarleistinum við afturbering av frádráttum og skatti av eftirlønarinngjøldum. Í 2015 var henda játtan í fíggjarætlanini kr. 128,4 mió og í 2016 er hon sett til kr. 131,9 mió.

Harumframt er ein skiftisjáttan fyri árini 2015 og 2016. Játtanin í 2015 var kr. 8,9 mió, og í 2016 er hon kr. 4,8 mió. Í 2017 er henda skiftisjáttan burtur.

Aftrat omanfyri nevndu játtanum frá landinum er so tann upprunaliga kommunala játtanin til eldraøkið, sum áðrenn útleggingina var til rakstur á sambýlum, heimavitjanartænastu og tilhald, kr. 5,8 mió løgd aftrat. Til síðst er eisini lønarvøkstur framroknaður.

Staðfestast kann, at játtanin fyri 2015 og 2016 í upphædd er á sama støði sum í 2014. Við so at siga sama virksemi og tænastustigi á røktarheimunum og í heimatænastuni, bæði tá um tal av brúkarum og starvsfólkanormeringum annars ræður, umframt ávísum uppraðfestingum innan fyribyrging og heilsustimbran eins og visitatión, er greitt, at virksemið kann ikki rúmast innan samtykta játtanarkarmin.

**Roknskapur 2015**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri 2015:

| Konta | Heiti | Salda 12- | Játtan 2015 | Avlop kr. 12- | Avlop 12- |
|---|---|---|---|---|---|

| | | 2015 | | 2015 | 2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 31.127.000 | 29.947.000 | -1.180.000 | -4% |
| 2721 | Røktartænastur | 106.930.971 | 99.033.000 | -7.897.971 | -8% |
| 2722 | Tilboð | 21.266.334 | 18.774.000 | -2.492.334 | -13% |
| 2730 | Fyrisiting | 4.730.069 | 5.790.000 | 1.059.931 | 18% |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -16.025.589 | -15.000.000 | 1.025.589 | 7% |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 2.312.243 | 2.300.000 | -12.243 | -1% |
| 2761 | Leiga | 174.598 | 300.000 | 125.402 | 42% |
| | Tilsamans | 150.515.624 | 141.144.000 | -9.371.624 | -7% |

**Roknskapur pr. ultimo februar 2016**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri januar og februar 2016:

| Konta | Heiti | Salda 02-2016 | Játtan til 02-2016 | Nýtsla higartil 02-2016 | Játtan 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 4.781.914 | 4.699.330 | 102% | 28.196.000 |
| 2721 | Røktartænastur | 19.824.035 | 17.272.504 | 115% | 103.635.000 |
| 2722 | Tilboð | 3.217.503 | 2.707.171 | 119% | 16.243.000 |
| 2730 | Fyrisiting | 443.769 | 835.000 | 53% | 5.010.000 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -2.662.748 | -2.500.000 | 106% | -15.000.000 |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 393.820 | 400.000 | 98% | 2.400.000 |
| 2761 | Leiga | 0 | 22.000 | 0% | 132.000 |
| | Tilsamans | 25.998.294 | 23.436.005 | 111% | 140.616.000 |

| Úrslit | -2.562.289 |
|---|---|

Til tølini fyri januar og februar er at viðmerkja, at uml. kr. 900.000 er eftirlønargjøld hjá tímaløntum fyri 2015. Hesi verið goldin einaferð um árið. Harumframt hevur Gjaldstovan fráboðað, at lønarútlegg frá 2015 stórt kr. 561.000 verður at skráseta sum útreiðsla á kommunala roknskapinum fyri 2016. Hetta framgongur tó ikki enn av tølunum omanfyri.

Í fíggjarætlanini fyri 2016 er lagt upp til, at Umlættingarheimið varð niðurlagt pr. januar 2016. Fráboðað er nýggj politisk viðgerð av hesi avgerð við tí endamálið, at umlættingarheimið heldur fram við vanliga umlættingarvirkseminum sum áður. Fyri fíggjarætlanina 2016 merkir tað ein fíggjartørv á 3,6 mió kr.

Við støði í tveimum teimum fyrstu mánaðunum er samlaða framroknaða meirnýtslan fyri 2016 kr. 15,5 mió.

Ætlandi verða uml. kr. 2,2 mió av minninýtslum í 2015 (konturnar 2730 fyrisiting, 2731 gjøld fyri røktartænastur og 2761 leiga) framskrivaðar til 2016.

Samlaður mettur eykajáttanartørvur fyri 2016 er sostatt kr. 13,3 mió. Tá er ikki roknað við nøkrum broytingum í tænastum ella virksemi.

Sí eisini notat við ymiskum taltilfari fyri 2015 og 2016.

Uppraðfestingar?:
Omanfyri nevnda upphædd kr. 13,3 mió í eykajáttan fyri 2016 hevur ikki við sær nakrar beinleiðis uppraðfestingar ella betringar í tænastustøðinum ella víðkan av virksemi ella tilboðum, men er bert ein staðfesting av veruliga kostnaðinum av verandi virksemi. Afturmeldingar frá deildarleiðarum og starvsfólkum búeindunum er fatan av, at normeringin í røktini er ov lág. Gongdin er, at húsfólk verða meira og meira røktarkrevjandi. Mett verður, at umleið 2/3 av húsfólkunum hava tørv á, at tvey starvsfólk hjálpa við allari persónligari røkt.

Skuldi politiskur vilji verið til at játta t.d. eina dagvakt 40 tímar út á hvørja deild á búeindunum, heimatænastuni og terapeuttoyminum, t.e. 17 ársverk við miðal lønarkostnaði á kr. 430.000, so er samlaði kostnaðurin kr. 7,3 mió.

Í mun til eldrapolitikkin var stórur dentur lagdur á fyribyrging, heilsustimbran og rehabilitering. Heimatænastan er eisini partur av hesum. Til ber við lutfalsliga avmarkaðum upphæddum at røkka nógvum heimabúgvandi borgarum við viðkomandi tænastum og tilboðum, sum í síðsta enda eru við til at tálma tørvin á búplássi á røktarheimi.

Fíggjarstýringin:
Størsti parturin av lønarútreiðslunum er á búeindunum. Deildarleiðararnir hava við vaktplanleggingini ta desentralu ábyrgdina av fíggjarstýringini. Vaktplanskipanin er sett í gongd á flestu støðum. Í løtuni fáa deildarleiðararnir tó bert stýrt í mun til útlutaðar tímar. Skipanin manglar enn fíggjarstýringsmodulið soleiðis, at deildarleiðarin í vaktplanleggingini bæði kann stýra við tímum og játtan, tí tímarnir kosta ymiskt alt eftir lønarviðurskiftunum hjá einstaka starvsfólkinum. KT-deildin hevur tikið upp samráðingar við teir partar, ið varða av vakplanskipanini, um at fáa henda hentleika settan í verk skjótast gjørligt.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur somuleiðis tørv á fíggjarførleika sentralt. Heilsu- og umsorganartænastan umsitur stórar upphæddir og kompleksar skipanir og tænastur við støði í ymiskum umstøðum hjá nógvum einstøkum borgarum. Til tess at styrkja fíggjarstýringina í mun til fíggjarætlanina hjá heilsu- og umsorganartænastuni, eins og betri at kunna roknað kostnaðir fyri hvørja veitta tænastu v.m., verður mett neyðugt við fólki við fíggjarligum førleikum sum stuðulsfunktión hjá heilsu- og umsorganarstjóranum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 13,3 mió í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna fyri fíggjarárið 2016.

**Trivnaðarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at játta kr. 4,338.000,00 í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna, ið verður at fíggja sambært uppskoti, j.nr. 16/01585-4.

Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Komið er eftir, at møgulig søluinntøka av Dagstovninum millum Bóla kann ikki innganga í samtyktina um eykajáttan. Harumframt mælir fíggjardeildin staðiliga frá at regulera fíggingarlyklarnar á dagstovnaøkinum § 3 og á skúlaøkinum § 4 vísandi til, at hetta krevur eftirregulering og rættingar av sera stórum mongdum av data.
Samlað er talan um kr. 1.735.000, sum skulu takast úr teimum 4.338.000, ið samtyktar eru við fyrstu viðgerð. Hetta talið skal tí rættast til kr. 2.603.000.
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir samsvarandi omanfyri standandi til at samtykkja eykajáttan á kr. 2.603.000 til heilsu- og umsorganartænastuna, og at spurningurin um restfígging av eykajáttanartørvinum verður tikin uppaftur eftir summarfrítíðina.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Víst verður til lýsingina omanfyri. Sambært metingini fyri summarfrítíðina varð mett, at samlaði eykajáttanartørvurin fyri 2016 konturnar 2720, 2721, 2722, 2730, 2731, 2750 og 2761 var kr. 13,3 mió.

Samtykta eykajáttanin var í alt kr. 2.603.000 umframt kr. 8.000.000 frá meirinntøkunum fyri 2015 (j.nr. 16/01591). Tað vil siga, at uml. kr. 2,7 mió restaðu í.

Omanfyri nevnda meting varð tikin við støði í rakstrinum fyri tveir teir fyrstu mánaðirnar í 2016. Við støði í juli-roknskapinum kann staðfestast, at framskrivaða meirnýtslan fyri alt árið í mun til dagførdu fíggjarætlanina er kr. 2,3 mió.

Mett verður, at eykajáttanartørvurin fyri árið verður umleið kr. 2,5 mió. Tá er tikið støði í, at ongar broytingar verða gjørdar í virkseminum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til, at eykajáttan kr. 2,5 mio verður fingin til vega.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Sambært framrokning av septemberroknskapinum væntast eykajáttanartørvur 2016 til samlaðu konturnar hjá heilsu- og umsorganartænastuni uppá kr. 4,161 mió. Nýggir lønarsáttmálar, ið galda frá oktober 2015 at gjalda út í 2016, hava við sær nýggjan eykajáttanartørv uppá kr. 2,330.

Harumframt er samtykt braðfeingis dagtilhald til tveir persónar við demenssjúku yngri enn 67, kostnaður kr. 109.000, ið samtykt er at fíggja við eykajáttan.

Samlaður eykajáttanartørvur fyri 2016 er sostatt kr. 6,6 mió. Sí eisini fylgiskjal.

Møguleiki er at fíggja hetta av mettari minninýtslu fyrri 2016 á kontu 20301 Rentuútreiðslur og við minninýtslum.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at fíggja meirnýtsluna fyri 2016 sambært niðanfyristandandi:

| Konta | Rakstrarstað | Kr. | Viðm. |
|---|---|---|---|
| 1315 | Nevndir og ráð | 160.000 | Minninýtsla ungdómsráðið 2016 |
| | | | |
| 2775 | Íbúðardepil til eldri (frágreiðingin um røktarheimstørv) | 376.000 | Rest av L27008 skal formliga lokast |
| 2775 | Løgukarmur | 500.000 | Ónýttur løgukarmur - í íløguuppskotinum fyri 2017 kemur 1,5 mió uppáaftur til eldraíbúðarverkætlan |
| | | | |
| 2210 | Kommunulæknatænastur | 350.000 | Partur av mettari minninýtslu 2016 |
| 2617 | Brúkaragjøld, serstovnar | 700.000 | Partur av mettari minninýtslu 2016 |
| | | | |
| 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 500.000 | Tøk minninýtsla í sambandi við, at játtan at brúka kr. 750.000 uppá útiøkið í Skúlanum á Argjahamri er ikki disponerað/eingin arbeiðstøkusáttmáli gjørdur. Í fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2017 er sett 1 mió av til útiøki hjá skúlum, henda verkætlan kann tí útsetast. |
| | | | |
| 20301 | Rentuútreiðslur | 4.014.000 | Mett minninýtsla |
| - | | **6.600.000** | |

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 247/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |

### Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr.

14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.

Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:

- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at inngang avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum | - 298.955.524 kr. |

(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 248/16 Arbeiðseftirlitið : Eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund um inniklima, møguliga er blámusoppur í bygninginum matr. nr. 727et, Tórshavn (2012-0493)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.10.2014 | 219/14 | 14/02485-33 |
| 2 Býráðsfundur | 20.11.2014 | 226/14 | 14/02485-33 |
| 3 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 18/15 | 14/02485-33 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.02.2015 | 35/15 | 14/02485-33 |
| 5 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 28/15 | 14/02485-33 |
| 6 Mentamálanevndin | 20.05.2015 | 129/15 | 14/02485-33 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 139/15 | 14/02485-33 |
| 8 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 105/15 | 14/02485-33 |
| 9 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 247/16 | 14/02485-33 |
| 10 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 314/16 | 14/02485-33 |
| 11 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 248/16 | 14/02485-33 |

### Málslýsing:

Í sambandi við eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund hevur Arbeiðseftirlitið tikið loftsplátu til nærri kanningar. Kanningarúrslitið gevur ábendingar um, at bygningurin kann vera fongdur við blámusoppi. Eftirlitsvitjanin staðfesti fleiri lekar undir loftinum í bygninginum, og at blettir eru á fleiri loftsplátum. Arbeiðseftirlitið hevur í skrivi givið kommununi boð um at seta í verk støðukanning av fukti og blámusoppi í bygingingum.

Kommunan hevur biðið HMP Consult gera hesa kanning, sum væntandi bera okkum úrslitið um tríggjar vikur.

Fyri tíð síðan, tá ítøkiliga varð arbeitt við at stovnurin skuldi gerast kommunalur, varð gjørd ein støðulýsing til tess at staðfesta, hvørjum standi bygningurin var í. Heitt varð á HMP Consult at gera støðulýsingina, sum varð liðug í mars 2009. Sum avtalað hevur HMP Conslut raðfest og staðfest hvørjar ábøtur vóru átroðkandi, minni átroðkandi og ábøtur, sum mælt varð til blivu gjørdar. Hesar raðfestingar vóru kostnaðarmettar, og sum sæst niðanfyri eiga munandi ábøtur at verða gjørdar á bygningin.

Fyrsta raðfesting inniheldur í høvuðsheitum at skifta takið og alt sum har til hoyrir, eisini loftsklæðingin innanfyri. Eisini eru ábøtur á ventilatiónina við í hesum. Raðfesting 2 inniheldur útvendiga bjálving og klæðing av betongveggunum, og raðfesting 3 er millum annað at skifta hvítvørur og gera aðrar ábøtur á m.a. gólvini.

Niðanfyri er ein uppseting út frá støðulýsingini og tí, sum mett er kemur afturat.

| | |
|---|---|
| Raðfesting 1 | kr 4.683.882 |
| Raðfesting 2 | kr 445.000 |
| Raðfesting 3 | kr 475.000 |
| Samlað | kr 5.603.882 |

Hesi tøl eru uttan ókent, uttan mvg, uttan ráðgeving og eftirlit, uttan prístalsviðgerð og projektumsiting.

Verður Birkilund samanborin við Dagstovnin í Hoyvík, eru ávís viðurskifti, ið ganga aftur. Báðir stovnarnir eru tiknir í brúk í 1983 sum sjálvsognarstovnar, báðir hava havt lekar frá takinum í fleiri ár, betongútveggir eru partvís í báðir bygningunum.

Brúka vit eina samlaða kostnaðarmeting við støði í støðulýsingini frá 2009, kann hetta roknistykkið setast upp:

| | |
|---|---|
| Samlað kostnaðarmeting | kr. 5.603.882 |
| Ókent 30% | kr. 1.681.164 |
| Prístalsviðgerð | kr. 200.000 |
| Samlað | kr. 7.484.046 |
| | |
| Ráðgevara útreiðslur 12% | kr. 898.085 |
| Projektumsiting hjá TK | kr 200.000 |
| Samlað uttan mvg | kr 8.582.131 |
| Samlað við 6,25% mvg (536.383) | **kr 9.118.514** |

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
HMP Consult hevur latið kommununi omanfyri nevndu kanning við fleiri tilmælum, sum kommunan síðani hevur virkað eftir. Bráðfeingistilmæli var at tetta allar lekar í tekjuni og við vindeygabond v.m., og at gera eina høvuðsreingerð at fáa sonevndu MM-tølini niður á nøktandi støði. Harumframt at fáa luftskifti at virka optimalt. Eisini var rátt frá at nýta 3 høli.

Hetta eru tó at meta sum fyribils átøk, og sum lýst omanfyri er neyðugt við umfevnandi høvuðsumvæling. Í hesum sambandi hevur umsitingin mett rættast at steingja bygningin í summar, og at børnini fáa dagstovnapláss í øðrum hølum.

Eftir umbøn hevur HMP Consult gjørt kostnaðarmeting fyri høvuðsumvæling. Sum alternativ til hetta er eisini gjørd kostnaðarmeting av at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn í somu støđd.

Høvuðsumvæling av verandi bygningi, við nýggjari tekju, nýggjum klædningi og nýggju tekniskum installatiónum íroknað kravdar dagføringar í m.a. neyðhurðar og rýmingarleiðir er mett til kr. 20-21 mió v/mvg.

Ein niðurtøka og burturbeingin av verandi bygningi, byggja nýggjan bygning í somu støđd og nýgerð av uttanumøki er mett at kosta kr. 33-34 mió v/mvg. Tá er roknað við einum miðal fermetraprísi á kr. 20.000.

Hóast broytingar í barnatalinum, er tørvur á júst hesum stovninum. Hann er millum størstu stovnar í kommununi, og harumframt er hann einasti stovnur aftrat Lítlaskógi, sum serliga hevur eysturbýin sum upptøkuøki.

Ein høvuðsumvæling við nøkrum dagføringum av eitt nú brunaviðurskiftum, konstruktiónstrupulleikum og líknandi er fyribils mett til kr. 20-21 mió v/mvg. Ein høvuðsumvæling vil tó ikki loysa uppá fleiri minni heppin viðurskifti viðvikjandi funktiónum, hvussu góður bygningurin er fyri rørslutarnað, orkunýtslu o.ø.

Ein nýbygging er dýrari, men tá fæst ein stovnur, sum lýkur øll nútíðar krøv, eins og tað eisini gevur møguleika fyri at skipa bygningin á grundini øðrvísi, soleiðis at betri umstøður fáast á útiøkinum.

Neyðugt er tí við prinsippavgerð um, hvørt bygningurin skal høvuðsumvælast ella takast niður og nýggjur byggjast upp í staðin á sama stað. Tað er lítil ivi um, at besta framtíðartryggjaða loysnin bæði í mun til kostnað og funktiónir er at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn, sum er normeraður til nakað sama tal av børnum.

Neyðugt er eisini at gera ætlan fyri, hvussu arbeiðið skal raðfestast í mun til íløguætlanina í øllum førum frá 2013. Eingin íløgujáttan er tøk á grein 3 Børn og ung.

Í mun til at seta fígging av til at fyrireika eina verkætlan, hvørt tað so er høvuðsumvæling ella nýbygging, so kann játtast fáast til vega frá sparingini í sambandi við pedagogverkfallið konta 3215 Aðrar útreiðslur. Har eru kr. 3.673.085 tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt verður mælt til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, og at sett verður bygginevnd.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Leiðarin á húsaumsitingini kunnaði um málið. Samtykt at biðja umsitingina um eina gjølla fakliga frágreiðing um støðuna á stovninum til næsta fund.

- Frágreiðing løgd fram.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt mælir nevndin til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, at sett verður bygginevnd og at avseta pening til byggingina á fíggjarætlanini 2013 og 2014 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Trivnaðarnevndin 7. april 2014:** Samtykt at seta í verk býráðssamtyktina frá 26. juli 2012, at bjóða arkitektauppávuna út alment, at játta tøku upphæddina á íløguætlanini til endamálið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at bjóða arbeiðið at høvuðsumvæla bygningin út sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin Mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 22. mai 2014 um at bjóða út arbeiðið at høvuðsumvæla dagstovnin Birkilund. Arbeiðið varð boðið út til tveir 2 arbeiðstakarar og eitt tilboð kom inn, tað er frá Húsavarðatænastuni.

Tilboðið er eftirkannað. Mett verður, at soppatrupulleikarnir verða loystir, men eisini, at allar neyðugar veitingar eru ikki við í tilboðnum, og at týðandi dagføringar eru heldur ikki fevndar av tilboðnum. Við støði í innkomna tilboðnum, eftirkanningini av tilboðnum og seinni samráðing við tilboðsveitaran, verður nú dagført tilboð latið kommununi fyri umvælingarætlanina, sum í størri mun tryggjar, at allar veitingar eru við, og at umvælingin verður nøktandi og uppfyllir tey krøv, ið sett verða í dag, eisini í mun til orkunýtslu.

Ætlanin er at hava eina nýggja dagførda kostnaðarmeting og eina dagførda tíðarætlan klárt til fundin.

**Ískoyti (nr. 2):**
Umsitingin hevur fingið tilboðið frá Húsavarðatænastuni. Tilboðið er eftirhugt og dagført, soleiðis at allar veitingar eru við, samstundis sum stovnurin verður umvældur soleiðis, at atlit verða tikin til tey krøv, sum í dag verða sett til bjálving, el, ventilatión osv.

Tilboðið frá Húsavarðatænastuni kr. 14.481.000 uttan mvg

<u>Arbeiðið umfatar í stuttum:</u>
- Øll takkonstruktiónin, uttan sperrur, verður skift út
- Útveggir verða gjørdir av nýggjum, alt uttan stórviður
- Øll vindeygu og allar úthurðar verða nýggjar, út træ/alu
- Útveggir og tak verður bjálvað 50 mm meira enn í dag.
- Útveggur í kjallaranum verður bjálvaður uttan og pussaður
- Allir skilaveggir verða klæddir við gips
- Verandi linolium á gólvunum verður skift út við nýtt
- Allir listar verða útskiftir
- Bygningurin verður málaður uttan og innan, alt íroknað
- El-arbeiði verður gjørt soleiðis at SEV kann góðkenna bygningin eftir dagsins reglum
- Nakað av sanitet og hitainnlegging
- Nýtt ventilatiónsanlegg verður sett upp á ovaru hædd (nøkur smá anlegg)
- CTS stýring verður sett up
- Lendisarbeiði fram við bygninginum.

At rudda bygningin og at seta verandi innbúgv inn í bygningin aftur er ikki við í tilboðnum.

<u>Tíðarætlan:</u>
Arbeiðið er mett at taka 10 mánaðir. Um arbeiðið kann byrja beinanvegin, so kann alt arbeiðið verða liðugt til 1. august 2015.

Á íløguætlanini eru kr. 8,5 mió tøkar til Birkilund

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka av tilboðnum frá Húsavarðatænastuni soleiðis, at kommunan ger sáttmála fyri arbeiðið upp til kr. 14,5 mió.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta írestandi fíggjartørvin við umraðfesting av íløgum at taka upp á eykafundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Samtykt at játta írestandi fíggingina kr. 10,5 mió av íløgukarminum 2015.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at umraðfesta íløgur soleiðis, at játta 5,5 mió. kr. av konto 7175 framfluttur íløgukarmur tyrvingarpláss til dagstovnin Birkilund L31004.

**Fíggjarnevnd 30. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. oktober 2014:** Viðgjørt fyri opnum hurðum.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

Marin Katrina Frýdal tekur ikki undir við tilmælinum, og vísir til samtyktina í trivnaðarnevndini 7. apríl 2014, at byggja ein nýggjan dagstovn, tí royndirnar vísa, at kostnaðarmeting ongantíð heldur við slíkum høvuðsumvælingum.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Samtykt við aðru viðgerð við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Áðrenn byggiverkætlanin fór í gongd, varð alt verandi innbúgv í Birkilund ruddað út. Ætlanin var, at tað skuldi endurnýtast og setast innaftur í bygningin, tá hann er liðugt umvældur. Stafest er, at innbúgvið er gamalt og illa viðfarið, og meginparturin av leysum innbúgvi og køkum kann ikki nýtast aftur.

Mett verður, at køkar, KT útgerð, borð, stólar, gardinur, køksútgerð, leikur og annað leyst innbúgv kostar 2 mió uttan mvg.

Spæliplássið og garðurin uttandura er í ringum standi. Mettur kostnaður fyri niðurtøku, hampan av verandi, grevstur, veitan og ísetan av uttandura møblum og spæliútgerð er aljóðandi 500.000 kr. uttan mvg.

| | | |
|---|---|---|
| Leyst innbúgv | kr. | 2.000.000 |
| Spælipláss og garður | kr. | 500.000 |
| 6,25% mvg | kr. | 156.250 |
| | | |
| Til samans er kostnaðurin | kr. | 2.656.250 við mvg. |

Samlaða játtanin til høvuðsumvælingina er 19 mió. Lagt er ikki upp fyri útreiðslum til innbúgv og útiøkið. Mett verður neyðugt at fáa hesi keyp og arbeiði gjørd, skal stovnurin virka fullgott aftur.

Á íløgukarminum til barnaansing frá 2014 er játtan kr. 14 mió tøk. Henda er ætlað til bygging av dagstovni í Kollafirði. Tilboð er komið inn um bygging av hesum stovni. Málið verður lagt til politiska støðutakan um stutta tíð, men greitt er, at tørvur verður á meirjáttan til stovn í Kollafirði á íløgujáttanini í 2016.

Til ber at játta kr. 2,7 mió til innbúgv og útiøkið og harvið fáa Birkilund lidnan av hesum íløgukarmi, og at neyðuga restfíggingin til stovn í Kollafirði verður fingin til vega á íløguætlanini 2016.

Í mun til høvuðsumvælingina skal tann játtan, sum í íløgukarminum fyri 2013 og 2014 er sett av til Birkilund, kr. 5,55 mió, og íløgujáttanin til Birkilund í 2015, kr. 5 mió, játtast til projektið Birkilund L31004.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at játta kr. 2,7 mió av framflutta íløgukarminum til barnaansing til innbúgv, útiøkið v.m. í sambandi við høvuðsumvælingina av Birkilund. Eisini verður mælt til at játta kr. 5,55 mió, sum er avsett á karminum til Birkilund í 2013 og 2014, og kr. 5 mió., sum eru avsettar í 2015, til projekt L31004 Birkilund.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. februar 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Tilboð á part av innbúgvi til Birkilund eru innkomin. 5 tilboð komu inn, og eru tey áljóðandi uttan mvg.:

| | |
|---|---|
| Blika | 804.387,50 kr. |
| Eikin | 814.999,00 kr. |
| Nema | 881.750,00 kr. |
| Innventar tænastan | 920.285,00 kr. |
| Innspark | 1.133.400,00 kr. |

Tilboðini er gjøgnumgingin, og niðurstøða er gjørd um, at Blika hevur besta tilboðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at taka við tilboðnum hjá Blika á 804.387,50 kr. uttan mvg.

**Mentamálanevndin 20. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L51004 Birkilund er liðug og skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 107.138.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla til, at verkætlanin verður lokað, avlopið flutt á íløgukarmin til barnaansing og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 249/16 Serveringskøkur til Ítróttahøllina í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 237/16 | 16/03475-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 321/16 | 16/03475-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 249/16 | 16/03475-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | | | 16/03475-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál 14/00984 Skúla- og ítróttahøll í Kollafirði.

Á býráðsfundi 12. september 2016 var verkætlanin viðv. goymslubygningi og millumbygningi í Ítróttahøllini í Kollafirði lokað og restupphæddin á kr. 53.737,75 latin inn aftur á íløgukarmin. Samstundis var verkætlanin 14/00601 Útbygging av Hoyvíkshøllini lokað. Talan var um gerð av kantinuøkinum vm. Tann verkætlanin hevði eitt avlop á kr. 96.098,00, ið var latin aftur inn á íløgukarmin.

Fleiri hava víst á tørvin fyri einum tilreiðingarkøki ella serveringsøki í sambandi við reglulig og serlig tiltøk í høllini. Ítróttaanlegg hevur mett um tørvin og metir at ein loysn kann gerast í einum høli í veghædd tætt við inngongdina til høllina og millumgongina til skúlan. Ætlanin er at starvsfólk hjá Ítróttaanleggum skulu gera tað mesta av arbeiðinum við uppseting, umframt onkra smærri uttanhýsis veiting viðv. el og HVS. Mett verður at verkætlanin kann fremjast fyri kr. 150.000 íroknað kommunalt MVG. Veitingin av køkinum verður framd sum undirhondsboð millum 2 bjóðandi.

Ítøkiliga brúkið av serveringsøkinum fer at verða avgjørt við avtalu millum Ítróttaanlegg og feløg vm. Ansað verður eftir, at hetta virksemi ikki er kappingaravlagandi.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játtað kr. 150.000 av løgukarminum fyri 2016 til konto 5717 Ítróttaanlegg til fremjan av verkætlanini.

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 250/16 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík - "Hoyvíksvøllur"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 114/16 | 16/00407-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 163/16 | 16/00407-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 131/16 | 16/00407-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 151/16 | 16/00407-3 |
| 5 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 168/16 | 16/00407-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 218/16 | 16/00407-3 |
| 7 Mentamálanevndin | 18.08.2016 | 198/16 | 16/00407-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 23.08.2016 | 254/16 | 16/00407-3 |
| 9 Býráðsfundur | 23.08.2016 | 197/16 | 16/00407-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 285/16 | 16/00407-3 |
| 11 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 204/16 | 16/00407-3 |
| 12 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 235/16 | 16/00407-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 319/16 | 16/00407-3 |
| 14 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 250/16 | 16/00407-3 |

**Málslýsing:**
Talan er um framhald av máli nr. 14/03366 – Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík – oman gil, ið aftur er framhald av málunum nr. 14/000714 – Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík – Dalurin langi bóltvøllur (2010-0498) og máli nr. 14/01462 - Nýggjur fótbóltsvøllur í Hoyvík.

Arbeiðið við at gera fótbóltsvøllin verður ætlandi liðugt innan 2 mánaðir. Í verandi verkætlan er ikki íroknað graslíki, umframt undirlag (t.e. skerv, asfalt, sand, innfill, stoytdoyvingarlag), ið er neyðugt fyri at fáa ein vøll eftir nútíðans krøvum.

Í verandi verkætlan er ymiskt, ið ikki er íroknað verkætlanina, umframt graslíkisvøllin, eitt nú kloakkleiðingar við tilhoyrandi brunnum, el-arbeiðið, gittarmastur til vallarljós, áskoðarapláss, lendisjavning, betongtrappa, gøta og hegn, innkoyring og parkering frá Karlamagnusarbreyt, útskriftingarbenkur o.a. Tá verkætlanin er liðug verður nærri greitt hvat er eydnast at fáa við av hesum innanfyri verandi fíggjarkarm.

Tíðarætlan
Uttandura vallir og umsitingin hava saman við LBF P/F hava mett um tíðarætlan fyri at fáa lagt graslíki á í summar. Frá tí at samtykt fyriliggur vil samlaða tilgongd frá útboð til lisitatión verða umleið 4 vikur og síðani nevndarviðgerð og í býráðið umleið 3-4 vikur. Um málið verður samtykt í apríl kann vøllurin verða liðugur at taka í brúk í heyst. Sí hjálagt útbjóðingartilfar.

Mett verður at kostnaðurin fyri arbeiðið er umleið 3,6 mio.kr. alt eftir marknaðarstøðuni og kapping innan graslíkisveiting og innan tilfar og gerð av arbeiðinum. Hartil er sannlíkt at onnur liðugtger av økinum kring vøllin kann koma at kosta 2-3 mio.kr (við fyrivarni fyri nærri metingum tá verandi verkætlan er liðug í næstum – nýtt tilmæli kemur um tað tá).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at heimilað umsitingini at fara undir útbjóðing av arbeiðinum við at leggja á graslíki vm. á Hoyvíksvøll og venda aftur til nevndina við einum úrsliti til støðutakan. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Ein meiriluti Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr tekur undir við tilmælinum.

Minnilutin Jógvan Arge tekur støðu, tá greitt yvirlit er útvegað yvir kostnaðin av tí, sum higartil er gjørt við vøllin, og yvir mettan kostnað at gera vøllin lidnan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Samlaði fíggjarkarmurin, ið játtaður er til arbeiðið at gera fótbóltsvøllin, er kr. 17,625 mió. Disponeraðar kostnaðarupphæddir eru kr. 17,227 mió. Avlopið er kr. 397.534.

Írestandi løgukarmurin til vøllin í Hoyvík fyri 2016 er kr. 2.000.000. Harumframt er samtykt við 1. viðgerð í býráðnum kr. 1.000.000 aftrat. Verður hetta samtykt við 2. viðgerð, er tøka játtanin sostatt kr. 3.397.534.

Kostnaðarmeting fyri verkætlanina við at leggja graslíkið er kr. 4.070.820 v/mvg.
Fíggjartørvur er sostatt kr. 673.286.

Tað eru eisini onnur arbeiði kring vøllin, sum ikki eru tikin við omanfyri – talan er um el-arbeiði, trappur, innkoyring og áskoðaraskýli, samlað kostnaðarmeting fyri hesi arbeiði er kr. 2.359.539 v/mvg.

Mett verður, at konta 5710 uttandura vallir kann fíggja írestandi partin til graslíkið og til okkurt av mest neyðugu arbeiðunum, sum eftir eru at gera kring vøllin, í alt kr.1.600.000, ið verður at játta til løgukontuna 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 3.000.000 av íløgukarminum 5775 ítróttaranlegg og kr. 1.600.000 av kontu 5710 uttandura vallir til løgukontu L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at leggja við eina greiða uppseting av kostnaðinum av vøllinum í Hoyvík til viðgerðina í fíggjarnevndini og býráðnum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 2.000.000,00 verða játtaðar av íløgukarminum 5775 Ítróttaranlegg og kr. 1.600.000,00 av konto 5710 uttandura vallir til løgukonto L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevst tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigðursson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Marin Katrina Frýdal greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**
P/F J&K Petersen er nú um at verða liðugt við sína arbeiðstøku, ið fevnir um gerð av vallarøkinum og sjálvum fótbóltsvøllinum til og við grovplanering. Arbeiðstøkan fevndi ikki um graslíki, umframt undirlag (t.e. fínplanering, drenasfalt, stoytdoyvingarlag vm.).

Drenasfalt:
Í upprunaliga tilboðnum hjá P/F J&K Petersen var fínplanering og áleggjan av drenasfalti. Hetta valdi Tórshavnar kommuna tá at taka úr tilboðnum hjá P/F J&K Petersen at fremja tað fyri seg. Undirveitarin hjá P/F J&K Petersen var Sp/f HJ Asfalt. Samskifti hevur verið við tað felagið, hvørt tað stóð við sínar upprunaligu einleikaprísir og um felagið kundi fremja arbeiðið innan umleið hálvan september. Felagið hevur váttað, at kunna fremja arbeiðið fyri einleikaprísirnar, tó við tí fyrivarni, at nøgdirnar av tilfarinum til fínplanering vera at avrokna t.d. við vektarseðlum ella øðrum hátti, partarnir semjast um. Hetta tí at ávís óvissa kann verða viðv. javnleika og tí kann krevja nakað meiri av tilfari. Arbeiðið verður framt sbrt. upprunaliga útbjóðingartilfarinum hjá Sp/f HMP Consult.

Kostnaðirnir fyri fínplanering sbrt. tilboð er 312.200.kr. og drenasfalt sbrt. tilboð 821.500.kr. Hartil er metingin um eykakostnaðir fyri eykafínplanering vm. umleið 230.000.kr. umframt kommunalt MVG og ókent.

Graslíki:
15. august 2016 var innboðin lisitatión uppá at leggja graslíkið. 5 feløg vóru boðin við og 3 lótu inn tilboð. Talan er um tilboð frá Polytan Danmark, Laiderz Aps. og Ide Møblar (P/F Føroya Møblasøla). P/F LBF hevur kannað innkomnu tilboðini um graslíkið, sí hjálagt

fylgiskjal 1.

Mett verður, at lægsta tilboð lýkur ikki krøvini í mun til útbjóðingartilfarið, meðan hini tilboðini eru ov dýr í mun til tøka fíggjarkarmin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drensafalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000. kr. og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla harumframt til at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Mentamálanevndin 18. august 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við fyrra tilmælinum um fínplanering, drenasfalt v.m. fyri kr. 1.449.000 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Annfinn Brekkstein, samtykkir harumframt at taka av lægsta tilboðnum um graslíki við grønum gummigranulati kr. 2.298.000 u/mvg, og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við tilmælinum frá fyrisitingini um at bjóða graslíkið út av nýggjum.

**Fíggjarnevndin 23. august 2016:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina við atliti til at viðgera útbjóðingina av nýggjum, visandi til nýggjar upplýsingar í málinum.

**Býráðsfundur 23. august 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Asfaltundirlag ella fínplanering eina?**
a). Tórshavnar kommuna hevur asfalt á øllum fótbóltsvallunum undantikið Eysturvølli. Nakrir fótbóltsvallir kring landið (t.d. tann í Norðagøtu og á Eiði) hava undanframleidda stoytdoyvingarmottu beinleiðis omaná fínplanering.

Vallarreglugerðin 2016 hjá FSF hevur ikki ásetingar hesum viðvíkjandi, men vísa til javnleikakrøv og FIFA 2 Star reglur. Enn eru FIFA Quality Pro krøv ikki komin.

Fyrimunurin við ikki at leggja asfaltundirlag er, at kostnaðurin gerst nakað bíligari í fyrstu atløgu. Posturin fyri drensafalt í upprunaliga tilboðnum er ásettur til kr. 821.500 (tó vilja einleikaprísirnir fyri fínplanering helst gerast nakað hægri um asfaltering ikki er við). Vansin er tá, at tá graslíkið skal skiftast og um tað verða brúktar undanframleiddar stoyttdoyvingarmottur ístaðin fyri staðstoypt stoytdoyvingarlag, vil tað kunna viðføra ávís eykaabeiði við at rætta vøllin uppaftur. Bæði Niðari- og Ovari vøllur í Gundadali og vøllurin í Vika hava ikki havt stórvegis tørv á at verða upprættaðir í sambandi við skift av graslíki. Asfaltløgini eru nærum óskalaði frá uppruna av.

Mett verður at undarlagið á Hoyvíksvølli er so mikið gott at vónandi kemur hann ikki at seta seg nakað serligt, men torført er at geva nakra vissu fyri tí.

**Nýtt útboð?**

Í verandi støðu ber fíggjarkarmurin ikki at taka av sáttmála um fínplanering, asfaltering og einum høvuðstilboði um graslíkið (tvs. við staðstoyptum stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulati).

Hinvegin kann eisini umhugsast at velja aðra loysnir m.a. sum lýst í alternativunum í licitatiónini, sum innibera undanframleitt stoytdoyvingarlag/mottu og gummigranulat av slagnum gráum EPDM. Í hjálagda lista sæst uppseting við ymisku samansetingunum.

Hinvegin, um ynskið er at fáa bjóðað út av nýggjum, er hóskandi at gjøgnumganga útbjóðingartilfarið av nýggjum við atliti til, um ynskið er at fáa fleiri møguleikar frá teimum bjóðandi og møguliga enn fleiri bjóðandi, men har serliga staðstoypt stoytdoyvingarlag er alternativ og ikki treyt til høvuðstilboð, tó treytað av, at loysnirnar eru antin FIFA 2 Star ella Quality Pro góðkendar.

Løgfrøðilig metingin hjá løgdeildini er, at til ber at bjóða útaftur beinanvegin í innbodnari licitatión.

Av tí at heystið nærkast kann veðrið ávirka arbeiðið.

**Tilmæli:**

Asfaltundirlag:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at gera sáttmála við Sp/f HJ Asfalt um at fínplanera og áleggja drenasfalt á Hoyvíksvøll fyri 1.449.000. kr.

Graslíki:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at bjóða graslíkið út av nýggjum, har treytin fyri høvuðstilboði ikki longur er staðstoypt stoytdoyvingarlag og TPE-gummigranulat.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælunum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið viðv. asfaltundirlagnum í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
10. September 2016 var licitatitón uppá veiting og álegging av graslíki vm. til Hoyvíksvøll.

6 feløg vóru boðin at bjóða. 4 lótu inn tilboð. Hesi vóru Laiderz Aps, Polytan Danmark, UniSport v/Jónfinn Olsen og L/F MBM.

(øll tøl í málslýsingini eru uttan kommunalt MVG um ikki annað er tilskilað!)

Í hjálagda fylgiskjalið síggjast tilboðini nágreinaði. Sí eisini hjálagda meting frá P/F LBF av licitatiónini.

Høvuðstilboðini vóru samanlagt hesi:

| | |
|---|---|
| Laiders | kr. 2.350.589 |
| Polytan | kr. 2.585.564 |
| MBM | kr. 3.031.606* |
| UniSport | kr. 3.171.726 |

* Valdu ber at geva tilboð uppá TPE-V gummigranulat.

Bíligasta høvuðstilboðið er sostatt frá Laiderz Aps og er tá við EPDM gummiigranulati og undanframleiddari máttu.

3 feløg hava latið inn alternativ 1 við industri EPDM, gráum gummigranulati og eru prísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 2.153.453 |
| Polytan | kr. 2.224.148 |
| UniSport | kr. 2.908.878 |

4 feløg hava latið inn alternativ 2 við TPE-V grønum gummigranulati og eru prísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 2.613.431 |
| Polytan | kr. 2.700.560 |
| MBM | kr. 3.031.606 |
| UniSport | kr. 3.253.866 |

3 feløg hava latið inn alternativ 3 við staðstoyptum undirlagi og eru meirprísirnir tá:

| | |
|---|---|
| Laiderz | kr. 229.992 |
| Polytan | kr. 361.416 |
| UniSport | kr. 287.490 |

Áleggingartíðspunkt
Vegna at so mikið er útligið á árið við ofta ringum veðri, verður mælt til at álegging í fyrsta lagi verður gjørd í apríl 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, Mentamálaleiðarin og deildarleiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla mentamálanevndin til at taka av tilboðum frá Laiderz uppá antin:
a). Høvuðstilboð á kr. 2.350.589 ella
b). Alternativ 1 samansett við alternativ 3 á tils. kr. 2.383.445.

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Jógvan Arge og Bjørghild Djurhuus, mælir til at taka av punkt b) Alternativ 1 samansett við alternativ 3 á tils. kr. 2.383.445, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu:
Marin Katrina Frýdal.

## 251/16 Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 59/14 | 14/05063-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 330/14 | 14/05063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 253/14 | 14/05063-1 |
| 4 Ferðslunevndin | 27.01.2015 | 11/15 | 14/05063-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 03.02.2015 | 12/15 | 14/05063-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 11.02.2015 | 29/15 | 14/05063-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 28/15 | 14/05063-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 26.02.2015 | 49/15 | 14/05063-1 |
| 9 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 35/15 | 14/05063-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.03.2015 | 88/15 | 14/05063-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 17.03.2015 | 39/15 | 14/05063-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.03.2015 | 72/15 | 14/05063-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 48/15 | 14/05063-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 76/16 | 14/05063-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 96/16 | 14/05063-1 |
| 16 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 72/16 | 14/05063-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 215/16 | 14/05063-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 323/16 | 14/05063-1 |
| 19 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 251/16 | 14/05063-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Í sambandi við kappingina hava Zeta arkitektar, sum fingu 1. virðisløn í kappingini, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting av eini uppihaldstrappu í Vágsbotni. Kostnaðarmetingin fevnir um eitt øki uppá 310 m$^2$ millum Mylnugøtu og Bryggjubakka.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, ið fevnir um eina uppihaldstrappu í ljóst-litaðum betongi, ið bindur økið framman fyri Bojsensgarð og torgið í Vágsbotni saman. Trappan verður skipað við smærri uppihaldsøkjum úr timbri umframt trøum og plantum. Talan er somuleiðis um ein lítlan pop-up pall við segldúki, ið kann setast upp í sambandi við tiltøk, nýggj ljósarmatur, nýggjan belegning framman fyri Bojsensgarð og eina lækkan av grótlaðaða garðinum. Økið framman fyri Havnar kirkju, ið fevnir um 250 m$^2$, kann møguliga eisini gerast ein partur av uppskotinum (verður roknað sum tilval).

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 1.911.609. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 2.300.000 mió.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3.109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.00 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

## Tilmæli:

Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, mælir tekniski stjórin til:
- at játtaðar verða kr. 110.300 av íløgunum til miðbýarætlanina, til prosjektering og útbjóðing
- at projekt verður gjørt og arbeiðið boðið út í innbodna lisitatión
- at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum eftir leistinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, er uppskot komið frá Zeta arkitektum, at broyta vegaføringina á brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Ferðslunevndin 27. januar 2015:** Málið umrøtt, Zeta arkitektar arbeiða víðari við málinum.

**Ferðslunevndin 03. februar 2015:** Zeta arkitektar framløgdu tvey uppskot, uppskot 1 og uppskot 2. Nevndin samtykti at taka undir við uppskot nr. 2. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av viðgerðini av málinum um trappuna skal støða verða tikin til møguliga dagføring av brekkuni niðan á Bryggjubakka.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Eingin peningur er settur av til at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka innan íløgur fyri 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við ferðslunevndini.
Harumframt verður mælt til at játta kr. 100.000,- til at gera skitsuuppskot við kostnaðarmeting av at dagføra brekkuna niðan á Bryggjubakka, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2015:** Umboð frá Zeta Arkitektum løgdu fram uppskot um loysn av trappu og ferðsluloysn á økinum, dagf. 11.02.2015. Nevndin samtykti at taka undir við ferðslunevndini og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina til víðari avgreiðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 100.000,- til skitsuuppskot við kostnaðarmeting at leggja fyri faknevndirnar aftur og at arbeiðið verður fíggjað av kto 8175 íløgur fyri vegaætlanir 2015.

**Fíggjarnevnd 26. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atvkøðum fyri og ongari ímóti at játtað 100.000 kr. av konto 8175 til skitsuuppskot við kostnaðarmeting.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at planleggja uppihaldstrappuna, har sum Perlan á sinni stóð, er kostnaðarmetingin dagførd út frá betri loysnum í sambandi við vali av tilfari. Í upprunaliga uppskotinum var ljóst litað betong valt sum tilfar til trappuna. Nýggja uppskotið vísir á føroyskt grót sum tilfar, tí tað bæði hóskar seg betri til økið og úttrykkið á staðnum.

Sambært metingum frá Zeta arkitektum er dagførda kostnaðarmetingin 2.576.865 kr. uttan MVG. Pallur áljóðandi 153.000 kr. er íroknaður kostnaðarmetingina. Pallurin kann sparast burtur, men fyri at fáa eitt nøktandi heildarprosjekt mælir býarskipanardeildin frá at spara pallin burtur.

Í dagførdu kostnaðarmetingini verður óvæntað roknað við 20%, men um hetta verður sett niður til 15%, og pallurin er spardur burtur, verður samlaða kostnaðarmetingin kr. 2.265.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at játta samlaðu upphæddina kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 17. mars 2015:** Kunnað varð um málið.
**Ískoyti:**
Trý tilboð eru komin inn at gera uppihaldstrappuna og dagføra vegin (mál 15/00790). Talan er um samlað tilboð fyri bæði arbeiðini, sí j.nr. 15/00790

Sp/f Andrias Berg hevur lægsta tilboðið áljóðandi kr. 2.344.767,00.

Articon hevur næstlægsta tilboðið áljóðandi kr. 3.208.235,00.

J&K Petersen hevur boðið sær at gera arbeiðið fyri kr. 3.422.178,00.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri mælir til at taka av lægsta tilboðnum hjá Sp/f Andriasi Berg og viðvíkjandi arbeiðinum at gera uppihaldstrappuna at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndni og játta kr. 2.737.919 við MVG av kto. 6275 fyri miðbýarætlanina og at beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevnd 18. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið i býráðið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sum kunnugt hava fleiri trupulleikar verið við Uppihaldstrappuni í Vágsbotni og dagføring av vegi niðan á Bryggjubakka, sum hava havt seinkingar við sær. Hetta hevur eisini havt meirkostnað við sær. Grótveitarin hevur ikki megnað at fáa tilfarið fram til tíðina, við tí avleiðing, at meirútreiðslur hava verið fyri arbeiðstakara og byggiharra. Arbeiðið hevur ligið stilt eina tíð, men er nú byrjað aftur, og grót er niðurfyri. Eisini hevur trappuprosjektið skula broytt og tillagað seg gjøgnum byggitíðina við viðmerkingum og krøvum frá Fornminnisnevndini. Ein loysn tykist nú endiliga verða komin undir land.

Eisini hava meirútreiðslur verið av umleggingum av kaðalum og leiðingum í vegnum, sum man ikki var vitandi um áðrenn arbeiðið fór ígongd.

Talan er um tvær ymiskar verkætlanir, sum eru bodnar út saman og samstundis, og har sami arbeiðsgevari er á báðum verkætlanum.
Samlaða hækkingin fyri báðar verkætlanirnar er kr. 710.000,00 tilsamans. Torført er at gera upp nágreiniligt býti, men helvtarbýti verður mett at verða á góðari leið.

Krøv og broytingar frá Fornminnisnevndini, verða mett at verða kr. 300.000. Seinkingar frá grótveitara verður mett til 300.000,00 kr., her íroknað til- og avriggingar í sambandi við Voxbotn, ólavsøku og jól.
Broytingar av verandi kaðalleggingum, hevur ein meirkostnað á kr. 160.000 við sær.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at hækka játtanina við kr. 355.000,00 av 6275 – “Fríðkan av kommununi” og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 355.000,00 av konto 6275, Fríðkan av kommununi, og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L62025 Trappa í Vágsbotni er liðug og skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest ein meirnýtsla uppá kr. 4.456.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at meirnýtslan verður fíggjað av íløgukarminum til Fríðkan av kommununi, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 252/16 Glastak á perlutorg

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 153/15 | 15/01982-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 09.11.2015 | 217/15 | 15/01982-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 272/15 | 15/01982-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 13.01.2016 | 7/16 | 15/01982-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 25/16 | 15/01982-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.03.2016 | 77/16 | 15/01982-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 98/16 | 15/01982-1 |
| 8 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 101/16 | 15/01982-1 |
| 9 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 73/16 | 15/01982-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 216/16 | 15/01982-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 243/16 | 15/01982-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 318/16 | 15/01982-1 |
| 13 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 252/16 | 15/01982-1 |

**Málslýsing:**
Nú virksemið bæði í Perluni og Reinsarínum sum samlað tónleika- og mentanarstað hevur virkað eina tíð, er hugskot um at fáa skipað uttanduraøkið uppí við at tekja útyvir.

Royndir eru gjørdar við fyribils konstruktiónum og takdúki. Møguleiki er eisini at gera permanenta stálkonstruktión við herdaðum glasi. Gjørt er uppskot tí viðvíkjandi, og sum mett verður kostar um 1 mió kr.

Uppskotið verður lagt fram. Byggi- og býarskipanarnevndin skal góðkenna staðseting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til,

- at gjørd verður visualisering av uppskotinum,
- at heita á teknisku fyrisiting um at viðgera aðrar møguleikar fyri loysnum, sum eisini kunnu liva upp til ynsktu endamálini, og
- at leggja hetta aftur fyri mentamálanevndina til støðutakan.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið til viðgerðar hjá Teknisku fyrisitingini og býararkitektinum. Mett verður, at teltloysnin ikki hóskar so væl til nýtsluna av torginum ella til tiltøkini, sum verða skipað á torginum, og mælt verður til loysnina við glastaki. Býararkitekturin metir harumframt, at um býurin skal kunna gera gagn av torginum og veggjunum rundanum tað, er tað av stórum týdningi, at tað eitt nú er møguligt at sýna filmar og grafikk upp á veggirnar. Hetta er so at siga ómøguligt við teltloysnini. Somuleiðis kann man siga, at estetiskt hóskar glastakið væl til verandi Perlu og kann á henda hátt skapa meira harmoni, enn teltið hevði gjørt. Tó hevur glastakið ein vansa, at torgið altíð verður undir taki, og metir Býararkitekturin, at tað hevði verið til gagns fyri torgið, um takið varð gjørt soleiðis, at glasflaturnar kundu flytast/vippast,

soleiðis at sólin ein sólskinsdag sleppur niður á torgið. Eisini verður mælt til, at áleggingin (belegningurin) eigur at verða gjørd, sum víst í viðhefta tilfari, umframt at møblar/innbúgv og ljósseting eiga at verða hugsað inn frá byrjan av verkætlanini.

Hugsanin er at seta upp stálkonstruktión, sum verður takt við herdaðum glasi. Hjálagt eru tekningar, sum lýsa ætlanina.

Upplýsast skal, at verkætlanin hevur ikki verið viðgjørt í byggi- og býarskipanarnevndini, at umrøða staðseting.

Fyribils kostnaðarmeting er gjørd áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Jørð – grevstur og stoyping av fundamenti: | 80.000 kr |
| Stál 4 stk stálkonstruktiónir: | 160.000 kr |
| Stálsperrur 15 stk: | 75.000 kr |
| Festir 4 stk/m2 x 140 $m^2$ | 120.000 kr |
| Glas (herdað/laminerað) 135 $m^2$ x 3500 kr: | 472.500 kr |
| Óvæntað 5%: | 46.000 kr |
| Tilsamans : | 973.000 kr |

Kostnaðarmetingin er uttan kommununnar mvg á 6.25%

Hjáløgd eru 3 fylgiskjøl:
a). Plansjur við dømum um teltloysn og glastaksloysn
b og c). Tekningar yvir glastaksloysnina.

Víst er á møguleikan at fíggja hetta frá íløgujáttan, sum ætlað er til baðiland, men sum enn ikki er fyrireikað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1 mió. av íløgukontu 5775 Baðiland til verkætlanina og heimila umsitingini at gera sáttmálar innan fyri hesa játtan til at fremja verkætlanina.

**Mentamálanevndin 09. november 2015:** Nevndin tekur ikki undir við teimum uppskotum, til tak á torgið framman fyri Reinsarínum, sum fyriliggja í málinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at beina málið aftur í mentamálanevndina til nýggja viðgerð.

**Ískoyti:**
Býararkitekturin hevur á fundi í januar við borgarstjóran og forkvinnuna í Mentamálanevndini víst á hvørjir býarskipanarligir møguleikar eru við einum torgið, sum er undir taki.

1. Sum partur av Mentunargøtuni vil torgið gerast meiri brúkiligt undir taki, og har kunnu skipast alskyns mentunarlig tiltøk. Nevnast kunnu listaframsýningar, filmframsýningar o.s.fr.
2. Harumframt kann torgið fevna um fyribils býarskipanarligar uppsetingar, sum býararkitekturin miðvíst arbeiðir fyri at skapa í miðbýnum, soleiðis at borgarin hevur tiltøk/uppsetingar at vitja í miðbýnum. Víst verður til viðløgdu myndir.
3. Til seinast skal nevnast, at økið víðkar um verandi virksemi í Perluni og Reinsarínum. Møguligt verður í størri mun at uppihalda sær á torginum, tá tiltøk eru í ávikavist Perluni og Reinsarínum.

Býararkitekturin kemur á fundin at leggja fram.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka støðu til uppskotið hjá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 13. januar 2016**: Nevndin mælir fyrisitingini til at arbeiða víðari við glastaksloysnini frammanfyri Reinsarínum og Perluni og venda aftur til nevndina við tíðar- og kostnaðarætlan.

**Ískoyti**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Tekniska fyrisitingin hevur saman við ráðgevanum P/F Nomatek greinað glastaksloysn og gjørt kostnaðarætlan, ið samstundis er eitt heildarveitingartilboð frá P/F Nomatek, ið takast kann av. Sí hjáløgd skjøl. Mett verður at arbeiðið kann verða framt innan umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli**:
Trivnaðastjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at heimilað umsitingini til antin at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek ella at heimila umsitingini at innganga avtalur um ráðgeving og fakentreprisur til at fremja verkætlanina innan ásetta karmin.

**Mentamálanevndin 02. marts 2016:** Samtykt at taka av tilboðnum frá P/F Nomatek og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi fígging til arbeiðið verður víst til tilmæli til fundin í mentamálanevndini 9. november 2015, sum er at játta kr. 1 mió. av íløgukarminum 5775 Baðiland.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.
Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L62013, Torg við Perluna, er liðug og skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest ein meirnýtsla uppá kr. 41.250.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at meirnýtslan verður fíggjað av íløgukarminum til fríðkan av kommununi, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Ískoyti:**
Mett verður, at verkætlanin hevur eydnast væl og hevur verið til gleði og gagns í sambandi við mong tiltøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at staðfesta tilmælið frá tekniska stjóranum og býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 253/16 Navn til nýggja parkeringsøkið við Høllina á Hálsi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 238/16 | 16/03490-1 |
| 2 Gøtunavnanevndin | 20.09.2016 | 13/16 | 16/03490-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 246/16 | 16/03490-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 253/16 | 16/03490-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál 14/04763 - Útbygging av Høllini á Hálsi (Umsókn um stuðul til umvæling av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll).

Í verkætlanini er eitt parkeringsøki millum høllina, R. C. Effersøes gøtu og Skipara Hansens stein við umleið 90 parkeringsplássum.

Komandi parkeringsøkið verður ætlandi klárt at taka í brúkt í endanum av 2016 og fer at virka sum parkeringsøki bæði fyri vitjandi í Høllini á Hálsi og á ítróttaøkinum í Gundadali umframt sum parkeringsøki fyri handilsøkið á Hálsi.

Gøtunavnanevndin er ráðgevandi nevnd hjá Tórshavnar býráði. Arbeiðssetningur hennara er at koma við uppskotum og gera tilmæli til mentamálanevndina um gøtunøvn, nøvn á torgum og øðrum slíkum nøvnum í kommununi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heita á Gøtunavnanevndina um at koma við tilmæli um navn til nýggja parkeringsøkið.

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Gøtunavnanevndin 20. september 2016:** Nevndin mælir til at nevna økið “Bilastøðilin á Hálsi”.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at mentamálanevndin tekur støðu til hesi uppskot:

1. Parkeringsplássið við Skipara Hansens Stein
2. Parkeringsplássið við Høllina á Hálsi

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Samtykt at navnið verður:

***Parkeringsøkið við Hallarheyg***

og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13451 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 254/16 Ytri Ringvegur vegføring frá Hjalla til Krákugjógv - atkomuvegur - innkomuvegur (2001-0407)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 95/16 | 14/01358-154 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 69/16 | 14/01358-154 |
| 3 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 105/16 | 14/01358-154 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 254/16 | 14/01358-154 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 361/16 | 14/01358-154 |

**Málslýsing:**
**2001-0407/122 SG – BH**

**Landsvegaføring frá Hjalla til Krákugjógv**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ivi hevur tikið seg upp, um tað er rætt at fremja tað ætlaða 1. byggistigið av atkomvegnum til Havnar (Ytra ringvegi), úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í Sundsvegin, í tí líki, ætlanin fyriliggur.

Fleiri orsøkir eru til ivan. Nógv er broytt á samferðsluøkinum, síðani hesin vegur var stungin út fyri 20 árum síðani. Fast samband er fingið í lag í Vágar, fyrsta dagin verður koyrandi undir Leirvíksfjørð, og um fá ár verður tunnil millum Skálafjørðin og Suðurstreym ætlandi veruleiki. Aftrat hesum eiga vit at rokna við føstum sambandi í Sandoynna.

Sostatt er í dag talan um ógvuliga nógv broyttar fortreytir í mun til støðuna fyri 20 árum síðani, og við framtíðini í huga má hædd takast fyri hesum.

Stórir vansar eru við ætlaða vegateininum, sum fer at elva til langar bíðirøðir út í frammanundan nógv trafikerað øki.

Vegurin fer gjøgnum bygt øki, sum vit í dag ikki eiga at góðtaka eins væl og fyri 20 árum síðani.

Nógv ognartøka skal til eftir øllum teininum. Vegurin liggur í einum skráa við vanda fyri grót- og áarlopi. Nógvur kavi legst á teininum og krevur nógva rudding.

Fyri umhvørvið sum heild fer hetta inntriv at hava ógvuslig árin.

Tí eigur 1. byggistig av atkomuvegnum til Havnar (Ytri ringvegur) at verða lagt øðrvísi. Besta loysn er at leggja vegin í tunnil. Hendan loysnin leggur so at siga einki øki undir seg og fer at lætta um á kommunala **veganetinum.**

**Býráðið 15. desember 2005:** Uppskot frá býráðsmeirilutanum: Til tess at gera greitt, hvat Tórshavnar býráð heldur um vegaføringina í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringveg) samtykkir býráðið at siga frá, at hon eigur ikki at vera, sum hon er stungin út, men framd við tunli ella vegaføring upp um Húsareyn.

Samtyktin verður beind í teknisku nevnd til viðgerðar at leggja aftur fyri býráðið.

Atkvøtt varð um uppskotið, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Kári Árting, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

**Ískoyti:**
Farið verður á ástaðarfund undir Krákugjógv.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Eftir at hava verið á staðnum samtykti nevndin at mæla býráðnum til at halda fast við, at vegaføringin í 1. byggistigi av atkomuvegnum til Havnar (Ytra Ringvegi) verður framd við tunnli úr Krákugjógv undir Húsareyni norður í nýggja atkomuvegin við Sundsvegin.

**Ískoyti:**
Í sambandi við arbeiðið at leggja atkomuveg til Havnar, er Landsverk sum kunnugt farin undir fyrra part av anleggsarbeiðinum, sum er strekkið frá økinum norðan fyri útstykkingina millum Gilja og suður í móti økinum við Oyggjarvegin - undir Krákugjógv.

Sambært Landsverki er ætlanin, at hetta strekkið skal verða liðugt í 2008, og at strekkið frá Skarðshjalla og suður ímóti verandi atkomuvegi skal vera liðugt í 2012.

Landsverk ætlar nú at fara undir vegarbeiðið á strekkinum frá brúnni um Hoydalsá og suður í móti økinum undir Krákugjógv.

Í sambandi við viðgerðina av øllum projektinum um atkomuvegin hjá landsverki, eru ítøkilig viðurskifti, sum kommunan eigur at taka støðu til. Hesi viðurskifti eru:

1. Íbinding við Eysturoyartunnilin
2. Planskyld íbinding við ídnaðarøki og Stórutjørn
3. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
4. Liðugtgerð av planskyldari íbinding norðan fyri útstykkingina Millum Gilja so at atkomuligt er til Flatarvegin
5. Brúgvaskap á vegamótinum millum landsvegin og Flatarvegin. Skal avtala fáast í lag við Landsverk um fyribils at binda í atkomuveg – ella skal farast undir at gera brúgv, áðrenn ferðsla verður á strekkinum.
6. Umlegging av Sundsvegnum
7. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingardalsvegin
8. Støðutakan til íbindingina undir Krákugjógv
9. Støðutakan til íbinding við Hotel Føroyar
10. Støðutakan til atkomuveg til Velbastaðvegin
11. Støðutakan til verandi íbinding við Oyggjarvegin
12. Veitingar á landsvegi
13. Frástøða - byggilinja

Víst verður til fund, j.nr. 2003-1884/12, millum umboð fyri Tórshavnar kommunu og Sp/f HMP-Consult, sum er ráðgevi hjá Landsverki í hesum máli.

Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 27. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Vinnumálaráðið sigur í skrivi, dagfest 5. september 2006, at hóast tað framvegis er metingin, at verandi vegaætlan við Villingardalsveg er ein fullgóð loysn, er ráðið sinnað at ganga ynskinum hjá býráðnum um tunnil á møti, um býráðið góðtekur at gjalda kostnaðarmunin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina, sum er í uppskoti, og hartil meirkostnaðin av rakstrinum í eitt áramál.

Sambært einari leysliga meting er kostnaðarmunurin millum ætlaðu vegaloysnina og tunnilsloysnina einar 30 mió. kr. umframt meirkostnað í rakstri.

Treytirnar fyri einari slíkari avtalu eru, at umrøddi teinur verður landsvegur, at kommunan tekur meirkostnaðin fyri tunnilsloysnina uppá seg, og at Landsverk kann góðtaka loysnina vegatekniskt.

Býráðið eigur eisini at hava í huga, at ferðslan eftir hesum vegastrekki sambært framrokningum fer at økjast tey næstu 15-20 árini í so stóran mun, at tað helst verður neyðugt at gera eitt tunnilsrør afturat og kannast má tí, um tað av teknisku ávum er neyðugt at spreingja tunnil nr. 2 samstundis sum tunnil nr. 1, og um so er, má kommunan eisini gjalda meirkostnaðin av hesum.

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnilin undir Krákugjógv.

Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørivslig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við ytra ringvegnum, tá talan er um frástøða frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l.

Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli undir Krákugjógv ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununnar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting.

Í sambandi við fíggjarliga partin skal eisini vísast á, at ein tunnil vil gerast dýrari í rakstri enn við at hava ein vanligan veg út frá teimum fortreytum, sum landsvegamyndugleikin rekur landsveganetið uppá.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi mæla kommunustjórin og tekniski stjórin frá at gera tunnil undir Krákugjógv.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Ein meiriluti, Jan Christiansen, Høgni Mikkelsen og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Hildur Eyðunsdóttir, taka støðu á býráðsfundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Nýtt:**

Ráðgevandi fyritøkan P/F HMP Consult hevur fyri Landsverk gjørt nýtt uppskot til nýggja landsvegaføring til og uttan um Tórshavn. Onnur uppskot hava verið gjørd áður.

Í løtuni eru 3 landsvegainnføringar til Tórshavn. Hesar eru eftir Kaldbaksvegnum, eftir gamla Oyggjarvegnum og eftir vegnum í Havnardali frá Gomlurætt. Nýggi landsvegurin norðan fyri høvuðsstaðin kemur at binda saman allar hesar 3 landsvegainnføringarnar til Tórshavn. Nýggi landsvegurin byrjar úr verandi Kaldbaksvegnum beint eystan fyri Skarðshjalla, og fer so gjøgnum Hoyvíkshagan yvir til Villingadal og fram við Húsareyni, har hann verður bundin í verandi Oyggjarvegin. Haðani er vegurin ætlaður at fara gjøgnum Flatnahagan út í Havnardal, har hann verður bundin í verandi landsvegin til Gomlurætt.

Um tunnil millum Skálafjørðin og Havnina gerst veruleiki, kemur hesin at blíva íbundin Kaldbaksvegin ella omanfyri nevnda nýggja landsvegastrekkið.

Landsveganetið í Føroyum bindir saman bygdir og býir, uttan mun til støðd. Í Tórshavn eru fleiri einstakir býlingar, sum einsamallir eru nógv størri enn fleiri bygdir. Framskrivingar av býarmenningini vísa m.a., at serliga uppi í Hoyvíkshaganum, í Vesturbýnum og á Argjum fer munandi vøkstur at verða í bæði fólkatali og tali av bústaðareindum.
Tekniska umsitingin metir tað vera sera umráðandi, at av- og ákoyringar til nýggja landsvegin verða skipaðar í tøttum samstarvi við Tórshavnar kommunu. Tryggjast má ein góð fordeiling av ferðsluni, og at bæði verandi og komandi kommunala veganetið er ført fyri at lofta ferðsluni og fordeila ferðsluna á rættan hátt, fyri ikki at fáa ferðsluruðuleika inni í býnum. Tí er eisini umráðandi at tal, støðd og staðseting av íbindingum í landsvegin taka støði í støðd av býlingunum (fólkatal og bústaðareindir), tí sum longu nevnt eru fleiri býlingar sum eru nógv størri enn heilar bygdir.

Í sambandi við viðgerðina av øllum prosjektinum um atkomuveg hjá Landsverk, hevur umsitingin á eini verkstovu 5. desember 2006 viðgjørt niðanfyri standandi viðurskifti.

1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum
2. Íbinding við Eysturoyartunnilin
3. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli
4. Planskyld íbinding við Stórutjørn
5. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn
6. Íbinding við Flatarvegin
7. Umlegging av Sundsvegnum
8. Íbinding við Villingadalsvegin
9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin
10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv
11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin
12. Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar
13. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin
14. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin
15. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk, fjarhita og reinskan av vegvatni.
16. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir.
17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum

**Tilmæli:**
Við støði í viðgerðini á verkstovuni mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til:

1. **Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**

Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður hesum fyritreytum.
Mælt verður tó samstundis til, at á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður ferðin avmarkað til 50 km/t, og at íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum stórar rundkoyringar. Hetta er ikki minst neyðugt fyri at fleiri stórir komandi býlingar, sum koma at liggja uttan fyri landsvegin, fáa samband við hendan. Tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 20.000 bilar um samdøgri, kann ferðin hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

2. **Íbinding við Eysturoyartunnilin**
Onki ítøkiligt fyriliggur enn uppá hvar linjuføringin fyri ætlaða tunnilin millum Skálafjørðin og Havnina verður, og tískil heldur ikki uppá hvar tunnilin eftir ætlan kemur upp og hvar íbinding verður í landsvegin. Mælt verður til, at Tórshavnar kommuna, sum planleggingarmyndugleiki í kommununi, setir fram krav um at verða við til at taka avgerð um, hvar og hvussu tunnilin kemur upp.

3. **Íbinding við vinnuøkini Sandvíkarhjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
Í løtuni fyriliggur ikki eitt nóg neyvt grundarlag at taka støðu til, bæði um, hvar ella hvussu kommunala veganetið við verandi vinnuøkir á Sandvíkarhjalla og Skarðshjalla, og eitt komandi vinnuøki á Ovara Hjalla, skulu bindast í landsveganetið. Mælt verður tí til, at hetta verður kannað nærri í sambandi við útstykkingar- og byggiætlaninar í økjunum, og at lendi til eina møguliga íbinding við rundkoyring við Ovara Hjalla verður hildi tøkt, til greiða er fingin á hesum. Tí verður mælt til, at vegasamband til Ovara Hjalla verður gjørt við eini rundkoyring frá Hvítanesvegnum.

4. **Planskyld íbinding við Stórutjørn**
Mælt verður til, at gjørd verður planskyld íbinding við Stórutjørn. Hetta verður fyrsta stóra íbindingin millum kommunala- og landsveganetið á strekkinum, og eigur henda íbinding tí at rindast av Landsverk.
Mælt verður til, at vegastrekkið frá íbindingini í Kaldbaksvegin til planskyldu íbindingina við Stórutjørn, beinanvegin verður gjørt sum 4-sporaður vegur við mest loyvdu ferð á 80 km/t. Vísandi til omanfyri standandi pkt. 1 verður eisini mælt til, at á vegastrekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður mest loyvda ferðin sett til 50 km/t.

5. **Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
Ynski er sett fram um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur norður – tvs. burtur frá Stórutjørn. P/F HMP Consult hevur kannað møguleikan fyri hesum, og onki er til hindurs fyri tí. Men ein slík flyting av vegalinjuni vil viðføra, at ein partur av vegastrekkinum, sum longu er gjørt, má umleggjast. Kostnaðurin fyri hetta arbeiði er av Landsverk mettur til kr. 2,0 mió. Mett verður, at Landsverk undir øllum umstøðum eigur at flyta vegin uml. 25 m longur norður júst við Stórutjørn, fyri at tilpassa vegin betur til lendisviðurskiftini á staðnum – tvs. av umhvørvisávum. Við verandi linjuføring kemur vegurin nærum í sjálva tjørnina, og kemur harumframt beint inn í ein høgan kneysa í lendinum. Mælt verður tí til, at Landsverk skal flyta vegaføringina minst 25 m longur burtur frá Stórutjørn, fyri at fáa vegin at fella betur í lendi og fyri ikki at koma so nær tjørnini.

6. **Íbinding við Flatarvegin**

Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Flatarvegurin er ein av hesum vegum.
Fram til 2012, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlan verður liðugur, verður mælt til at Flatarvegur, Sundsvegur og Villingadalsvegur verða bundnir í landsvegin, og at teir partar av vegnum, sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.
Fyri tíðarskeiðið aftan á 2012 verður mælt til, at minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingadalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við rundkoyring, sum er minst 32 m í diametur. Nóg stórt økið skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

**7. Umlegging av Sundsvegnum**
Brúgv er gjørd tvørtur um Hoydalsá. Her er sostatt eisini møguligt at føra Sundsvegin undir landsvegin. Við at binda Sundsvegin í landsvegin, fæst beinleiðis vegasamband inn til bæði Vegin Langa og til Norðara ringvegin. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

**8. Íbinding við Villingadalsvegin**
Villingadalsvegurin er lutfalsliga smalur, og trupult er at breiðka hann, orsakað av nógvari bygging á báðum síðum av vegnum. Harumframt er ikki pláss til at gera íbinding í Norðara ringvegin við rundkoyring, uttan at taka burtur verandi hús. Víst verður annars til tilmæli til omanfyri standandi pkt. 6.

**9. Støðutakan til tunnilsloysn við Villingadalsvegin**
Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingadalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli við Villingadalsvegin ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya Landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Mælt verður tí frá at gera tunnil við Villingadalsvegin.

**10. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**
Loysnin í uppskotinum hjá Landsverk er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi. Tekniska umsitingin sær eisini hesa íbinding sum ein part av eini loysn viðv. Landsvegaføringini frá verandi íbinding millum Oyggjarvegin og Norðara ringveg niðan til Hotel Føroyar. (Sí pkt. 11)
Mælt verður tí til, at hildi verður fast um upprunaligu loysninga sum er, at gera eina íbinding við rundkoyring og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.

**11. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**
Landsvegurin er ætlaður at blíva bundin í verandi Oyggjarveg nakað vestan fyri P/F Wenzel Petersen. Oman fyri Hotel Føroyar fer landsvegurin síðani oman av verandi Oyggjarvegi. Henda vegaføring lýkur ikki tær ferðsluteknisku fyritreytirnar fyri einum 80

km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild.
Mælt verður tí til, at á strekkinum frá har Landsverk hevur ætlanir um at gera eina planskylda íbinding undir Krákugjógv, til á leið har sum ætlanir eru um planskylda íbinding vestan fyri Hotel Føroyar, skal Landsverk gera 4-sporaðan tunnil í seinasta lagi tá ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar.

12. **Íbindingar á økinum við Hotel Føroyar**
Tórshavnar kommuna tekur undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin. Tá talan er um íbinding oman móti býnum, verður mælt til at gera hesa við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding. Nóg stórt øki skal tó leggjast av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, um ársmiðalferðslan fer upp um 20.000 bilar og avgjørt verður at hækka mest loyvdu ferðina á strekkinum til 80 km/t (sí pkt. 1.)

13. **Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**
Tann av P/F HMP Consult teknaða loysnin við íbinding av landsvegnum í verandi landsveg úti í Havnardali, er ikki í samsvar við tað sum áður er teknað. Vegatekniskt er seinasta uppskotið nøktandi, men neyðugt er at fáa betur lýst hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging í økinum og fyri verandi vegir í økinum (Velbastaðvegur og vegin út í Havnardal).

14. **Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**
Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.
Mælt verður til, at um Landsverk ætlar at niðurleggja verandi íbindingar, mugu teir útvega aðrar í staðin. Harumframt verður mælt til takað undir við, at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, soleiðis sum prosjekterað av ráðgevunum hjá Landsverk. Tó er onki sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring á verandi Oyggjarvegin.

15. **Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**
Sambært upplýsingum sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.
Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg sum fer gjøgnum bygt økið, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatnið og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.
Mælt verður tí til at krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni har landsvegir fara gjøgnum bygt økið. Harumframt er ynskiligt, at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.
Víst verður annars á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

16. **Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**
Mælt verður til, at ein tílíkur vegur gjøgnum bygt økið hevur gonguteigar og súkklubreytir, soleiðis at sleppast kann undan at gangandi og súkklandi – m.a. útlendsk ferðafólk – ganga og súkkla á koyribreytunum millum bygdir, soleiðis sum tey gera flestu staðni sum nú er. Stórt tal av ferðandi koma hvørt ár til Havnar og fara herfrá víðari kring landið.
Víst verður annars á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.

**17. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**

Av tí at talan er um ein landsveg, sum fer ígjøgnum partvíst bygt økið, og økið sum í byggisamtyktini fyri Tórshavn er lagt av til byggilendi, metir tekniska umsitingin, at tað er ikki grundarlag fyri at áseta størri fjarstøðu enn 25 m frá vegmiðju til byggiljuna fram við landsvegnum. Tó verður mælt til, at tað í sambandi við byggilinjuna verður tikin hædd fyri teimum støðum, har íbindingar væntast at koma í framtíðini, sum antin rundkoyringar ella planskyldar íbindingar.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Býráðið 14. desember 2006:** Tikið av skrá.

**Nýtt:**
Landsverk hevur hin 31. januar 2007 havt framløgu fyri byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini av vegaprojektinum um nýggjan landsveg frá Kaldbaksvegnum til Havnardal. Sama dag, gjøgnumgingu omanfyri nevndu faknevndir einkultu partarnar av málinum, og var hetta framhald av tí nevndarviðgerð, sum frammanundan hevur verið í byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

Tilmæli hjá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum og býararkitektinum fyri einstøku punktini er eftir henda fundin tillagað soleiðis:

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

**1. Vegakategori og framtíðar tillagingar av vegastrekkinum**

Grundað á ferðsluframskrivingar verður mælt til at taka undir við, at vegurin verður fyrireikaður til ein 4-sporaðan veg til ferðslu við 80 km/t, og at **allur** vegurin horisontalt- og vertikalt verður tilevnaður út frá hesum fyritreytum.

Mælt verður tó samstundis til:

a) **at** á vegastekkinum frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar verður ferðin avmarkað til 50-60 km/t
b) **at** íbindingarnar millum kommunala veganetið og landsvegin verða gjørdar sum vanligar T-kross íbindingar, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** biðja Landsverk um ferðslutekniskar kanningar av hvat er hóskandi sum mest loyvda ferð á strekkinum, har vanligar T-íbindingar og/ella rundkoyringar verða, av tí at talan verður um bygt øki á báðum síðum av vegnum.
d) **at** tá ársmiðalferðslan í framtíðini fer upp um 18.000 bilar um samdøgri, ella onnur ferðsluviðurskifti viðføra ónøktandi framkomiligheit, kann ferðin um neyðugt hækkast til 80 km/t, samstundis sum íbindingarnar kunnu endurskoðast, og støða takast til um vegurin skal gerast 4-sporaður.

**2. Íbinding við tunnil hjá P/F Skálafjarðartunnilin**

Vísandi til §5, stk. 3, litra 6 í *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir*, og *Almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu* verður mælt til:

a) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa tekningar og nærri upplýsingar, um hvussu veganetið á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi verður broytt í sambandi við tunnilsverkætlanina hjá P/F Skálafjarðartunnilin, til góðkenningar.

b) **at** seta fram krav til P/F Skálafjarðartunnilin og Landsverk um at fáa neyvar tekningar og upplýsingar um hvørjar kommunalar og privatar jarðarognir verða ávirkaðar av broytingunum av veganetinum á Kaldbaksvegnum og til havnina á Sundi.

**3. Íbinding/frákoyring við núverandi Hvítanesvegin**
Mælt verður til:
a) **at** biðja Landsverk um neyvar tekningar og frágreiðing, um hvussu íbindingin/frákoyring millum nýggja landsvegin og Hvítanesvegin verður gjørd, til góðkenningar.

**4. Íbinding við vinnuøkini Sandvíkahjalli, Skarðshjalli og Ovari Hjalli**
Mælt verður til:
a) **at** kommunan útvegar sær lendi til vinnuøkið á Ovara Hjalla umframt lendi til vegaatkomu frá Hvítanesvegnum niðan á Ovara Hjalla og lendi til gerð av rundkoyring við Hvítanesvegin.
b) **at** kommunan letur gera útstykkingarætlan og tekniskt projekt fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla
c) **at** kommunan letur gera kanningar av íbinding í nýggja innkomuvegin, og leggur av lendi til antin íbinding við rundkoyring ella T-kross íbinding á økinum við Ovara Hjalla. Víst verður í hesum sambandi eisini til omanfyri standandi pkt. 1a.

**5. Planskyld íbinding við Stórutjørn**
Mælt verður til:
a) **at** takað undir við uppskotinum hjá Landsverk um at gera planskylda íbinding við Stórutjørn, vísandi til væntandi nógva ferðslu og virksemi á hesum øki.
b) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar, og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**6. Flytan av atkomuvegnum við Stórutjørn**
Sambært upprunaligu linjuføringini, sum Tórshavnar kommuna ikki hevur fingið til ummælis, kom landsvegurin at ganga gjøgnum tjørnirnar á økinum. Samstundis hava interessentar í økinum sett fram ynski um at fáa landsvegalinjuna flutta 50 m longur vestur – tvs. burtur frá Stórutjørn. Onki er til hindurs fyri hesum.

Tí verður mælt til:
a) **at** landsvegurin verður fluttur 50 m longur vestur á økinum við Stórutjørn.
b) **at** nýggi sambindingarvegurin verður longdur tilsvarandi 50 m.
c) **at** kostnaðurin fyri arbeiðið verður at rinda av interessentunum, sum ynskja flyting av vegnum.

**7. Íbinding við Flatarvegin, Sundvegin og Villingardalsvegin**
Tað verður mett serstakliga umráðandi, at tað á vegastrekkinum frá Stórutjørn til Oyggjavegin verða tikin atlit til verandi kommunala veganet, og hvussu ferðslan av landsvegnum verður fordeild eftir verandi vegum inn til Vegin Langa og haðani víðari til Norðara ringvegin. Hetta fyri at høvuðsstaðurin eisini kann fáa veruliga nyttu av nýggja landsvegnum. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **at** fram til 2010, tá hesin parturin av landsvegnum eftir ætlanunum hjá Landsverk verður liðugur, verða Flatavegur, Sundsvegur og Villingardalsvegur bundnir í landsvegin beinanvegin og at teir partar av vegnum sum eru lidnir, sostatt verða nýttir beinanvegin.

b) **at** fyri tíðarskeiðið aftan á 2010 skulu minst 2 av teimum 3 verandi vegunum á staðnum – t.e. Flatarvegurin, Sundsvegurin og Villingardalsvegurin, verða íbundnir landsvegin við vanligum T-kross íbindingum, so leingi ársmiðalferðslan ikki ger tað neyðugt at gera annað slag av íbindingum.
c) **at** nóg stórt øki skal verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera ferðslutekniskt hóskandi íbindingar har um leiðir, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar ella um onnur ferðsluviðurskifti gera tað neyðugt, so sum ónøktandi framkomiligheit o.l.
d) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um allar íbindingar og útreiðlsubýtið í sambandi við hesar.

**8. Tunnilsloysnir við Villingardalsvegin**

Tekniska umsitingin vísir á, at við tí vegalinju, sum nú er kend, eru tað ikki ferðslutekniskar orsøkir til at gera tunnil við Villingardalsvegin. Tekniska umsitingin staðfestir eisini, at tað eru ikki annarleiðis umhvørvislig atlit at taka á økinum við Krákugjógv enn aðrastaðni fram við landsvegnum, tá talan er um frástøðu frá bygdum øki, náttúruviðurskifti o.l. Hetta er m.a. grundað á simuleringar av óljóði frá landsvegnum, sum Landsverk hevur latið gera, og hevur lagt fram fyri limirnar í byggi- og býarskipanarnevndini, teknisku nevnd og heilsu- og umhvørvisnevndini. Tekniska umsitingin metir tí, at nyttuvirknaðurin av einum tunnli einans við ovasta part av Villingardalsvegnum ikki svarar til ein meirkostnað á kr. 20-30 mió. í kommununar part, samsvarandi skrivi frá Føroya landsstýri og eini leysligari kostnaðarmeting. Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **ikki** at gera tunnil bert við ovara part av Villingardalsvegnum.
b) **at** Landsverk verður biðið um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein longri tunnil líka frá ovara parti av Villingardalsvegnum vestureftir undir Húsareyn, sum kemur útaftur vestan fyri Hotel Føroyar.
c) **at** samráðingar verða tiknar upp við Landsverk um útreiðslubýtið.

**9. Íbinding í verandi veganet undir Krákugjógv**

Tann 2-sporaða fyribilsloysnin hjá Landsverk við íbinding beinleiðis í vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen verður als ikki mett nøktandi, tí hon verður ikki mett at beina ferðsluna inn á Norðara ringveg/Marknagilsvegin á ein tryggan og forsvarligan hátt.
Tann 4-sporaða framtíðarloysnin í uppskotinum hjá Landsverk, tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000 bilar, er ein planskyld íbinding við landsvegin, sum førir til eina rundkoyring á Norðara ringvegnum. Henda loysn tykist heldur kroyst og trupul á staðnum, og tekniska umsitingin ivast tí í, um hetta fer at virka nóg væl til at koyrandi fara at brúka hesa íbinding í so stóran mun, at tað fer at viðvirka til eina góða fordeiling av ferðsluni til og frá Norðara ringvegi.
Á hesum grundarlagi verður mælt til:
a) **at** tá talan er um fyribilsloysnina við 2-sporaða vegnum, verður hildið fast um upprunaligu loysnina, sum er at gera eina íbinding við rundkoyring, og so binda frákoyringina frá rundkoyringini í verandi vegin oman fyri P/F Wenzel Petersen.
b) **at** tá talan er um 4-sporaðu framtíðarloysnina, verður í fyrsta lagi víst til tilmæli til pkt. 8.b um at gera ein tunnil líka frá endanum á Villingardalsvegnum til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar..
c) **í øðrum lagi** verður mælt til at Landsverk, í samstarvi við kommununa, verður biðin um at gera skitsuuppskot, kostnaðarmeting og kost-nyttu kanning av at gera ein styttri tunnil uml. frá st. 6800 til ætlaðu vegaflættingarnar vestan fyri Hotel Føroyar. Hetta tilmæli er grundað á ferðslutekniskar orsøkir, og eigur tí at verða rindað til fulnar av landinum. Landið vil við hesum samstundis spara útreiðslur til ognartøkur, óljóðsverju o.a. á hesi leiðini, eins og tað slepst undan trupulleikanum við verandi

íbindingum í Landsvegin við Brandstøðina, P/F Norðbil, P/F Wenzel Petersen og sethús á umrødda vegastrekki.

d) **at** gjørdar verða kanningar av hvørt Villingardalsvegurin ella ein nýggjur sambindingarvegur millum innkomuvegin og innara ringveg skal gerast fyri at binda saman hesar vegir, um tunnil verður gjørdur jbr. pk.t 9c ella 9d.

**10. Oyggjarvegurin frá Hotel Føroyar til Norðara ringvegin**

Tekniska umsitingin metir, at vegaføringin frá P/F Wenzel Petersen til íbindingarnar vestan fyri Hotel Føroyar, lýkur ikki tær ferðslutekniskur fyritreytirnar fyri einum 80 km vegi við nógvari ferðslu, sum Landsverk annars hevur lagt til grund fyri hesum nýggja landsvegnum sum heild á øðrum strekkjum. Tí verður mælt til:

a) **í fyrsta lagi** at Landsverk ger ein longri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b.

b) **í øðrum lagi** at Landsverk ger ein styttri tunnil jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 9.c.

c) **at** kommunan, sum avleiðing av aðrari av tunnilsloysnunum, yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen.

**11. Vegasamankomingar á økinum vestan fyri Hotel Føroyar**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við at økið vestan fyri Norðbil kann leggjast út til byggilendi, við serstøkum atkomuvegi, nøkulunda soleiðis sum projekterað av ráðgevunum hjá Landsverk.

b) **at** taka upp samráðingar við Landsstýrið/Fiskimálaráðið um keyp av lendi burtur av "antennuøkinum", matr. nr. 1231.

c) **ikki** at gera rundkoyring, men vanliga T-kross íbinding, har núverandi Oyggjarvegurin verður bundin í nýggja landsvegin, grundað við at onki er sum talar fyri, at ferðslan til hetta økið gerst so stór, at neyðugt er við rundkoyring við henda vegkross.

d) **at** nýggj íbinding oman móti býnum verður gjørd við eini stórari rundkoyring heldur enn eini planskyldari íbinding.

e) **at** nóg stórt øki tó verður lagt av, soleiðis at tað uppá sikt er møguligt at gera planskylda íbinding har um leiðir, seinast tá ársmiðalferðslan fer upp um 18.000.

**12. Vegaføring og íbinding í Velbastaðvegin**

Mælt verður til:

a) **fyribils at** taka undir við uppskotinum hjá Landsverk til vegaføring í Havnardali og íbinding í Velbastaðvegin, sum tekniska umsitingin metir vegatekniskt at verða nøktandi.

b) **at** biðja Landsverk um neyvari upplýsingar um hvat vegaføringin og íbindingarnar merkja fyri verandi bygging og vegir í økinum (Velbastaðvegin og vegin út í Havnadal), og somuleiðis fyri framtíðar møguleikarnar fyri bygging og vegum í økinum, áðrenn endalig góðkenning verður givin.

**13. Støðutakan til verandi íbindingar við Oyggjarvegin**

Norðbil, Brandstøðin og P/F Wenzel Petersen hava sum er íbinding í Oyggjarvegin, umframt at einstøk sethús á økinum eisini eru íbundin Oyggjarvegin.

Mælt verður til:

a) **at** tunnil verður gjørdur jbr. tilmælinum til omanfyri standandi pkt. 8.b. ella pkt. 9.c., og at kommunan sum avleiðing av hesum yvirtekur landsvegastrekkið frá Hotel Føroyum oman til P/F Wenzel Petersen, sum so verður kommunalur vegur, jbr. pkt. 10.c.

b) **at** uttan mun til um vegurin verður verandi landsvegur ella verður kommunalur vegur, má avvarðandi eigari av vegnum útvega nýggjar íbindingar fyri allar tær verandi íbindingarnar, sum verða burturbeindar ella fluttar.

**14. Støðutakan til veitingar til el, vatn, kloakk og fjarhita**

Sambært upplýsingum, sum tekniska umsitingin hevur fingið, hevur Landsverk ikki ætlanir um at gera fyrireikingar til at leggja leiðingar til el, vatn, kloakk og fjarhita í landsvegin.

Tekniska umsitingin metir, at tað er óhugsandi at hava ein høvuðsveg, sum fer gjøgnum bygt øki, og sum er myrkur, sum ikki loftar yvirflatuvatninum og ikki tekur hædd fyri brandpostum o.l.

Mælt verður til:

a) **at** krav verður sett fram um, at tílíkar leiðingar skulu leggjast í vegin, eins og gjørt verður aðrastaðni, har landsvegir fara gjøgnum bygt øki, og at samráðingar verða við Landsverk um útreiðslubýtið í hesum sambandi.
b) **at** krav verður sett Landsverk um burturbeining og reinskan av vegvatni, jbr. býráðssamtykt, j. nr. 2005-1437.
c) **at** gera avtalu við Landsverk um at fyrireikingar verða gjørdar til at fjarhitaleiðingar kunnu leggjast í vegkantin.

**15. Støðutakan til gonguteigar og súkklubreytir**

Vísandi til krøv um ferðslutrygd fyri ein slíkan veg, sum fer gjøgnum bygt øki fyri bæði gangandi og súkklandi fólk, verður mælt til:

a) **at** Landsverk letur gera gonguteigar og súkklubreytir, jbr. býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436.
b) **at** hámarksferðin fyri vegastekkið frá planskyldu íbindingini við Stórutjørn til ætlaðu nýggju íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar, verður samsvarandi omanfyri standandi pkt. 1.c

**16. Støðutakan til byggilinju (frástøðu) frá landsvegnum**

Mælt verður til:

a) **at** gera avtalu við Landsverk um eina byggilinju fram við Landsvegnum, sum liggur í eini fjarstøðu á 25 m frá vegmiðju, á øllum vegastrekkinum, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tó verður mælt til at tað í sambandi við byggilinjuna í samráð við Landsverk verður tikin hædd fyri størri fjarstøðu á teimum støðum, har størri íbindingar væntast at koma í framtíðini.

**17. Verja móti óljóði**

Vísandi til pkt. 16 er umráðandi at tað, har nýggi landsvegurin fer gjøgnum býin, ikki koma at liggja stór øki á báðum síðum, sum verða ónýtilig til bygging. Tað eigur at kunna byggjast í øllum førum so nær sum 25 m frá vegmiðju, roknað út frá einum 4-sporaðum vegi. Tí verður mælt til:

a) **at** krav verður sett Landsverk um at verja móti óljóði eigur at verða gjørd fram við vegnum allan vegin frá Kaldbaksvegnum til Havnardal, har lendisviðurskiftini ikki loysa trupulleikan við óljóði við støði í hámarksferðini á vegastrekkinum, jbr. frammanfyri standandi pkt. 1a, og við støði í at óljóð skal verða max 55 dB í eini frástøðu á 15-20 m frá vegmiðju.
b) **at** byggimyndugleikin – t.e. Tórshavnar kommuna – skal góðkenna slíkar ljóðverjur við atliti til útsjónd, tilfar o.a., og at ljóðverjan í minst møguligan mun skal taka burtur útsýnið og møguleikarnar fyri orientering hjá bilførarunum.

**18. Byggimálsviðgerð og avtala við Landsverk.**

Mælt verður til:

a) **at** fráboða Landsverk, at vegurin skal viðgerast og hava loyvi frá Tórshavnar kommunu, sum byggimyndugleiki, sambært *Ll. Nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir,* §5, stk. 3, litra 6 og sambært *K. Nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.*

b) **at** vísa Landsverk á býráðssamtykt um gonguteigar og súkklubreytir j. nr. 2005-1436 og á býráðssamtykt um reinskan av vegvatni j. nr. 2005-1437.

c) **at** gera avtalu við Landsverk um fyribils íbindingar, endaligar íbindingar, projektbroytingar, býtislykil fyri ávísar útreiðslur o.a.

**19. Tíðarætlan og raðfylgja.**

Mælt verður til:

a) **at** taka undir við ætlanini hjá Landsverk at gera vegin lidnan til 2010.

b) **at** gera avtalu við Landsverk um í fyrstu atløgu at arbeiða norðureftir frá har vegurin nú er, og so samstundis at gera tær kanningar v.m. viðv. vegaføringini frá har vegaarbeiðið er komið til nú við endan á Villingardalsvegnum til Oyggjarvegin, vísandi til omanfyri standandi tilmæli í punktunum 7, 8, 9, 10, 11, 12 og 13, og at framhaldið av arbeiðinum suðureftir verður tikið uppaftur, tá nevndu viðurskifti eru loyst.

c) **at** Landsverk og Tórshavnar kommuna í felag arbeiða við at lýsa og loysa omanfyri nevndu viðurskifti, at leggja fyri til endaliga góðkenning seinast 1. desember 2007.

**20. Ferðslutrygdarmeting**

Mælt verður til:

d) **at** projektið viðv. nýggja innkomuvegnum, íbindingar í kommunala veganetið, og fordeilingin av ferðslu frá innkomuvegnum inn á kommunala veganetið, verður latið serkønum at meta um, serliga við atliti til ferðslutrygd.

**Tekniska nevnd 23. mai 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við hesum viðmerkingum:

- Viðv. pkt. 7.b vil ein minniluti, Høgni Mikkelsen, hava at allir tríggir verandi vegir á staðnum skulu bindast í landsvegin.
- Nevndin varð samd um at strika pkt. 8.c.
- Ein minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin viðgjørdi og samtykti at taka undir við tilmælunum til hesi puntk: pkt. 4 a og b, pkt. 6, pkt. 11 a og b, pkt. 12 b, pkt. 14 a, pkt 16, pkt 17 a, og b og pkt. 18 a.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini.

Viðv. pkt. 7b mælir ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, til at allir tríggir vegirnir skulu bindast í landsvegin.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at kanna vegagerð upp á Húsareyn eisini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen og Jan Christiansen í fíggjarnevndini, ið fall við 4 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov og Annika Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Bjarti Mohr.

Síðan varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá Høgna Mikkelsen í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 5 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Katrin Dahl Jacobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen og Høgni Mikkelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Kathrina Frýdal, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

At enda varð samtyktin í fíggjarnevndini einmælt samtykt.

- Umsitingin leggur fram frágreiðing frá Rambøll.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2008:** Grundað á niðurstøðuna í ferðsluanalysu hjá Rambøll & Nyvig A/S frá apríl 2008 (j. nr. 2001-0407/79), samtykti nevndin at heita á umsitingina at taka upp samráðingar við Vinnumálaráðið og Landsverk á hesum grundarlagi:

1. at mest loyvda ferð á innkomuvegnum, á strekkinum frá Stórutjørn (T2) til íbindingina vestan fyri Hotel Føroyar (T8), verður 60 km/t,
2. at flest møguligar íbindingar á nevnda strekki verða gjørdar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. apríl 2008:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 24. apríl 2008:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við leiðlsuni og umboð frá teknisku nevnd havt samskifti við landsstýriskvinnuna í innlendismálum – Anniku Olsen. Eitt av málunum, ið partarnir eru samdir um at royna, er at fáa sett gongd á avtalu, ið fyribils loyvir kommununi at nýta partar av innkomuvegnum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 16. juni 2009:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Kunnað varð um málið, og nevndin ynskir at viðgera málið á næsta fundi tann 4. marts 2010.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. apríl 2010:** Kunnað var um málið.

**Tilmæli:**

Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Á løgtingsfíggjarlógini eru settar av kr. 10 mió. til nýggja innkomuvegin til Tórshavn. Landsverk hevur í hesum sambandi verið á fundi við umsitingina, til tess at finna fram til eina semju um, hvussu arbeiðið kann halda fram, soleiðis at játtanin fyri 2013 verður nýtt. Landsverk er framvegis av tí áskoðan, at nýggi innkomuvegurin skal gerast út frá teimum fortreytum, at hámarksferðin skal verða 80 km/t. Hetta viðførir ymisk dýrkandi krøv til hvussu íbindingarnar skulu gerast uppá sikt, tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, sambært framskrivingum sum gjørdar eru.

Í hesum sambandi hevur serliga verið roynt at finna eina hóskiliga loysn á, hvussu Sundsvegurin kann knýtast í nýggja innkomuvegin, og hevur Landsverk tilevnað eitt uppskot, sum umsiting kommununar metir at verða ein nýtilig loysn, undir teimum umstøðum sum eru á staðnum.

Eisini hevur íbindingin í Oyggjarvegin verið til viðgerðar, og er lagt upp til eina loysn sum er nøktandi í nøkur ár fram. Tá miðalferðslan pr. døgn gerst størri, er neyðugt at taka hesa íbinding upp aftur til nýggja viðgerð.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til fylgjandi:

- at loyva Landsverk at halda áfram við vegagerðini frá brúnni um Hoydalsá og vestureftir
- at taka undir við prinsippuppskotinum til íbindingarloysn við Sundsvegin
- at játtanin hjá Landsverk í ár verður brúkt til at gera íbindingina við Sundsvegin, og at restin av játtanini verður brúkt til at halda áfram við vegagerðini vestureftir, oman móti Krákugjógv
- at gera avtalu við Landsverk um, at framhald av arbeiðinum í 2014 og komandi ár, verður gjørt eystureftir, soleiðis at bundið verður í Kaldbaksvegin, áðrenn hildið verður áfram vestureftir. Hetta fyri at fáa vegasamband frá Kaldbaksvegnum til Sundsvegin liðugt fyrst.

**Tekniska nevnd 16. apríl 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Kunnandi fundur um málið, hevur verið fyri býráðslimum, har umsitingin greiddi frá gongdini í málinum. Eisini var greitt frá fundunum sum umsitingin hevur havt við Landsverk um teknisku viðurskiftini í samband við íbindingar.

Niðurstøðan á kunnandi fundinum varð, at mæla býráðnum til at takað undir við samtyktini í teknisku nevnd 16. apríl 2013, við hesum ískoytistreytum:

- at vegasambandi frá á leið við vatnbrunnarnar við Villingardalsvegin til Hotel Føroyar, verður loyst við tunnli, sum landið rindar og ger sum partur av landsvegnum
- at ein greið avtalað um útreiðslubýtið til íbindinga verður gjørt, har landsmyndugleikarnir átakað sær allan kostnað fyri íbindingarloysnirnar, sum er avleiddur av at Landsverk heldur fast við at talan skal verða um 80 km veg.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd 16. apríl 2013 og ískoytistreytunum sambært ískoytinum til fíggjarnevndarfundin.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin fer saman við umsitingini at kunna um støðuna viðv. Tunnilsvegagerðini og at komuvegnum til Havnar.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 17. mars 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal taka støðu til linjuføringina á atkomuvegnum frá landsvegnum á Hvítanesi, har tunnilsvegurin verður bundin í, til økið undir Krákugjógv og økið oman fyri Hotel Føroyar.
Valið skal verða millum linjuføringina, sum Landsverk og Tunnilsfelagið mæla til, tað er linjuføring fram við útstykkingini á Hjalla og norður móti uppruna atkomuvegnum hjá Landsverk og suður móti Klingruni ella linjuføring fram við útstykkingini Inni á Gøtu og Oman Gil.

Umsitingin kemur at greiða frá fyrimunum og vansum.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016: Nevndin heitti á umsitingina um at koma við einum tilmæli.**

**Ískoyti:**
Borgarstjórin hevur, saman við fyrisitingini, á fundi hin 07.10.2016 gjørt avtalu við Samferðslumálaráðið, treytað av góðkenning frá Tórshavnar býráð, um samlaða yvirskipaða loysn fyri vegaføring, ábyrgdar- og kostnaðarbýti fyri samlaðu vegagerðina í sambandi við innkomuvegin til Tórshavnar.

Avtalan er lýst í sakini 14/01358-182 og við plantekning í 14/01358-183.

Avtalan merkir í høvuðsheitum, at allur vegurin, frá íbinding í Kaldbaksfjarðarvegin norðan fyri Skarðshjalla til Villingadalsvegin, verður landsvegur við ferðmarkinum 80 km/t. Landið skal gjalda allan hendan vegin, og frákoyringar frá honum við Klingruna og Sundsvegin, hesar frákoyringar vera gjørdar sum útflættingar. Landið skal somuleiðis tryggja vegaatgongd til ovara part av Villingadalsvegnum.

Ein vegur verður frá rundkoyringini við Eysturoyartunnilin við Hvítanes til íbinding í rundkoyring á nýggja landsvegnum oman fyri ídnaðarøkið á Sandvíkarhjalla. Hesin vegur og íbindingar verður eisini landsvegur.

Frá Villingadalsvegnum til økið undir Kerjum (við Hotel Føroyar) er, tá ferðslutrýstið ger tað neyðugt, avtalað at gera ein tunnil sum er á leið 1,5 km til longdar. Hesin tunnil skal fíggjast av landinum og Tórshavnar kommunu í felag, helvt um helvt. Talan verður um landsveg, og raksturin verður hjá landinum. Ein sera leys meting av kostnaðinum fyri ein tílíkan tunnil er 100 til 130 mió. kr., har Tórshavnar kommuna tá fer at bera helmingin av kostnaðinum.

Kommununnar partur av vegagerðini í sambandi við fyriliggjandi avtalu um innkomuvegin til Tórshavn er, sera leysliga mett:
Vegur frá Klingruni til Sundsvegin, góðir 800 metrar á 20.000,- kr. pr. metur, kostar 16 mió. kr.

Leinging av Flatarvegnum, frá brúnni niðan til nýggja vegin góðir 120 metrar á 20.000 kr./m, kostar 2,4 mió., og liðugtgerð av 220 metrum á 10.000 kr./m niðan fyri brúnna kostar 2,2 mió. kr.
Leinging og umlegging av Sundsvegnum undir brúnna um Hoydalsá, tilsamans góðir 320 metrar á 20.000,- kr. metur, kostar 6,4 mió. kr. Hetta verður neyðugt at fremja óansæð hvør loysn verður framd.

Samlaði tørvurin á fígging er soleiðis góðar 27 mió. kr. Av hesum skulu tær 16 mió. til Sundsvegin gerast óansæð hvør loysnin verður vald. Verða tær 11 mió. kr. settar upp ímóti kostnaðinum av íbindingunum (3 stk.) og øktu møguleikunum fyri býarmenning norðan fyri landsvegin, talar hetta fyri at avtalan er til fyrimunar fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við avtaluni, og samstundis gera neyðugu fyrireikingarnar til at útbyggja kommunala vegakervið í økinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge tekur undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13469<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## 255/16 Undir Kongavarða – víðkan av útstykking

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 329/16 | 16/03538-8 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 255/16 | 16/03538-8 |

**Málslýsing:**

Keyp av lendi til útstykking frá Búnaðarstovuni.

Neyðugt verður at keypa umleið 46.000m2 av lendið frá Búnaðarstovuni til útstykkingina.

Fyribilsmetingar vísa ein fíggjartørv á umleið 4,3 mill. kr. til lendiskeyp.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at játtaðar verða 4,5 mill. kr. til lendiskeyp.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 4,5 mió. av konto 6175 keyp og søla og at gera makaskiftisavtalu við bóndan.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 256/16 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 14/05161-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 119/16 | 14/05161-3 |
| 14 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 91/16 | 14/05161-3 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 166/16 | 14/05161-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 217/16 | 14/05161-3 |
| 17 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 175/16 | 14/05161-3 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 220/16 | 14/05161-3 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 324/16 | 14/05161-3 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 256/16 | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:
- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.
- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500 $m^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 $m^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 $m^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á
Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða
Viðheft er eisini
Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.
Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50

grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:

- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskipamevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í uppskoti til sáttmála við P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-73), har prosjektering, forkanningar, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda sáttmálauppskoti við P/f Articon metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.284.793,- tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-72) har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararktekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at góðkenna uppskotið til sáttmála og játta kr. 26.284.793,- til gerð av útstykkingini.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 13 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at heimila umsitingini at útvega prosjekt og tilboð uppá at planera grundøkini.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2016:** Samtykt at góðkenna uppskotið til sáttmála og at játta kr. 21.554.795,- til gerð av útstykkingini. Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at útvega projekt og tilboð uppá at planera grundstykkini.
Málið verður beint í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 21.554.795 av konto 6475, ið verður fíggjað við gjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
P/F Articon hevur eftir áheitan latið kommununi tilboð uppá at planera grundøkini, sum koma at liggja fram við útstykkingarvegnum, við skitsum frá býarskipanardeild kommununnar sum fyrimynd.
Tilboðið frá P/F Articon i hevur støði í tekningum, nøgdarútrokningum, metingum v.m. sum P/F Articon sjálvi hava útvegað. Umsitingin hevur ikki havt umstøður at eftirkanna nøgdir o.a.

og má tí endaligi kostnaðurin takast við fyrivarni um, at nøgdirnar sum P/F Articon hevur roknað seg fram til, eru røttu og endaligu nøgdirnar sum eru, tá arbeiðið er liðugt.

Tilboðið frá P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-89) fyri at planera tey 48 grundøkini er uppá kr. 4.952.255,- uttan MVG.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í tilboðnum frá P/F Articon, har trygging, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda tilboði frá P/f Articon metir umsitingin, at arbeiðið at planera grundøkini kann gerast fyri kr. 6.473.816,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-88), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla til at heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um planering av gundøkjunum, við støði í tilboði teirra og innanfyri samlaða fíggjarkarm á kr. 6.473.816,- og at játtaðar verða nevndu kr. 6.473.816,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 3,2 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 stykkini, sum verandi útstykking, sum er í gerð Undir Kongavarða, kann nøkta.

Fyrisiting kommununnar hevur tí fyrireika ávegis uppskot til framhald av útstykkingini vestureftir við umleið 45 grundstykkjum omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða, við íbinding í verandi atkomuvegi í gerð (sí j.nr. 14/05161-96).

Fyrisitingin hevur somuleiðis fyrireika sáttmála við ráðgeva um prosjektuppskot og høvuðsprosjekt fyri kr. 275.000,- í sambandi við framhald av útstykkingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 275.000,- til at prosjektera framhald av útstykkingini Undir Kongavarða, fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016, og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13476<br>Formansins merki: |

# 257/16 Umsókn um bygging (íbúðarhús) á matr. nr. 138di við Karlamagnusarbreyt, Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 221/16 | 16/03242-9 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 326/16 | 16/03242-9 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 257/16 | 16/03242-9 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Umsókn frá Rúna Djurhuus um bygging av íbúðarbygningi, Karlamagnusarbreyt 37 í Hoyvík.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er í umráðispartinum A3 og er umfatað av serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt.
Økið er oman fyri Atlagøtu.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsóknin umfatar bygning í tveimum hæddum:
- Í niðaru hædd eru tríggjar íbúðir og inngongd og bilhús til ovaru hædd.
- Í ovaru hædd er ein íbúð.

Kjallaraútveggir og –skilaveggir eru úr betong.
Skilagólvið yvir kjallara er eisini úr betong.

Sostatt samsvara skilagólv og skilaveggir við kravið fyri slíka bygging.

Grundøkið er 306 $m^2$ og bygningurin er eisini 306 $m^2$.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Atgongd til 3 goymsluøki og til ruskíløt verður frá kommunalum øki í vestara enda

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Sambært serstøku byggisamtyktini fyri økið, skal kommunan gera asfalt- og uppmerkingararbeiðið á felags parkeringsplássum.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Skal ikki viðgerast á øðrum deildum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Skal ikki viðgerast hjá øðrum myndugleikum.

**Skjøl**
16/03242-7 Tekningar

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til, at ganga umsóknini á møti sum eitt frávik og at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við atkomu til goymslurúm frá kommunalum lendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Bjørghild Djurhuus luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Einmælt samtykt.

## 258/16 Útleigan av niðaru hædd av Tórsgøtu 16.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 340/16 | 16/03587-4 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 258/16 | 16/03587-4 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur lýst kjallarahæddina í Tórsgøtu 16, til útleigan. Freistin at søkja var úti 30 september 2016.

Innan freist komu inn 3 umsóknir.

**Listahandil. Sí sjal 16/03587 - 2**
Handilin fer at framleiða og selja rammur, lørift o.a. ( Talan verður um framleiðslu og sølu )
Ætlanin er eisini at bjóða listafólki at vísa fram og selja listaverk í hølunum.
Talan verður um fotolist, málningar, steinprent og plakatir.
Eisini fer at bera til at fáa myndir framkallaðar og innrammaðar á sama stað.
Umsøkjarar vísa á, at teirra ætlanir sampakka við kommununar ætlanir um Tórsgøtu sum eina mentanargøtu.
Handilin kemur at hava opið allar gerandisdagar, umframt til tey tiltøk sum verða fyriskipaði.

**Tapas og coctail barr. 16/03587 - 3**
Umsøkjararnir hava ætlanir um at lata upp eina tapas og coctail barr. Møguleiki skal vera at keypa tapas rættir, bæði sum mat og kaku, og eini 2 – 3 sløg av serligum øli og víni, umframt coctail drykkir.
Talan verður eisini um føroyskan tapas.
Hølini verða innrættað í retrostíli.
Opið verður frá sunnudag til hósdag millum 15 – 22, fríggjadag frá 15-24 og leygardag frá 11 – 01.

**Indisk matstova. 16/03587-5**
Somu umsøkjarar sum ætla at seta á stovn tapas og cotail barr, hava eisini sent inn umsókn um at kunna leiga hølini. Tey kundu hugsa sær at rikið eina indiska matstovu í kjallarahæddini. Æltanin er at hava buffet á miðdegi og um kvøldi, og eisini a la carte. Opið verður allar dagar í vikuni.
Tey vísa til at tey eisini søktu um hølini, tá ið bygningurin var lýstur til útleigan í mai 2016. Tá høvdu tey ætlanir um at leiga allan bygningin, har ætlanin var at reka indiska matstovu.
Vísandi til at bert kjallarin er tøkur til útleigan, hava tey minkað um teirra ætlanir samsvarandi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga hølini út til umsøkjarar sum hava ætlanir um at leiga hølini til matstovuvirksemi.

Hjálagt uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

## 259/16 Eigarafelagið Oman Flat. Viðtøkubroytingar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 343/16 | 16/02163-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 259/16 | 16/02163-2 |

**Málslýsing:**

Eigarafelagið Oman Flat hevur á aðalfund í mei 2015, samtykt viðtøkubroytingar.

Eigarafelagið vísir til hesar samtyktu broygingarnar, sum verða framdar av av praktiskum grundum.

Hesar broytingar vóru samtyktar:

Grein 2 stk. 10: Tá nevndarlimur hevur forfall, gevur hann tiltakslimi fráboðan.
Til: Tá nevndarlimur hevur forfall, gevur hann formanninum fráboðan.
Grein 4 stk. 6: Val av Tveimum tiltakslimum.
Til: Val av møguligum tiltakslimi.
Grein 4 stk. 7: Val av tveimum grannskoðarum.
Til: Val av grannskoðara.

Hjálagdar broyttar viðtøkur sí skjal.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at samtykkja viðtøkubroytingarnar.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 260/16 Áheitan vegna Eigarafelagið Jørundargøta / Torkilsgøta um góðkenning av viðtøkunum, sum blivu broyttar á síðsta aðalfundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 220/15 | 15/02670-5 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 159/15 | 15/02670-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 344/16 | 15/02670-5 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 260/16 | 15/02670-5 |

**Málslýsing:**
Eigarafelagið Løgmannsbreyt, nú Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta, biður um góðkenning av nýggju viðtøkunum fyri Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta, Hoyvík.

Sí nýggju viðtøkurnar í málinum 15/02670/6

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini og byráðnum til at góðkenna nýggju viðtøkurnar fyri Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta, Hoyvík

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

Sambært grein 15 í viðtøkunum fyri Eigarafelagið, hava eigararnir skyldu til at vera við í felags antennuskipan og øðrum tílíkum minni skipanum og at rinda ein lutfalsligan part av íløgu og rakstrarútreiðslunum, um so er, at ein meiriluti eftir býtistali atkvøður fyri tílíkum skipanum.

Eigarafelagið hevur samtykt at strika grein 15 í viðtøkunum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna nýggju viðtøkurnar fyri Eigarafelagið Jørundargøta/Torkilsgøta, Hoyvík.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 261/16 Endurnýggjan av leigusáttmála á matr. nr. 1160b, Tórshavn. Arktisk Kommando.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 342/16 | 16/03847-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 261/16 | 16/03847-2 |

**Málslýsing:**

Verandi leigusáttmáli er frá 01. mei 1967 og var galdandi í 49 ár.

Arktisk kommando hevur søkt um byggiloyvi til uppíbygging av einum bilhúsi á verandi sendarabygning sum stendur á økinum. Vísandi til at verandi leigusáttmálið er útgingin er neyðugt at endurnýggja sáttmálan, um byggiloyvi skal veitast.

Umsóknin um byggiloyvi liggur í máli nr. 15/04880.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at endurnýggja verandi sáttmála at vera galdandi í 20 ár.

Verandi leiga er kr. 50 pr. ár, og verður í endurnýggjaða sáttmálanum 5.000 kr. pr. ár.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 262/16 Átak parkeringspolitikkur - Stovnsetan av gjaldsparkering

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 55/16 | 16/01730-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 100/16 | 16/01730-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 262/16 | 16/01730-1 |

**Málslýsing:**
Kommunuætlanin staðfestir, at Kommunan vil arbeiða fyri at seta í verk gjaldsskipan til parkering í miðbýarøkinum, fyri at fáa størri útskifting á parkeringsplássunum í miðbýnum og fyri at betra parkeringsmøguleikarnar, sum eru í Miðbýnum.

Kommunan stendur yvir fyri stórum avbjóðingum í sambandi við at samferðslu kervið í landinum verður útbygt. Ferðslutrýstið í kommununi økist og eftirspurningurin eftir parkeringsplássum økist tilsvarandi, og gerð av fleiri parkeringsplássum í kommununi krevur stórar fíggjarligar íløgur.

Kommunan hevur tí bráðfeingis tørv á heimild, at seta í verk gjaldsskipan

- fyri at fáa inntøkur til gerð av fleiri parkeringsplássum, so tørvurin kann nøktast
- fyri at fáa eitt gott stýringsamboð, sum gevur betri gagnnýtslu av parkerings plássunum
- fyri at geva brúkarum, sum ynskja tað, eitt gott og trygt parkerings tilboð, móti gjaldi.

Gjaldsparkering kann eisini, frá einum umhvørvis sjónarmiði, fáa fólk, sum ikki ynskja at gjalda fyri at parkera, at velja annan flutnings hátt, ganga, súkkla ella brúka buss ístaðin fyri at parkera í býnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á Løgdeildina um at gera uppskot til broyting av Løgtingslóg av ferðslulógini, so Kommunan fær heimild til at umsita gjaldsparkering.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis verður víst til at sama mál varð samtykt í býráðnum og KSF fyri tíð síðani, um at útvega hesa somu heimild, men at hetta ikki varð gingið á møti.

**Ískoyti:**
Sum mál 2009-1547 vísir, samtykti býráðið, ið sat í 2011, umvegis KSF, at heita á tásitandi landsstýrið, um at bera eitt uppskot í Løgtingið um at fáa útvega kommunum heimild til gjaldsparkering. Málið varð lagt fyri tingið og fall í 2014.

Tórshavnar kommuna stendur, eins og aðrar kommunur í landinum, framvegis fyri stórum avbjóðingum í sambandi við, at samferðslu kervið í landinum verður útbygt, ferðslutrýstið økist og eftirspurningurin eftir parkeringsplássum økist tilsvarandi.

Tí verður mett, at tað skal verða ein sjálvsagdur rættur hjá kommununi, at brúkt gjaldsparkering, sum eitt stýrisamboð til býarplanlegging og gagnnýtslu av

parkeringsplássunum í býnum. Og haraftrat eisini at kunna bjóða teimum eitt tilboð, sum ynskja eina góða og trygga parkeringsloysn.

Talan er ikki um at øll parkeringspláss í kommununi skulu verða fevnd av gjaldsparkeringini. Nærri tilráðing verður gjørd hesum viðvíkjandi seinni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at býráðið **umvegis teknisku nevnd** samtykkir, at heitt verður á Føroya Kommunufelag, um at reisa málið fyri Føroya Landsstýri um at fáa heimild til kommunurnar til at krevja gjald fyri parkering.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 263/16 Dagføring av vatnveiting og gøtuljósum í Syðradali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 335/16 | 16/01666-2 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 263/16 | 16/01666-2 |

**Málslýsing:**
Við ársbyrjan 2016, varð avgjørt at gera ábøtur á gøtuljós og vatnveiting í Syðradali.
Sí mál nr. 16/00369 og nr. 16/01666.

Gøtuljósumvælingin er liðug, og vatnveitingin er komin væl ávegis.

Eftir kommunusamanleggingina varð avtala gjørd við Thorvald Lützen bónda í Syðradali, um at kommunan fekk loyvi at uppseta eitt vatnreinsiverk í kjallaranum á hansara sethúsum, og at kommunan lat eina árliga samsýning á kr. 2.500 fyri hetta.

Nú hevur bóndin ynski um at fáa flutt reinsiverkið í onnur hølir, og vísir á eitt lítið úthús, sum hann er sinnaður at langtíðarleiga kommununi. Við eini umvæling eru húsini væl egnaði til endamálið.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og Tekniski stjórin mæla til, at kommunan umvælir nevndu hús fyri kr. 165.000 (fíggjað av rakstri), og fyri hesa upphædd at leiga húsini í 15 ár. Sí hjálagda uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

- Nú fór Bogi Andreassen

# 264/16 Moldplássið í Kollafirði. Avriggan. (2013-2362)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 55/16 | 14/00832-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 333/16 | 14/00832-8 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 264/16 | 14/00832-8 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | | | 14/00832-8 |

**Málslýsing:**
Kollafjarðar kommuna gjørdi í 1989 avtalu við festara í Kollafirði, um at gera moldtyrvingarpláss í Kollfjarðardali.

Í 2000 var avgerð tikin um framhaldandi at hava tyrvingarpláss í Kollafirði, og varð avtalan við festaran longd. Avtalan fevndi um at slætta ein part, sum var liðugt uppfyltur, og at víðka um tyrvingarplássið longur eystur (j. nr. 2001-0243).

Í februar 2009 álegði Yvirfriðingarnevndin kommununi at rigga moldplássið í Kollfjarðardali av.

Býráðið játtaði 5. nov. 2009 kr. 350.000 til hetta. Hetta var tó ikki nóg mikið, og moldplássið er tí ikki liðugt avriggað enn.

Samstundis var reist mál um staðseting av nýggjum tyrvingarplássi í Kollafirði (j. nr. 2012-0111). Samtykt varð at staðseta hetta vestan fyri Dalánna, t.e. millum Dalánna og uppdyrkingarvegin, ið Royndarstøðin hevur latið gera.

Gjørd varð ein ætlan um at gera og víðka um plássið í stigum. Fyrsta stigið var mett at kosta kr. 4,5 mió., og samlaði kostnaðurin mettur at kosta góðar 12,1 mió.

Býráðið samtykti 13. sept. 2012 at játta peningin til 1. stig. Hin 1. nov. 2012 broytti býráðið tó støðu og samtykti at beina málið aftur í heilsu- og umhvørvisnevndina. (j. nr. 2012-0111).

Síðani málið um støðutakan til staðseting av nýggjum moldplássi í Kollafirði var til viðgerðar, hevur festarin vent sær til kommununa við umbøn um at fáa avriggað verandi moldpláss.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ein samlað kostnaðarmeting vísir ein fíggjartørv á kr. 550.000,-.

Sambært fíggjaryvirliti við framskrivaðum íløgukarmi innan 7175 Renovatión, eru kr. 2.369.000,- tøkar til nýtt tyrvingarpláss í Kollafirði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja kr. 550.000,- til avrigging av verandi moldplássinum av framfluttum karmi fyri moldpláss í Kollafirði og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

Viðv. staðseting av nýggjum moldplássi, verður, í framhaldi av avgerð býráðsins hin 1. nov. 2012 í máli nr. 2012-0111, mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við Búnaðarstovuna og avvarðandi myndugleikar og gera uppskot til avtalu um nýtt moldpláss eystan fyri verandi moldpláss fram við landsvegnum, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 550.000,- til avrigging av verandi moldplássi av framfluttum løgukarmi konto 7175 L0002.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L71005 Moldpláss í Kollafirði, avrigging, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 109.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 265/16 Eftirlitsfrágreiðing 09.06.2016 - Tyrvingarplássið í Húsahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2016 | 48/16 | 16/02610-3 |
| 2 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 207/16 | 16/02610-3 |
| 3 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 56/16 | 16/02610-3 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 265/16 | 16/02610-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 362/16 | 16/02610-3 |

**Málslýsing:**
Umhvørvisstovan var hin 9. juni á eftirlitisvitjan á tyrvingarplássinum í Húsahaga. Í eftirlitisfrágreiðingini biður Umhvørvisstovan kommununa um eina frágreiðing um, hvat ætlanin er við tyrvingini, tá núverandi øki er fult. Frágreiðingin skuldi vera Umhvørvisstovuni í hendi 15. august, men freistin er longd til 1. oktober vegna summarfrítíðina.

Umsitingin vísir í hesum sambandi til mál 16/02171, sum var fyri á fundi í náttúru- og umhvørvisnevndini tann 1. juni 2016, har støðan viðvíkjandi tyrvingarplássinum á Glyvursnesi er lýst.

Tyrvingarplássið í Húsahaga er víðkað í 5 umførum síðani 2003. Verandi øki, sum varð tikið í nýtslu í 2009, fyllist skjótt, og nú verður mett, at plássið verður fult um umleið 2 ár. Hetta økið varð upprunaliga mett at kunna nøkta tørvin í 5-8 ár, t.v.s. til 2014-2017.

Kommunan hevur fyrr samtykt at nýta grótbrotið á Glyvursnesi til nýtt tyrvingarpláss, men økið er ikki tøkt enn, tí ognarviðurskiftini eru ikki fingin uppá pláss. Útbyggingin av Tórshavnar Havn fer eisini at hava við sær, at ikki slepst framat grótbrotinum fyrr enn um umleið 3 ár vegna virksemi í grótbrotinum, og harumframt tekur tað tíð at gera økið klárt til tyrving. Men tá grótbrotið á Glyvursnesi aftaná havnaútbyggingina verður tøkt at nýta til tyrvingarpláss, verður hetta eitt sera vælegnað stað og langtíðarloysn til tyrving, og tískil eigur kommunan sum áður samtykt at staðseta nýtt tyrvingarpláss í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Tískil verður neyðugt at finna eina fyribils loysn til tyrvingina, um verandi økið sum væntað verður fult um 2 ár. Tað er áður kannað (Rambøll, 2005), um til ber at leggja nýtt tyrvingarpláss (ella víðka verandi tyrvingarpláss) í Húsahaganum, men niðurstøðan var, at hetta ikki er gjørligt, tí økið er kleimt inni millum vatnbrunnin og háspenningslinjur og at landslagið annars avmarkar víðkanarmøguleikarnar.

Einasti viðkanarmøguleiki á verandi tyrvingarplássi í Húsahaganum er at tyrva útyvir verandi rottangapláss. Tann loysnin krevur tó sjálvsagt, at viðgerðin av rottangaevju verður flutt á annað stað. Tórshavnar kommuna hevur samtykt og skrivað undir ætlanaravtalu við IRF um at samstarva um og staðseta nýggja rottangaskipan á Hagaleiti í Leirvík, so um hendan ætlanin ber á mál, verður viðgerðin av rottangaevju flutt úr Húsahaganum. Fyrireikingarnar til ætlanina á Hagaleiti eru tó ikki komnar á mál enn, so enn ber ikki til at siga við vissu, um ætlanin gerst veruleiki. Tí kann framvegis verða neyðugt at hugsa um eina "alternativa" fyribils loysn fyri tyrvingina, um rottangaøkið ikki kann flytast. Hendan alternativa fyribils loysn má so verða at finna eitt hóskandi øki til eina fyribils goymslu at leggja tyrvingartilfar á, og so flyta tað aftur á eitt nýtt tyrvingarpláss, tá tað einaferð verður liðugt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13490 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Kommunalu Brennistøðini mæla til at samtykkja omanfyri lýstu ætlan fyri tyrvingarpláss, t.v.s.

- **Langtíðarloysn:** Framtíðar Tyrvingarpláss verður í grótbrotinum á Glyvursnesi, tá ið økið verður tøkt aftaná Havnaútbyggingina.
- **Fyribils loysn A:** Tá ið verandi øki er fult, heldur tyrvingin áfram inn yvir verandi rottangapláss. Rottangaviðgerðin verður flutt á Hagaleiti í samstarvi við IRF.
- **Fyrbils loysn B:** Um rottangaviðgerðin ikki kann flytast, áðrenn tyrvingarøkið verður fult, verður eitt hóskandi øki funnið, helst innanfyri verandi tyrvingarpláss, har tilfar at tyrva kann leggjast á fyribils goymslu, og síðani verður tilfarið flutt aftur á eitt nýtt tyrvingarpláss, tá tað verður tøkt.

og at umsitingin sendir frágreiðing til Umhvørvisstovuna samsvarandi hesum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. september 2016:** Nevndin kann ikki góðtaka verandi støðu á tyrvingarplássinum og heitir tí á býráðið um beinanvegin at skipa soleiðis fyri, at tyrvingarplássið kann flyta út í grótbrotið á Glyvursnesi sum skjótast.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Neyðugt er at taka málið uppaftur, tí upplýsingar manglaðu.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Nevndin vísir til samtyktina 1. september 2016 og heitir á býráðið um at ogna sær verandi grótbrot á Glyvursnesi til tyrving beinanvegin.
Nevndin samtykti eisini at góðtaka uppskotið til fyribilsætlan á verandi tyrvingarplássi, meðan nýtt tyrvingarpláss á Glyvursnesi verður gjørt.

**Ískoyti:**
Greitt verður frá málinum.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 266/16 Uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1038bk, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 219/16 | 16/02631-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 266/16 | 16/02631-1 |

**Málslýsing:**
Kári Thomsen, ark. søkir vegna eigaran av matr. nr. 1038bk, Jóhannes Berg, um loyvi at byggja 6 smærri íbúðir í eini lon í einari hædd við lágari reising. Umsóknin varð viðgjørd á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini tann 27. mai 2016. Nevndin samtykti, at serstøk byggisamtykt skal gerast, sum loyvir íbúðum. (j. nr. 15/04134).

Býarskipanardeildin hevur nú gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 1038bk, til 6 íbúðir og tilhoyrandi parkeringspláss.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna serstøku byggisamtyktina og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 267/16 Hitapottar o.a. til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 19.09.2016 | 236/16 | 16/03404-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 320/16 | 16/03404-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 267/16 | 16/03404-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 286/16 | 16/03404-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til samtykt hjá mentamálanevndini 30. august 2016 í máli 16/01711 Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali har nevndin heitir á um umsitingina um at leggja mál um hitapottar sunnanfyri svimjihøllina og russjibana til smábørn fyri nevndina á næsta fundi.

Umsitingin hevur innleiðandi kannað málini.

Viðv. russjibana fyri smábørn
Sí í fylgiskjali 1 tvey uppskot til russjibana. Kostnaðurin fyri uppskot 1 er kr. 124.608 (SEK160.000) , hartil kemur kostnaður til uppseting og frakt, mett til 20.000. kr, umframt kommunalt MVG. Samanlagt kr. 154.896.

Svimjihøllin kann í rakstrinum fyri 2016 bera kr. 84.896 av kostnaðinum.

Viðv. hitapottum sunnanfyri høllina
Sí í fylgiskjali 2 mynd av staðsetingini. Á fundinum kemur umsitingin at gjøgnumganga meting viðv. kostnaði fyri teknisku loysnina fyri 2 heitar pottar og 1 kaldan pott, umframt meting viðv. gerð av tilbygningi til endamálið. Í høvuðsheitum ein loysn við glasi. Eisini hevur verið umhugsa ein loysn har talan er um okkurt slag av hegni ella lágari facadu, men ikki við taki heilt ella lutvíst ella eina loysn har dragihurðar eru og sum kunnu vera latnar upp við høvi. Mett verður at ávísar avbjóðingar vera við ikki at hava tak, herundir serliga viðv. reinføri og reingerð vm.

Við fyrivarni verður mett at ein góð loysn kann fáast fyri umleið kr. 3.500.000 íroknað projektering, ráðgeving, eftirlit, ókent og kommunalt MVG.

Fígging er í verandi støðu ikki sett av til endamálið.

**Tilmæli**
Viðv. russjibana til smábørn
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða ætlanina og avgera um arbeiðast skal víðari við verkætlanini og við atliti til restfígging á kr. 70.000.

Viðv. hitapottum
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðari mæla mentamálanevndini til at umrøða ætlanina og meta um grundarlag er fyri at menna verkætlanina víðari og við atliti til fígging á kr. 3.500.000.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | | Blað nr.: 13493 |
| | | Formansins merki: |

**Mentamálanevndin 19. september 2016:** Samtykt at játta kr. 1,6 mió. til russjibana til smábørn og uttandura hitapottar av kontu 5775 Ítróttaranlegg, løgukarmi ætlað langhyli og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 268/16 Nevndarviðgerð : Dagføring av Sundsvegnum frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar (2008-1294)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 92/16 | 16/03497-23 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 346/16 | 16/03497-23 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 268/16 | 16/03497-23 |

**Málslýsing:**
Ráðgevingarfyritøkan Rambøll Nyvig hevur gjørt eina ferðslugreining í sambandi við nýggja Innkomuvegin til Havnar, sí j. nr. 2008-1292/1. Í framtíðini verður ársdøgnmiðalferðslan eftir Sundsvegnum umleið 18.000 akfør.

Tekniska fyrisitingin er komin til ta niðurstøðu á innanhýsis fundi, at tað er neyðugt at dagføra verandi vegastrekki frá Vestara Ringvegi til Innkomuvegin til Havnar. Víst verður til kort av verandi Sundsvegi, sí j. nr. 2008-1293/1.

Neyðugt er at biðja ráðgevingarfyritøku gera eitt dispositiónsuppskot av eini dagførdari linjuføring av Sundsvegnum. Eitt tílíkt uppskot er mett at kosta umleið kr. 500.000,-.

Í hesum sambandi fer umsitingin at heita á teknisku nevnd, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, at játta neyðuga peningin til endamálið.

Tekniska nevnd skal taka støðu til fygljandi
1. Játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot
2. Skal projekteringsarbeiðið bjóðast út?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til dispositiónsuppskot umvegis fíggjarnevndina og býráðið, og at bjóða projekteringsarbeiðið út til fleiri ráðgevar.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at fíggingin verður játtað av íløgum í 2008.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at flyta kr. 500.000,00 av íløgujáttanini til gøtu til Hvítanes.

**Býráðið 26. mai 2008:** Atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.
Ímóti atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen og Anfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Inga Dahl, Bjarti Mohr og Jan Christiansen,

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt. Í staðin fyri at halda á við projekteringini sambært ávístari játtan í býráðnum 26.05.08 (smb j. Nr. 2008-1294), verður í staðin fyri mett betur, at peningur verður játtaður til keyp av lendi. Samlaði kostnaðurin fyri at fáa útvegað lendi til rundkoyringina er uml. kr. 650.000,-.

**Tilmæli:**
Vísandi til at Føroya Løgting ikki hevur sett pening av til íløgur í innkomuvegin til Havnar, er projektið til dagføring av Sundsvegnum ikki so átroðkandi sum upprunaliga. Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at játta restupphæddina av játtaðu kr. 500.000,- frá 26.05.2008, sum er áljóðandi 385.116,- pr. 1. februar 2009, til mál nr. 2005-2344 til keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanum at byggja tónlistarskúla á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið, skal støða takast til um ikki Sundsvegurin skal dagførast til væntandi øktu ferðsluna, ið fer at verða við íbindingina til Sundsvegin. Samstundis skal støða eisini takast til um ikki fjarhitaleiðing skal leggjast frá Berjabrekku at knýta til tónlistarkúlan, mgl. svimjihøllina, Norðurlandahúsið og Gundadalsøkið.

Sum støðan er í dag, eru uml. 800 húski í Hoyvíkshaganum knýtt at fjahitafelagnum, sum fær ókeypis orku frá kommunalu brennistøðini. Umleið 40% av samlaða orkuframleiðsluni verður ikki gagnnýtt, og tískil skuldi verið rúm fyri at veitt orku til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til, at nevndin, umvegis fíggjarnevndina og býráðið, raðfestir avseting av kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot við útgreinan av kostnaði fyri dagføring av Sundsvegnum við atliti til at leggja nýggjar fjarhitaleiðingar til Norðurlandahúsið, komandi tónlistarskúla umframt alt Gundadalsøkið, á íløguætlanini fyri 2012.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

Sjúrður Olsen luttók ikki.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 8. september 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Settar eru 2 mió. kr. av til dagføring av Sundsvegnum fyri fíggjarárið 2012 (§6 konto 8175).

**Tilmæli:**
Vísandi til býráðssamtykt frá 8. sept. 2011 um at raðfesta kr. 400.000,- til at gera skitsuuppskot, mæla tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini til at játta kr. 400.000,- av íløgum fyri 2012 (§6, kto. 8175) til projektering av skitsuuppskoti við kostnaðarmeting at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 1. desember 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2011:** Samtykt at játta kr. 400.000 av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 14. desember 2011:** Jákup Símun Simonsen luttók ikki í viðgerðini av hesum máli. Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, latið gera uppskot til linjuføring av Sundsvegnum. Talan er um 2 ymisk uppskot á strekkinum millum vegamótið Gæsugøta/Sundsvegur og rundkoyringina við Norðara Ringveg.

Ráðgevin kemur á fundin at leggja fram og greiða frá fyrimunum og vansum viðvíkjandi uppskotunum.

**Tekniska nevnd 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við linjuføringini í framlagda uppskotinum frá Verkfrøðingastovuni, TK, Sundsvegur S, VFS 06.07.2012 og at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.
Nevndin samtykti eisini at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðið 13. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Nú tað røkist fyri at ætlaðu broytingarnar í byggisamtyktini fram við Sundsvegnum fáa gildi í næstum, ætlar fyrisitingin at fara undir eina kunningar/samskiftis/samráðingar tilgongd við matrikulánararnar fram við Sundsvegnum, um skipan av vegatkomum og lendinum fram við vegnum, sum eisini kann gerast útgangsstøði fyri serstøkum byggisamtyktum fram við vegnum.
Í hesum sambandi hevur fyrisitingin heitt á Verkfrøðingastovuna um at lata kommununi tilboð uppá at gera longdarskurð í linjuføringina, sum tekniska nevnd hevur samtykt at taka undir við, og at gera tværskurð í komandi vegin og tún, sum lýsir atkomuviðurskiftini frá verandi vegi og frá lidna vegnum hjá einstøku matrikulánarunum, fram við dagførda vegnum.
Verkfrøðingastovan sigur seg kunna átaka sær at lýsa nevndu atkomuviðurskifti og gera nevnda longdarskurð í góðkendu linjuføringina fyri kr. 236.000,- excl. MVG (sí j. nr. 2012-0370/25), ella kr. 250.750,- tá 6,25% MVG er íroknað.

Av teimum kr. 400.000,-, sum býráðið hin 14. desember 2011 samtykti at játta av íløgum fyri 2012 av konto 8175 til projektering av skitsuuppskoti, eru kr. 151.615,- ikki nýttar og íresta sostatt kr. 99.135,- fyri at kunna taka av omanfyri nevnda tilboði frá Verkfrøðingastovuni.

Eisini arbeiðir fyrisitingin við at skipa og samskipa parkering, atkomur og ferðslu fyri ávikavist ætlaða musikkskúlaøkið og grannamatriklum.

Verkfrøðingastovan hevur mett um samlaða kostnaðin til 21,3 mió. excl. MVG (sí j. nr. 2012-0370/25), fyri at dagføra teir 562 metrarnar av Sundsvegnum, millum verandi innkoyring til rennibreytina og niðan til bakaríið Mylnan, har kostnaðurin fyri fjarhita og serstakar matrikulloysnir ikki er íroknaður. Hetta svarar til ein mettan kostnað á umleið kr. 37.900,-, excl. MVG, fyri hvønn metur av dagførdum vegi.
Kostnaðarmetingin frá Verkfrøðingastovuni er gjørd við fyrivarni fyri hvussu verandi fylla í vegnum er skikkað, nøgd av hellu at spreingja v.m. og er somuleiðis treytað av at vegurin er stongdur fyri gjøgnumferðslu, meðan arbeiðið fer fram.

**Fíggjarlig viðurskifti.**

Fyri at sleppa undir at gera projektuppskot sambært omanfyri standandi, er neyðugt at fáa játtað kr. 100.000,- av markaðum íløgum fyri vegir í 2013 – álj. 6 mió. kr. Eftirfylgjandi gerð av høvuðsprosjekti er fyribils mett til kr. 1.000.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 1.100.000,- av íløgum fyri 2013 (§6, kto. 8175) soleiðis at farast kann undir at gera projekt-uppskot og síðani, tá prosjektuppskotið er góðkent, at gera høvuðsprosjekt, og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið. Somuleiðis verður mælt til at restin av avsettu upphæddini á fíggjarætlanini fyri 2013 - 4,9 mió. verður standandi til írestandi fígging verður tøk til at fremja verkætlanina, eins og mælt verður til at tekniska nevnd, fíggjarnevndin og býráðið taka støðu til raðfesting av mettu írestandi upphædd á. uml. 13,3 mió. á langtíðar íløguætlan kommununar.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L81009 Sundsvegur dagføring skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 272.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13498<br><br>Formansins merki: |

## 269/16 Yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir - um at gera upp og loka (2010-2717)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 93/16 | 16/03499-24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 345/16 | 16/03499-24 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 269/16 | 16/03499-24 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við viðgerina av fíggjarætlanini fyri 2011 (j. nr. 2010-0547), legði borgarstjórin á býráðsfundi hin 11. nov. 2010 fram yvirlit yvir lidnar og aðrar verkætlanir (j. nr. 2010-2717/1), – ið heitt verður á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka og síðani at leggja fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein meiriluti í býráðnum samtykti at taka undir við at heita á avvarðandi nevndir um at gera upp og loka slíkar verkætlanir.

Á tekniska økinum er talan um niðanfyristandandi verkætlanir at gera upp og loka:

| **§ 6** | **Teknisk mál fríðkan** | | | | | **Nevnd** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 1.503 | | | BB |
| | 6275 | Kamping | 518 | | | BB |
| | 6275 | Søluplássi í Vágsbotni | 462 | | | HU |
| | | *Kongabrúgvin* | | 1.000 | | BB |
| | | *Torg við Perluna og Reinsarí'ið* | | 300 | | BB |
| | | *Søluplássið í Vágsbotni* | | 183 | | HU |
| | | *Vaglið* | | 1.000 | | BB |
| | | Nýggj saldo | | | - | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| **§ 6** | **Teknisk mál Kirjugarðar og vegir** | | | | | **Nevnd** |
| | | Saldo lidnar verkætlanir | 2.126 | | | TN |
| | | *Viðskiftahús í Kirkjubø* | | 1.000 | | TN |
| | | *Frílendi til borgaran* | | 226 | | TN |
| | | *Glyvursvegur við brúgv* | | 400 | | TN |
| | | *Ferðslutrygdarætlan* | | 500 | | TN |
| | | Nýggj saldo | | | - | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við at loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. november 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Marin Katrina Frýdal og Jan Christiansen vóru ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum og loka lidnar og aðrar verkætlanir, og at játta peningin til aðrar verkætlanir sambært omanfyri standandi yvirliti.

**Býráðið 16. desember 2010:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 27. januar 2011:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin L81007 Ferðslutrygdarætlan, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop uppá kr. 77.000.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 270/16 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki undir Kongavarða

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 240/16 | 16/03561-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 270/16 | 16/03561-1 |

**Málslýsing:**
Nú gongd er komin í útstykkingina undir Kongavarða, er tað neyðugt at hyggja eftir byggisamtyktini fyri økið.

Í dag er økið samansett av A3-bústaðraøki, C3-miðstaðarøki, B3-vinnuøki og 4. grundumráði.

Rað- og íbúðarhúsini, sum Valbjørn Dalsgaard bygdi, liggja fyri størsta part í C3-øki, tó undantikið 6 tey vestastu raðhúsastykkini, sum ikki eru ábygd enn, ið liggja í 4. grundumráði.

Nýggja útstykkingin, sum kommunan er í gongd við, liggur fyri størsta partin í A3 øki, ein lítil partur liggur tó í 4. grundumráði.

Næsta útstykkingin sum ætlanin er at fara í gongd við, liggur í B3-vinnuøki og 4. grundumráði.

Løgdeildin er í samráðingum við Búnaðarstovuna um keyp av parti av 4. grundumráði til komandi útstykkingina.

Býarskipanardeildin mælir til, at broyta byggisamtyktina soleiðis, at B3-økið og C3-økið verða broytt til A3-øki og tann parturin, sum verður keyptur frá Búnaðarstovuni, eisini verður broyttur frá 4. grundumráði til A3 øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri økið undir Kongavarða verður broytt frá B3-øki, C3-øki og 4. grundumráði til A3 øki sambært korti, dagfest 21.09.2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 271/16 Torgunn Kragesteen og Jan á Argjaboða : Áheitan um at broyta byggisamtyktina fyri partar av matr. nr. 1a, Velbastað frá H frílendi til B sethús

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 113/14 | 14/00822-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 239/16 | 14/00822-2 |
| 3 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 17.10.2016 | 8/16 | 14/00822-2 |
| 4 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 271/16 | 14/00822-2 |

**Umsókn um broyting av byggisamtyktini fyri Velbastað, Jan á Argjaboða.**
Torgunn Kragesten og Jan á Argjaboða hava í skrivi, dagfest 8. januar 2014, søkt um broyting av byggisamtyktini fyri 175 m$^2$ av matr. nr. 1a á Velbastað. Hetta er í sambandi við byggimál, j. nr. 14/00307, har tey fingu noktað at byggja út, av tí at nýtslustigið ikki lýkur treytirnar í byggisamtyktini fyri Velbastað. Umsøkjarin kærdi avgerðina hjá kommununi inn fyri kærunevndina í lendismálum. Málið er nú avgreitt í nevndini í lendismálum, ið gav kommununi viðhald.

Grundøkið, matr. nr. 14, Velbastaður, liggur í útjaðaranum av bygdini og markar upp til festijørð. Fyri at lúka treytirnar um nýtslustig í byggisamtyktini fyri Velbastað, hevur umsøkjarin fingið loyvi frá festaranum, Tórfinn Dalsgarð, og Búnaðarstovuni til at keypa 175 m$^2$ av grannaognini, matr. nr. 1a, Velbastað. Fyri at leggja hesar 175 m$^2$ afturat grundøkinum, er neyðugt at broyta byggisamtyktina frá H-frílendi til B-sethúsaøki.

Landsstýrið hevur í sambandi við smærri broytingar í byggisamtyktini boðað frá, at byggisamtyktir ikki eiga at verða broyttar til fyrimuns fyri einstakan borgara. Hetta skal tó metast um fyri tær einstøku umsóknirnar. Her snýr tað seg um eitt lítið grundstykki (uml. 180 m$^2$), í útjaðaranum av eini bygd, við einum eldri sethúsum, sum verða dagførd.

**Tilmæli:**
Vísandi til støðu landsstýrisins sum góðkennandi myndugleiki, mælir tekniski stjórin frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til, at hetta snýr seg um eitt lítið grundstykki (uml. 180 m$^2$), í útjaðaranum av eini bygd, við einum eldri sethúsum, sum verða dagførd. Hinvegin verður mælt til, at umsitingin kannar møguleikarnar fyri eini skipaðari víðkan av byggiøkjum á Velbastað, og møguligum broytingum av byggisamtyktini í hesum sambandi.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Jan á Argjaboða hevur gjørt avtalu við Búnaðarstovuna um keyp av uml. 226 $m^2$ av matr. nr. 1a á Velbastað, at leggja saman við matr. nr. 14 (j. nr. 14/00493). Grundin til hetta er, at eitt rættarmál um um- og útbygging av sethúsunum á matr. nr. 14, endaði við semju um, at eigarin av ognini keypir part av matr. nr. 1a (j.nr. 14/00307).

Í byggisamtyktini fyri Velbastað liggur matr. nr. 1a í B-sethúsaøki og matr. nr. 1a í H-frílendi. Treytin frá Umhvørvisstovuni fyri at frábýta og leggja saman er, at økini liggja í sama umráðisparti. Tí mælir býarskipanarnevndin til, at byggisamtyktin fyri Velbastað verður broytt fyri uml. 225 $m^2$ av matr. nr. 1a, Velbastað frá H-frílendi til B- sethúsaøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggisamtyktin fyri Velbastað verður broytt fyri uml. 225 $m^2$ av matr. nr. 1a, Velbastað frá H-frílendi til B- sethúsaøki sambært korti dagfest 19.09.2016.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin 17. oktober 2016:** Nevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 272/16 Uppskot til broyting av ásetingum í serstøku byggisamtykt nr. 3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 241/16 | 16/03623-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 272/16 | 16/03623-1 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við tilgongdina um sølu av bygninginum á Húsagøtu 3, matr. nr. 736æ, Tórshavn, til Bygningsstyrelsen ætlandi til politistøð, hava ynskir verið um at byggja eina hædd omaná bygningin.

Økið, har bygningurin liggur, er regulerað í serstøku byggisamtykt nr. 3 og liggur í umráðispartinum B1. Í serstøku byggisamtyktini er ikki ásett mest loyvda byggistig ella nýtslustig, men bert at tað kann byggjast eftir eini heildarbyggiskipan.

Í almennu byggisamtyktini liggur økið í umráðispartinum C1. Her er ásett eitt byggistig uppá 0,4 og eitt nýtslustig uppá 0,8.

Tað er hesum nýtslustignum man hevur hugt eftir, tá kommunan ikki hevur kunnað givið váttan um at byggja eina hædd omaná bygningin.

Verandi nýtslustig á bygninginum á Húsagøtu 3 er 0,67. Um ein hædd verður bygd omaná, verður nýtslustigið 0,9 og um bygningurin eisini verður útbygdur við einum dekki, sum ætlanin var, verður nýtslustigið 1,1.

Í sama øki liggur SMS, sum hevur eitt mett nýtslustig uppá 1,25 og eitt byggistig uppá uml. 0,52. SMS hevur eisini ynski um eina útbygging uppá uml. 600 $m^2$ í 3 hæddum. Hetta gevur eitt nýtslustig uppá 1,4 og eitt byggistig uppá 0,57.

Vanliga verður ikki loyvt eitt hægri byggi- og nýtslustig í nýggjum serstøkum byggisamtyktum, enn ásett er í almennu byggisamtyktini fyri øki, sum liggur undir serstøku byggisamtyktini.

Her er talan um eina gamla serstaka byggisamtykt, sum er eldri enn almenna byggisamtyktin og umfatar eitt stórt øki.

Býararkitekturin metir, at tað er rætt at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 3, við at áseta byggi- og nýtslustig, samsvarandi verandi umstøðum í økinum. Og eisini at áseta hvussu nógvar hæddir bygningarnir í økinum kunnu verða.

Skotið verður upp at ”1 gr. Bygging, stødd, staðseting og skapilsi húsanna o.a.” verður broytt soleiðis
c. Mest loyvda byggistig á eindini B1 er 0,6
d. Mest loyvda nýtslustig á eindini B1 er 1,5
e. Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 4 hæddum íroknað kjallarahædd

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at 1.gr. í serstøku byggisamtykt nr. 3 verður broytt við at áseta byggi- og nýtslustig og hvussu nógvar hæddir bygningarnir í økinum kunnu verða, fyri B1-økir.

c. Mest loyvda byggistig á eindini B1 er 0,6
d. Mest loyvda nýtslustig á eindini B1 er 1,5
e. Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 4 hæddum íroknað kjallarahædd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

**Fyri atkvøddu:**
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

**Greiddu ikki atkvøðu:**
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal.

## 273/16 Umsókn um, at kommunan yvirtekur part av Áarrás, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 39/16 | 16/00390-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 347/16 | 16/00390-3 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 273/16 | 16/00390-3 |

**Málslýsing:**
Ánarin av vegøkinum matr. nr. 34l, Argir sum er partur av Áarrás, hevur vent sær til Tórshavnar kommunu við áheitan um, at kommunan yvirtekur part av privatum vegøki á matr. nr. 34l, Argir.

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur (j. nr. 16/00390-2).

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at boðað verður umsøkjaranum frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka vegøkið, ið er fevnt av nevndu matriklum uttan kostnað fyri kommununa, tá umsøkjararnir hava fingið til vega tilfar og undirskriftir, ið eru neyðugar fyri at tinglesa ánaraskifti. At tilsøgnin er galdandi í 1 ár og at málið verður beint um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

# 274/16 Umsókn um at tórshavnar kommuna yvirtekur Baraldsgøtu matr. 1363 Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 79/16 | 16/00820-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 348/16 | 16/00820-5 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 274/16 | 16/00820-5 |

**Málslýsing:**
Ein av ánarunum í Baraldsgøtu, hevur søkt um at kommunan yvirtekur vegøkið, sum er matr. nr. 1362c, Tórshavn, íalt 2043 fermetrar til víddar.

Umsøkjarin er ikki greiður yvir hvør eigur Baraldsgøtu. Tað er Sp/f Bjarni Poulsen (nr. 4212) sum stendur sum ánari av vegnum. Felagið er farið í konkurs, við Christian Andreasen, adv. sum bústjóra. P/F BankNordik hevur skaðaloysisbræv í matriklinum og stendur harumframt sum eigari av økinum norðan fyri við tilknýti til hendan vegin (matr. 1362a).

Umsiting kommununnar hevur støðulýst vegøkið og kostnaðarmett møguligar ábøtur og manglar (j. nr. 16/00820-4). Meting er fyri asfaltering av slitlagi fyri 659.200,- kr., fyri asfaltering av gongubreyt í niðara borði á 96.000,- kr., og sum eru neyðug fyri at kunna rokna asfaltarbeiðið til verandi hús sum liðugt. Nýgerð av gongubreyt í sunnaru síðu, har tað enn ikki er bygt, verður mett til 191.000,- kr. Samlað meting av manglum er sostatt mett til 946.200,- kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at boðað verður umsøkjarunum frá, at Tórshavnar kommuna er sinnað at yvirtaka vegøkið og gongugøtuna á matriklinum, tá formligu eigaraviðurskiftini eru komin upp á pláss og at útstykkingin lýkur tær treytir sum eru settar í upprunaliga loyvinum til útstykkingina. (tá uttan kostnað fyri kommununa).

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

## 275/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið til býráðsvalið 8. november 2016 fyri Tórshavn, Hoyvík, Sund, Mjørkadal, Norðradal og Koltur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 275/16 | 16/03729-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Tórshavn, Hoyvík, sund, Mjørkadal, Norðradal og Koltur til býráðsvalið 8. November 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Ingunn Eiriksdóttir, Barbara Vang, Rókur Tummasarson og Petur Elias Petersen.

## 276/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Argir til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 276/16 | 16/03730-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Argir til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Gunnar Reynslág, Zakarias Johansen, Birgit Andersen og Valbjørn Dalsgarð.

## 277/16 Val av valnevnd til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 277/16 | 16/03728-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 3, stk. 1, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, verður býráðsval fyriskipað og fyrireikað undir leiðslu av eini valnevnd, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Niels Nattestad, Bjørgfríð Ludvig, Jóan Petur Hentze og Eli Christiansen.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13510<br><br>Formansins merki: |

## 278/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 278/16 | 16/03731-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kaldbak og Kaldbaksbotn til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Jórun Petersen, Johannis Petersen, Petur Skeel Nolsøe og Snorri á Bøgarði.

## 279/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Kollafjørð til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 279/16 | 16/03732-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Kollafjørð til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Elna Debess, Mariann Jacobsen, Christian Martin Dam og Arnbjørn Kristiansen.

## 280/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 280/16 | 16/03733-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Velbastað, Kirkjubø og Syðradal til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti at velja Turid Kjølbro, Súsanna Andreassen, Ragnhild Sandoy og Jan Otto Holm.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild  Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson,  Annfinn  Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal.

## 281/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Hest til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 281/16 | 16/03734-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Hest til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Jacob Pauli Silvurstein, Fríðbjørg Zachariassen, Petur Lyngvej og Sanna Silvurstein.

## 282/16 Val av valstýri fyri atkvøðuøkið Nólsoy til býráðsvalið 8. november 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 282/16 | 16/03735-1 |

**Málslýsing:**

Sbrt. § 8, stk. 3, í lóg nr. 44 frá 19. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 97 frá 15. november 2006, stílar serligt stýri við valstýrarum fyri valinum í atkvøðuøkinum Nólsoy til býráðsvalið 8. november 2016, sum er sett av býráðnum, og sum hevur í minsta lagi 3 limir.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Vald vórðu Sune Hansen, Kirsten Jacobsen, Anny Niclasen og Mikkjal Holm.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13515<br>Formansins merki: |

## 283/16 Fíggjarætlan Tórshavnar havn 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.09.2016 | 33/16 | 16/03393-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 309/16 | 16/03393-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 283/16 | 16/03393-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober 2016 leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember 2016.

**Vinnunevndin 06. september 2016:** Fíggjarætlanin framløgd og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

## 284/16 Fíggjarætlan 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 166/16 | 16/01873-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 153/16 | 16/01873-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 33/16 | 16/01873-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 68/16 | 16/01873-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2016 | 45/16 | 16/01873-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 167/16 | 16/01873-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 171/16 | 16/01873-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 300/16 | 16/01873-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 238/16 | 16/01873-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.09.2016 | 306/16 | 16/01873-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 222/16 | 16/01873-1 |
| 14 Vinnunevndin | 03.10.2016 | 35/16 | 16/01873-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 91/16 | 16/01873-1 |
| 16 Tilbúgvingarnevndin | 06.10.2016 | 1/16 | 16/01873-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 240/16 | 16/01873-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 54/16 | 16/01873-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 308/16 | 16/01873-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 284/16 | 16/01873-1 |
| 21 Trivnaðarnevndin | 17.10.2016 | 49/16 | 16/01873-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 260/16 | 16/01873-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 363/16 | 16/01873-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2017 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Við støði í samtykt fíggjarnevndarinnar 11. mai 2016 og samtyktu tíðarætlanini í máli 16/01224 - FÆ 2017 – tíðarætlan skulu faknevndirnar viðgera uppskot til rakstrar- og íløguætlan fyri 2017. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina at umrøða og kemur til aðru umrøðu á fundi í juni. Í samtyktini hjá fíggjarnevndini er lagt upp til, at grein 4 og 5 fáa eina framskriving á 1,8%. Hetta svarar til áleið lønarhækkingar í 2017, sum eru uml. 1,9%.

Hjálagt (skjølini koma á nevndarportalin mánadagin) er yvirlitsskjal (skjal 1) fyri grein 4 (fólkaskúlaøkið) og grein 5 (mentanar- og ítróttaøkið), umframt viðmerkingar til einstøku

konturnar, ið greina týðandi viðurskifti í sambandi við uppskotið, umframt nærri frágreiðing um møguligar upp- og niðurraðfestingar hjá nevndini at umrøða og meta um.

Á nevndarfundinum fara trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin at gjøgnumganga uppskotið til fíggjarætlan fyri ymisku konturnar. Uppskotini eru m.a. gjørd við støði í fíggjarætlan fyri 2016, mál- og avriksavtalum fyri grein 5 stovnarnar, dialogfundum við leiðslurnar vm. Talan er um stovnar vm. við ymiskum virksemi og ymiskum stevnumiðjum. Í sambandi við fíggjarætlan er týdningarmikið at gera sær greitt, hvussu mett verður um, í hvønn mun stovnar náa settum stevnumiðjum og hvussu til ber at menna indikatorar fyri tað og í øðrum lagi, hvat krevst fyri at gera tað enn betri innan bæði tænastu og rakstur og innan hvønn tíðarkarm!

Umsitingin fer síðani við støði í viðgerðini og viðmerkingunum hjá nevndini á fundinum at gera enn eitt dagført uppskot til nevndarviðgerð í juni. Hareftir verða uppskotini løgd inn í samlaðu fíggjarætlanina, ið aftur kemur til nevndarviðgerð í heyst áðrenn endaligu viðgerðina í býráðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at umrøða uppskotið til fíggjarætlan fyri einstøku konturnar hjá stovnum og øðrum virksemi og
b). at umrøða verandi ella nýggj stevnumið fyri einstøku økini innan rakstur og íløgur,
c). at umrøða møguligar umraðfestingar innan karmin fyri einstøku greinarnar og hvussu hesar kundu verið framdar.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt sum fylgiskjal í nevndarportalinum er frágreiðing viðv. grein 3 – Børn og ung. Á fundinum verður framløga um viðurskiftini sum har eru umrødd.

Innan grein 4 og 5 er gjørd nýggj uppseting og dagføring av skjølunum (sí fylgiskjal "Fíggjarætlan grein 4 og 5" og fylgiskjal "Viðmerkingar til einstøku høvuðskonturnar fíggjarætlan 2017" á nevndarportalinum. Á fundinum verður framløga um útvald viðurskifti í skjalinum og annars framhald av viðgerðini og tilmælinum frá fundinum 25. mai 2016.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2016.

Tilfar kemur áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2017 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum er, at skattaprosenti verður verandi á sama støði. Skattaprosentið lækkaði frá 20,25% til 19,75% í 2016. Barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

**Uppskot á greinastøði 2017**

| | Roknskapur 2015 | Ætlan 2016 | Reg. ætlan juli | Ætlan 2017 | Broyting pct. FÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. FÆ16 - FÆ17 | Broyting pct. RFÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. RFÆ16 - FÆ17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Kommunuskattur | 705.075 | 679.818 | 679.818 | 717.766 | 5,6% | 37.948 | 5,6% | 37.948 |
| Felagsskattur | 30.438 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Húsaleiguskattur | 1.680 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 101.653 | 106.122 | 106.122 | 106.122 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 34.301 | 35.507 | 35.507 | 35.507 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 8.916 | 4.866 | 4.866 | 0 | -100,0% | -4.866 | -100,0% | -4.866 |
| **Inntøkur tilsamans** | **882.063** | **848.313** | **848.313** | **881.395** | 3,9% | **33.082** | 3,9% | **33.082** |
| | | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 76.781 | 78.519 | 79.831 | 79.466 | 1,2% | 947 | -0,5% | -365 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 202.275 | 194.192 | 206.021 | 214.177 | 10,3% | 19.985 | 4,0% | 8.156 |
| §3 Børn og ung | 139.802 | 150.338 | 150.415 | 156.590 | 4,2% | 6.252 | 4,1% | 6.175 |
| §4 Undirvísing | 38.641 | 39.096 | 41.200 | 41.310 | 5,7% | 2.214 | 0,3% | 110 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.933 | 46.197 | 44.087 | 47.944 | 3,8% | 1.747 | 8,7% | 3.857 |
| §6 Teknisk mál | 115.934 | 111.770 | 119.545 | 112.732 | 0,9% | 962 | -5,7% | -6.813 |
| §7 Kommunal virkir | 54.770 | 56.754 | 61.529 | 59.135 | 4,2% | 2.381 | -3,9% | -2.394 |
| **Rakstur tilsamans** | **673.136** | **676.866** | **702.628** | **711.354** | 5,1% | **34.488** | 1,2% | **8.726** |
| | | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 18.245 | 21.000 | 21.000 | 20.000 | -4,8% | -1.000 | -4,8% | -1.000 |
| Aðrar útreiðslur | 2.295 | 2.000 | 2.185 | 2.029 | 1,5% | 29 | -7,1% | -156 |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **20.540** | **23.000** | **23.185** | **22.029** | **-4,2%** | **-971** | **-5,0%** | **-1.156** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **188.387** | **148.447** | **122.500** | **148.012** | **-0,3%** | **-435** | **21%** | **25.512** |
| | | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | | |
| Rentuútreiðslur | 5.583 | 8.869 | 8.869 | 8.800 | -0,8% | -69 | -0,8% | -69 |
| Rentuinntøkur | 123 | 300 | 300 | 100 | -66,7% | -200 | -66,7% | -200 |
| **Rentu útreiðslur tilsamans** | **5.461** | **8.569** | **8.569** | **8.700** | **1,5%** | **131** | **1,5%** | **131** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit av rakstri** | **182.926** | **139.878** | **113.931** | **139.312** | **0%** | **-566** | **22%** | **25.381** |

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 3,9% frá 848 mió. kr. til 881 mió. kr. ella 33 mió. kr. inntøkurnar frá kommunuskatturin hækka 5,6% í mun til fíggjarætlan 2016. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2016 er løgd ein hækking inn á 2%.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2017 hækka rakstrarútreiðslurnar 5,1% frá 677 til 711 mió. kr. Í mun til reguleraða fíggjarætlan 2016 er broytingin 1,2%. Hædd er tikið fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum í 2017. Størsta hækkingin annars er innan Almanna- og heilsumál. Játtanin er ætlað heilsu- og umsorganartænastuni. Játtanin á barnaansingar- og undirvísingarøkinum fylgir barnatalinum, sum væntandi er hægri í 2017. Eisini er tikið hædd fyri, at samtykt var at broyta sysktinaavsláttirin í 2016. Hækkingin fyri kommunal virkir skyldast í størstan mun sáttmálabundnum broytingum.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 139 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu í 2017.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Tórshavnar Havn er løgd fyri vinnunevndina. Sambart uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslur 27,9 mió. kr. og samlaðu inntøkur 59,6 mió. kr. Nettoútreiðslujáttanin verður 31,6 mió. kr. Íløgujáttanin fyri 2017 er 160 mió. kr.

Sambart kommunstýrislógini § 39 skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2016:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til viðlíkahald av bygningum.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin at greiða frá høvuðsspurningum innan grein 3, 4 og 5.

**Vinnunevndin 03. oktober 2016:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, renovasjón og tyrving umframt at hækka konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a. í sambandi við umhvørvispolitikkin.

**Tilbúgvingarnevndin 06. oktober 2016:** Mælir til at játta kr. 880.000,00 til viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn. Samtykt at sløkkiliðið ger uppskot til skipan av skorsteinsreinsan í kommununu.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, avleiddar íløgur í vegakervið í sambandi við Innkomuvegin, íløgur í vegakervið í vestari parti av býnum í sambandi við Glasir, viðlíkahald av øðrum vegum, íløgur í útbygging av samferðslukervi til súkklubreytir og aðrar tekniskar veitingar hjá kommununi. Víðari vísur nevndin á týdningin av at halda fram við gongdini um orkusparandi tiltøk innan bæði vatn og gøtuljós fyri at tálma framtíðar útreiðslunum.

**Trivnaðarnevndin 17. oktober 2016:** Nevndin vísir til skjal nr. 19 í málinum og mælir til at raðfesta játtan kr. 5,5 mió til fleiri tænastur og tilboð til heilsu- og umsorganartænastuna. Nevndin vísir eisini á skjal nr. 7 í málinum og mælir til, at Lopfjølin heldur fram og játta verða kr. 450.000 til endamálið.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin mælir til at uppraðfesta dagstovnaøkið við 3-4 mió kr. eitt nú til serstakan fíggjarleist fyri smæstu stovnarnar, smærri bygningstillagingar konta 3214, fyribyrgjandi verkætlan (TÍT), og betra ungdómsklubbavirksemið.

**Ískoyti:**

Viðvíkjandi inntøkum hevur TK fingið dagførd tøl síðani seinasta fund. Uppskot til broytingar sambært dagførdum tølum (sí talvu niðanfyri) er ein framskriving av Kommunuskattinum við 2% í mun til seinastu meting, sum er komin frá TAKS. Grundað á, at gongdin í felagsskattinum seinastu árini hevur verið hækkandi, er ráðiligt at hækka felagsskattin við 2 mió. kr. Afturbering í samband við eldraøkið er sambært tølum frá FMR. Viðvíkjandi rentuútreiðslum, er hædd tikið fyri verandi lánum, 50 mió. kr., sum áður samtyktar og, at helvtin av íløguni í skúlanum av Fløtum verður láni fíggjaður. Harumframt er hædd tikin fyri verandi lága rentustøði.

| | Uppskot 2017 | Dagførd meting 2017 | Broyting |
|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | | | |
| Inntøkur | | | |
| Kommunuskattur | 717.766 | 715.962 | -1.804 |
| Felagsskattur | 20.000 | 22.000 | 2.000 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 106.122 | 110.967 | 4.845 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 35.507 | 34.972 | -535 |
| Inntøkur tilsamans | 879.395 | 883.901 | 4.506 |
| | | | |
| Rentur | | | |
| Rentuútreiðslur | 8.800 | 6.500 | 2.300 |
| | | | |
| Broyting tilsamans | | | 6.806 |

| | **Býráðsfundur**<br>27. oktober 2016 | Blað nr.: 13521 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Tilmæli**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka støðu til fyriliggjandi fíggjarætlan og broytingum sambært niðanfyristandandi. Eisini verður mælt til at taka støðu til nevndarviðgerðirnar.

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | **2017** |
|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstrarætlan** | | **Løguætlan** |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **79.466** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 76.567 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | 2.899 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **214.177** | **-** | **1.500** |
| | 20. Heilsumál | 18.141 | - | - |
| | 21. Almannamál | 196.036 | - | 1.500 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **156.590** | **-** | **-** |
| | 24. Mentan | 7.772 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 148.818 | - | - |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **41.310** | **-** | **80.075** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 41.310 | - | 80.075 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **47.944** | **-** | **22.500** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 11.161 | - | - |
| | 24. Mentan | 36.783 | - | 22.500 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **112.732** | **-** | **8.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 50.119 | - | 3.000 |
| | 24. Mentan | 2.917 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 18.201 | - | 5.000 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 41.495 | - | - |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **27.510** | **-** | **160.000** |
| | 30. Umhvørvi | 19.275 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 9.394 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | 5.217 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | -6.376 | - | 160.000 |
| **Tilsamans** | | **679.729** | **-** | **272.075** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 20.000 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 8.700 | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | 2.030 | 881.395 | - |
| Tilsamans | | 710.459 | 881.395 | 272.075 |
| **Yvirskot** | | **-** | **170.936** | **-** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-101.139** | **-** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 17.939 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | **17.939** | **-101.139** | **-119.078** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 119.078 | - |
| Fígging íalt: | - | 119.078 | 119.078 |
| **Samanlagt** | **17.939** | **17.939** | **-** |

## Broytingaruppskot:

| Tekstur | Deild | | | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| ***Fíggjarnevndin:*** | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | -535.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | -1.804.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **6.806.000** |
| | | | | |
| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
| | | | | |
| ***Trivnaðarnevndin:*** | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. Lønarregulering | 2700-2799 | 1.232.000 | | 1.232.000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Náttúru- og umhvørvisnevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Mentamálanevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ***Tekniska nevnd:*** | | | | |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -369.000 | | -369.0000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| **Útreiðslur íalt** | | **869.000** | **0** | **869.000** |
| **Broyting íalt** | | **869.000** | | **5.937.000** |

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

## 285/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 155/16 | 16/00040-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 167/16 | 16/00040-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 232/16 | 16/00040-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 301/16 | 16/00040-1 |
| 9 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 191/16 | 16/00040-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 240/16 | 16/00040-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 307/16 | 16/00040-1 |
| 12 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 285/16 | 16/00040-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | | | 16/00040-1 |
| 14 Býráðsfundur | | | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapirnir fyri mai, juni og juli verða lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapirnir fyri august og september verða lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 20:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Olsen |